# GERÐABÓK

**Dato:** 29. oktober 2020 **Kl**. 17:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr:** 214/249

**FUNDARLEIÐARI:**
Annika Jacobina Olsen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Helena á Dam Neystabø
Tróndur Sigurðsson
Halla Samuelsen
Bogi Andreasen
Annfinn Brekkstein
Jákup Dam
Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal
Bjørghild Djurhuus
Gunvør Balle
Turið Horn
Bergun Kass
Heðin Mortensen
Jógvan Arge luttók í mál nr. 237

**LUTTÓKU EISINI:**
Bogi Jacobsen
Jóan Petur Hentze
Barbara Vang
Eyðna Justinnuse
Eyðfríð Jacobsen

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>29. oktober 2020 | Blað nr.: 932 |
| | Formansins merki: |

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 214/20 | 20/00205-1 | Mál beind í nevndir 2020 | 934 |
| 215/20 | 20/03789-9 | Yvirtøka av leigumálunum fyri grundøkið hjá Angus, pylsyvogninum og kioskini undir Krákusteini | 936 |
| 216/20 | 20/03910-2 | Eigarafelagið Heimasta Horn. Broyting av viðtøkum felagsins til góðkenningar. | 939 |
| 217/20 | 20/03766-2 | Viðtøkur fyri Eigarafelagið á Smiðjutún í Kaldbak. | 941 |
| 218/20 | 17/03619-13 | Matr. nr. 91v, Kollafjørður. Eigari vil lata óbygda grundstykkið innaftur til kommununa. | 943 |
| 219/20 | 18/02741-6 | Matr. nr. 199g, Kollafjørður.Marknaðarumskipan. | 945 |
| 220/20 | 19/00698-8 | Matr.nr. 255da, Kirkjubøur. Eigari ynskir at lata óbygda grundstykkið innaftur til kommununa. | 947 |
| 221/20 | 19/00968-3 | Søla av matr.nr. 138co, Hoyvík. | 949 |
| 222/20 | 16/03989-3 | Sp/f Ergo Heini Lassen : Umsókn um keyp av stykki vestanfyri matr. nr. 932c, Tórshavn | 952 |
| 223/20 | 20/03750-1 | Eldradepil í Kollafirði | 955 |
| 224/20 | 19/01965-2 | Gigni : Framtíðar hølisviðurskifti í Tórshavnar kommunu | 959 |
| 225/20 | 19/00719-1 | Lopgrøv í Fimi | 963 |
| 226/20 | 15/03761-9 | Veiðifelagið Byrsumúli : Áheitan um at fáa samstarv í lag við kommununa fyri at betra um viðurskiftini hjá skjótingini í høvuðsstaðnum. | 967 |
| 227/20 | 20/03440-1 | Útgerð - Musikkskúlin | 980 |
| 228/20 | 18/00115-5 | Uppskot um avtalu við Fjølrit um nýtslu av vardum verkum. | 982 |
| 229/20 | 18/03914-1 | Uppskot at velja uttanhýsis umboð fyri kommunustýrið í tvey skúlastýri | 985 |
| 230/20 | 20/03654-1 | Útbjóðing av útstykking við Miðhorn í Tórshavn | 988 |
| 231/20 | 19/04645-1 | Dagføring av vegnum Argjavegur/Argjaboðagøta | 991 |
| 232/20 | 20/01731-2 | Broytan av svingi í Blómubrekku | 995 |
| 233/20 | 20/02256-1 | Vegur til biogassverkið | 997 |
| 234/20 | 20/03778-1 | Heimasta horn, matr. nr. 1121a - byggibúgvið øki til tríggjar íbúðarblokkar | 999 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 235/20 | 20/01228-7 | Áheitan á Tórshavnar kommunu at gera eina meting av hvat skal gerast og at fáa svar aftur frá Tórshavnar kommunu um hvør ætlanin er við Heinagøtu á hesum økinum og nær? | 1001 |
| 236/20 | 18/00992-1 | Lendisgøtur | 1003 |
| 237/20 | 20/01272-1 | Skógfriðing av øki fram við Hoydalsá ísv makaskifti við Búnaðarstovuna | 1007 |
| 238/20 | 20/02427-2 | Umsókn um keyp av geira at leggja afturat matr. nr. 139p, á Hjalla, Hoyvík | 1011 |
| 239/20 | 17/02748-1 | Endurskoðan av byggisamtyktum - almenna- og serstakar byggisamtyktir | 1013 |
| 240/20 | 19/04432-5 | Broyting av almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 894a og 913, frá D1 til A1 | 1020 |
| 241/20 | 20/00719-6 | Nýggj serstøk byggisamtykt fyri vindmyllur í Hoyvíkshaga | 1023 |
| 242/20 | 20/00198-3 | Umsókn um broyting av byggisamtykt og prinsipielt byggiloyvi til Vælveruhús | 1026 |
| 243/20 | 20/03416-1 | Fíggjarætlan 2021, Tórshavnar kommuna | 1030 |
| 244/20 | 20/03794-1 | Eykajáttan oktober 2020 | 1036 |
| 245/20 | 20/00203-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2020 | 1038 |
| 246/20 | 20/04036-1 | Frítíðartilboð til 3. flokk í Badmintonhøllini | 1041 |
| 247/20 | 20/04037-1 | Ábøtur á venjingarrúm í Høllini á Hálsi | 1043 |
| 248/20 | 20/00201-1 | Kunning/fráboðanir í 2020 til býráðið | 1045 |
| 249/20 | 18/02670-1 | Møguligt keyp av trøð í Hoydølum. Matr.nr. 16b, Hoyvík. | 1046 |

**Til viðgerðar**

## 214/20 Mál beind í nevndir 2020

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.01.2020 | 3/20 | 20/00205-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 25/20 | 20/00205-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 63/20 | 20/00205-1 |
| 4 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 87/20 | 20/00205-1 |
| 5 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 131/20 | 20/00205-1 |
| 6 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 182/20 | 20/00205-1 |
| 7 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 214/20 | 20/00205-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |

| | **Býráðsfundur**<br>29. oktober 2020 | Blað nr.: 935 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |
|---|---|---|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 30. januar 2020:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Einmælt samtykt.

# 215/20 Yvirtøka av leigumálunum fyri grundøkið hjá Angus, pylsyvogninum og kioskini undir Krákusteini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 19.10.2020 | 78/20 | 20/03789-9 |
| 2 Fíggjarnevndin | 28.10.2020 | 274/20 | 20/03789-9 |
| 2 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 215/20 | 20/03789-9 |
| 3 Ferðslunevndin | 26.10.2020 | 23/20 | 20/03789-9 |
| 4 Tekniska nevnd | 27.10.2020 | 56/20 | 20/03789-9 |

**Upprunin til málið:**
Umsókn frá Christian Andreasen, adv., vegna SP/F 12.02.2020 um loyvi at yvirtaka leigumálini hjá Angus, Pylsuvogninum og Kioskini undir Krákusteini

**Lýsing av málinum – samandráttur**
SP/F 12.02.2020, ið er eitt 100% dóttirfelag hjá P/F SMS, hevur keypt matstovuna Angus, umframt kioskina og pylsuvognin undir Krákusteini (Havnargøta 11 og 13).

Felagið ætlar at víðka um matstovuna Angus soleiðis, at umframt verandi bygning, kemur hon at fevna um pylsuvognin og kioskina umframt terassuna, har ið útiservering fer fram í dag.

Christian Andreasen, adv., søkir vegna SP/F 12.02.2020 um at fáa leigumálið broytt soleiðis, at talan verður um eitt samlað leigumál, sum eisini skal umfata tey 3 p-plássini millum bygningarnar. Eisini verður biðið um at fáa 25 ára leigusáttmála.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Matstovan Angus, Pylsuvognurin og kioskin undir Krákusteini standa á matr.nr. 600a, ið er Eystara Havnaøki í Tórshavn.
Tórshavnar Havn hevur lagt doyin á at varðveita møguleikan fyri, at kunna gera neyðugar útbyggingar, herundir broytingar í til- og frákoyringum, á økinum, tá hetta gerst neyðugt, og tí hevur verið roynt at hildið fast í so stuttum leigusáttmálum sum gjørligt á økinum.

Leigusáttmálarnar um grundøkini, har kaikioskin og pylsuvognurin standa, eru frá 2006 og vóru óuppsigiligir í 5 ár, og hava síðani 6 mánaða uppsagnarfreist. Tó kann útleigarin krevja økini aftur, um hann tørvar økini vegna útbyggingar, við at lata leigarunum onnur øki.

Leigusáttmálin um grundøki, har ið Angus stendur, er frá 2013 og var upprunaliga óuppsigiligur í 15 ár fram til 10. mars 2028, men vinnunevndin samtykti í 2018 at leingja leigutíðarskeiðið til 10.02.2033 (hesum mælti havnameistarin tó frá). Aftaná hetta tíðarskeiðið er uppsagnartíðin 6 mánaðar, tó kann eigarin (TH) krevja at fáa økið aftur í leigutíðini, um tørvur er á økinum vegna útbyggingar, við at lata leigaranum annað øki.

Leigusáttmálin um terassuna er gjørdur í 2013 og hevur uppsagnartíð á 3 mánaðir, tó kann útleigarin víkja frá uppsagnartíðini, um um- og útbyggingar gera hetta neyðugt.

Í sambandi við mál um broyting av almennu byggisamtyktini fyri B1 – Eystara Havnarøki, ið snúði seg um at víðka havnaøkið við uml. 100.000 fermetrum í.s.v. víðkan av Skansabryggjuni, vórðu ferðsluviðurskiftini

frá havnarlagnum eisini viðgjørd, tí at Býarskipanarnevnd Landsins vísti á, at ferðsluviðurskiftini vóru ikki nøktandi til nógva tunga ferðslu.
Tórshavnar kommuna ásannaði tá, at ferðsluviðurskifti frá havnarlagnum ikki vóru nøktandi, soleiðis, sum vegamótið er skipað nú. Kommunan boðar tí í hoyringsskrivi sínum frá, at í sambandi við broyttu verkætlanina verður vegurin frá havnarlagnum og yvir á vegin Yviri við Strond breiðkaður, soleiðis at eitt eyka spor verður gjørt burturav til tunga ferðslu. Heilsu- og Innlendismálaráðið, ið tá var góðkennandi myndugleikin, legði m.a. hetta til grund fyri at broytingin í byggisamtyktini varð góðkend.
Tað er tískil alneyðugt framhaldandi at hava møguleika til at gera tær neyðugu tillagingar á hesum vegamóti, tí tað hevur kommunan bundið seg til. Ansast má eftir, ikki at útleiga viðkomandi økið á slíkan hátt, at tað ikki slepst til at gera hesar neyðugu tillagingarnar, uttan at tað gerst óneyðuga kostnaðarmikið, tí endurgjald má latast leigarum fyri bygningar ella annað, ið bygdir eru á leigað økið, ið hevur verið ætlað til broytta ferðsluloysn.

Tekniska deild hevur arbeitt við at tekna eina nýggja loysn fyri ferðsluna frá Havnarlagnum og til vegin Yviri við Strond. Eitt uppskot er at gera eitt nýtt eyka spor til tunga ferðslu aftrat verandi rundkoyringunum, sum harvið mugu flytast nakað norðureftir, tí tað ber ikki til at koma nærri Skansanum. Eitt annað uppskot er at taka báðar rundkoyringar burtur og heldur gera leiðina Eystara Bryggja - Yviri við Strond til høvuðsveg, og at vegirnir Havnargøta og J.Broncks gøta fáa víkiskyldu inn móti hesum høvuðsvegi.
Hesi uppskot til loysnir eru tó ikki endaliga liðug enn. Uppskotini skulu granskast nærri, og síðani skal endaliga uppskotið leggjast fyri ferðslunevndina og teknisku nevnd til góðkenningar.
Fyrrenn endaliga uppskotið til ferðsluloysn er góðkent í viðkomandi nevnd, ber ikki til at staðfesta, um tørvur verður á parti av økinum, ið umsøkjarin ætlar at byggja á, til nýggja ferðsluloysn.

### Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið

- J.nr. 14/04429. Broyting av almennu byggisamtyktini í sambandi við víðkan av Skansabryggjuni og Eystara havnaøki.
- J.nr. 18/01336. Umsókn frá Rúna Djurhuus um at ein nýggjur eigari av matstovuni Angus kann yvirtaka leigusáttmálan um lendi

### Møgulig frávik/lættar frá ásetingum

### Umhvørvisárin

### Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)

### Skjøl

### Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Havnameistarin mælir til, at útseta støðutakan til umsóknina, inntil nýggja ferðsluloysnin er komin endaliga upp á pláss og góðkend av viðkomandi myndugleikum.

**Vinnunevndin 19. oktober 2020:** Samtykt at leggja tey trý leigumálini saman hjá Angus, Pylsuvognurin og kioskina og terassuna har útiservering fer fram í dag og leingja leigumálið í 25 ár og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Nú tørvur verður á at fáa farleiðina frá havnarøkinum og út úr býnum so góða sum til ber, er neyðugt at endurskoða verandi farleið, har rundkoyringar eru. Nevndu rundkoyringar vóru gjørdar í 80'unum, tá ferðslan var stór har. Ringvegurin var ikki komin, tá tær vóru gjørdar og var ferðslutrýstið tí sera stórt har.

Ferðslu mynstrið er nógv broytt síðan tá, og er ferðslan nógv minkað har niðri, tó er ferðslan frá havnarøkinum nógv vaksin. Umsitingin hevur gjørt uppskot til eina loysn, har farleiðin frá havnarøkinum hevur fyrstu raðfesting og leiðin frá Havnargøtu og Jónas Broncks gøtu hava treytaleysa víkiskyldu, sí uppskot 1, skjal 20/03789-13. Við hesum uppskoti er verandi vegaøki nøktandi, t.v.s. at ikki er neyðugt at inndraga eyka øki. Uppskotið við at gera eitt nýtt eyka spor til tunga ferðslu aftrat verandi rundkoyringunum, lýst í uppskoti 2, skjali 20/03789-14, verður ikki mett nøktandi, tí uppstriking v.m. verður ov torskild.

**Tilmæli:**
Ferðslubólkurin mælir til, at ferðsluviðurskiftini verða broytt sambært uppskoti 1, j. nr. 20/03789-13.

**Ferðslunevndin 26. oktober 2020:** Tilmælið frá ferðslubólkinum er komið skeivt fyri. Tað rætta skuldi vera, at ferðslubólkurin tekur ikki undir við uppskoti 1, j. nr. 20/03789-13.

Ferðslunevndin mælir staðiliga til, at rundkoyringarnar verða óbroyttar, vísandi til at onki ferðsluóhapp hevur verið á staðnum í fleiri ár.
Uppskotið tekur ikki hædd fyri bleytari ferðslu. Ferðslan frá Eystaru Bryggju til Havnargøtu og frá niðankoyringini frá Eystaru Bryggju og til J. Broncks gøtu fer at skapa vandar fyri bilaferðsluna. Tvey konfliktpunkt koma at uppstanda.

Vísandi til uppskot 2, j. nr. 20/03789-14 við eykaspori til tunga ferðslu, mælir ferðslunevndin frá hesi loysn. Eitt eyka spor, til tunga ferðslu, vil økja um ferðina, og harvið verður tað munandi ótryggari fyri teir bleytu trafikkantarnar á staðnum.
Haraftrat skal viðmerkjast, at onki ítøkiligt uppskot er framlagt um hvussu vegirnir við tungari- og vanligari ferðslu kunnu samantvinnast.

**Tekniska nevnd 27. oktober 2020:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 28. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við vinnunevndini tann 19. oktober 2020 og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Einmælt samtykt.

# 216/20 Eigarafelagið Heimasta Horn. Broyting av viðtøkum felagsins til góðkenningar.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.10.2020 | 250/20 | 20/03910-2 |
| 2 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 216/20 | 20/03910-2 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur.**
Eigarafelagið Heimasta Horn, hevur á eykaaðalfundi 12. oktober 2020, samtykt broytingar í viðtøkum eigarafelagsins.

Sambært § 22 í viðtøkunum framgongur, at viðtøkurnar verða at tinglýsa sum servituttur á matr.nr. 1119d, íbúð 1 – 24, 1119e, íbúð 1–24, 1119f, íbúð 1-24, Tórshavn.

Átalurætt hevur eigarafelagið við nevndini og ein og hvør íbúðareigari umframt Tórshavnar kommuna.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin.** Ongi.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.** Umbøn við skjølum. **20/03910–1.**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni, mæla til at góðkenna nýggju viðtøkurnar.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Einmælt samtykt.

## 217/20 Viðtøkur fyri Eigarafelagið á Smiðjutún í Kaldbak.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.10.2020 | 249/20 | 20/03766-2 |
| 2 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 217/20 | 20/03766-2 |

**Upprunin til málið:** Kommunan bjóðaði lendi út í Kaldbak tí útstykking við 5 – 6 grundstykkjum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Keyparar hava nú stovnað eigarafelag ( Eigarafelagið á Smiðjutún í Kaldbak ) Sølan av lendinum verður avgreidd við skeytið, og verður tað Eigarafelagið sum verður tinglýstur eigari av lendinum, og fremur verkætlan v.m.

Endamál eigarafelagsins, er at fremja útstykking, byggibúning av grundstykkjum á øki í Kaldbak, samsvarandi útstykkingarætlan býráðsins.

Sum partur av grein 9 í viðtøkunum framgongur, at allar broytingar í viðtøkum, skulu góðkennast av Tórshavnar kommunu.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin.** Ongi.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.** Viðtøkur, stovnandi aðalfundur, skrásetingarprógv úr vinnuskránni.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís øki í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni, mæla til at góðkenna viðtøkur eigarafelagsins, sí skjal 20/03766-1.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Einmælt samtykt.

## 218/20 Matr. nr. 91v, Kollafjørður. Eigari vil lata óbygda grundstykkið innaftur til kommununa.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.05.2020 | 116/20 | 17/03619-13 |
| 2 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 90/20 | 17/03619-13 |
| 3 Fíggjarnevndin | 21.10.2020 | 245/20 | 17/03619-13 |
| 4 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 218/20 | 17/03619-13 |

**Upprunin til málið:** Umsókn frá eigara dagfest 12.05.2020

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Viðv. matr.nr. 91v, Kollafjørður. Vídd 640m2. Keypsprísur kr. 300.806,40
Grundstykkið er tinglýst verandi eigara 17.01.2019
Eigari vil lata óbygda grundstykkið innaftur til kommununa.

Snarskivan hevur í tveimum umførum útlutað stykkir í útstykkingini so hvørt sum grundstykkir eru komin innaftur. Hetta varð gjørt á tann hátt, at tey sum ikki fingu tillutað grundstykkir í fyrsta umfari, fingu møguleika til at verða við í nýggjari útlutan. Øll sum teknaðu seg til upprunaligu útlutanina, hava fingið grundstykkið í boðið

**Lógir, ásetingar o.a.** Kommunustýrislógin. Reglur fyri viðgerð av umsókn og útlutan av fastari ogn til egnan privatan bústað

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin.** Ongi.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.** Kortskjal.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at keypa grundstykkið aftur fyri kr. 300.806,40 og síðani at selja grundstykkið í fríðari sølu til ásettan minstaprís sum er samsvarandi hesum prísi kr. 300.806,40

**Fíggjarnevndin 20. mai 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti.**

Eftir at kommunan hevði keypt grundstykkið aftur, varð heitt á Ognarmeklara, BetriHeim, um at lýsa grundstykkið til sølu við ásettum minstaprísi kr. 300.806,40

BetriHeim, hevur í teldubrævi 18.09.2020 boðað frá, at hægsta boð uppá ognina var kr. 410.000,00 og at BetriHeim hevur tikið grundstykkið av sølulista, meðan bíðað verður eftir býráðssamtyktini.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni, mæla til at selja grundstykkið, matr.nr. 91v, Kollafjørður, fyri innkomið boð áljóðandi kr. 410.000,00

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Einmælt samtykt.

## 219/20 Matr. nr. 199g, Kollafjørður.Marknaðarumskipan.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 12.02.2020 | 36/20 | 18/02741-6 |
| 2 Tekniska nevnd | 06.10.2020 | 45/20 | 18/02741-6 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.10.2020 | 185/20 | 18/02741-6 |
| 4 Fíggjarnevndin | 21.10.2020 | 251/20 | 18/02741-6 |
| 5 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 219/20 | 18/02741-6 |

**Upprunin til málið:** Umsókn.

**Lýsing av málinum – samandráttur.** Verandi vegaføring samsvarar ikki matrikulviðurskiftunum. Ætlanin er at rætta upp uppá matrikulin við marknaðarumskipan. Kommunan fær uml. 55 m2, burtur av matr.nr. 199g, sum verður lagt afturat vegnum litra al, og vera samsvarandi fermetrar við marknaðarumskipan lagdir afturat matr.nr. 199g.

Eigarin av matr.nr. 199g, heldur at hetta er ein góð loysn, men vísir á at loysnin er dýr fyri tey, vísandi til at grundstykkið kemur at hava mark móti vegi ið ikki er liðugtgjørdur, og verða tey tí noydd til at gera garð uppmóti vegnum.

Eigarin skjýtur upp málið verður avgreitt sum marknaðarumskipanarmál, og at tey fáa játtað ókeypis íbinding í veg og kloakk.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at beina málið í byggi- og býarskipanardeildina.

**Fíggjarnevndin 12. februar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Vegatkoman til útstykkingina niðan fyri 199g tykist nøktandi, men vegurin til útstykkingina oman fyri 199g, t.e. 199i, 199c, 198b, 192l er ikki liðugur og vegurin er smalur.
Tað tykist skilabetri, at ognin 199h framhaldandi verður partur av vegnum, tá hann verður gjørdur liðugur, soleiðis at vegatkoman verður nøktandi til útstykkingina omanfyri.
Býarskipanarliga verður mett, at partur av 199g eigur at verða keyptur til breiðkan av vegnum, heldur enn at makaskifta við 199h. Sí skjal 18/02741-6, sum vísir nýggja matrikulmarkið út móti vegnum.

Talan er um 55 fermetrar, sum kommunan skal keypa frá eigaranum. Upplýsast skal, at eigararnir keyptu ognina matr. nr. 199g fyri 259,00 kr./$m^2$.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til, at kommunan keypir part av 199g til breiðkan av vegnum, og at 199h verður lagdur í litra saman við 198a, tá vegurin verður liðugt gjørdur, og at beina málið í fíggjarnevndina. Kostnaður, ið kommunan kann bjóða er kr. 14.245, hetta verður fíggjað av konto 8110, rakstur av vegum.

**Tekniska nevnd 06. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Einmælt samtykt.

# 220/20 Matr.nr. 255da, Kirkjubøur. Eigari ynskir at lata óbygda grundstykkið innaftur til kommununa.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.10.2020 | 244/20 | 19/00698-8 |
| 2 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 220/20 | 19/00698-8 |

**Upprunin til málið:** Eigari heitir á kommununa um at taka óbygda grundstykkið innaftur.

**Lýsing av málinum – samandráttur.**
Matr. nr. 255da, Kirkjubøur,Argir. ( Klingurstjørn 2 )
Planerað grundstykkið.
Vídd 406m2 + 1/45 partur av felagsluti matr.nr. 255ek. ( 600m2/45 = 13m2 )
Keypsprísur kr. 696.230,-
Skeytið er tinglýst 12.03.2020

Sambært áseting í skeytinum, falla allar útreiðslur í samband við møguliga afturskeyting til keypara. Tórshavnar kommuna verður hildin skaðaleys fyri eini og hvørji útreiðslu í hesum sambandi.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.** Skeyti. Kort.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni, mæla til, at keypa stykkið aftur fyri upprunaligan søluprís kr. 696.230,00 og at luta tað útaftur sambært reglugerð.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Einmælt samtykt.

## 221/20 Søla av matr.nr. 138co, Hoyvík.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 10.04.2019 | 97/19 | 19/00968-3 |
| 2 Býráðsfundur | 24.04.2019 | 82/19 | 19/00968-3 |
| 3 Fíggjarnevndin | 21.10.2020 | 246/20 | 19/00968-3 |
| 4 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 221/20 | 19/00968-3 |

**Upprunin til málið:**

Kommunan hevur keypt grundstykkið aftur, vísandi til at grundstykki lá óbygt.

**Lýsing av málinum – samandráttur.**

Talan er um grundstykki í útstykkingini við Myllutjørn. Grundstykkið hevur ligið á sølulista hjá ognarmeklara. Hægsta boð var kr. 800.000,00 og kom onki mótboð eftir hetta.

Ognarmeklarin hevur tikið grundstykkið av sølulista higartil at býráðið hevur tikið avgerð í málinum.

**Lógir, ásetingar o.a.** Kommunustýrislógin.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/léttar frá ásetingum.** Ongir.

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at selja ognina fyri kr. 800.000,-

**Fíggjarnevndin 10. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 24. apríl 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

Verandi eigararkeyptu grundstykkið í fríðari sølu fyri kr. 800.000,00 og var skeytið tinglýst 31.05.2019. Tey hava nú slept ætlanum um at byggja á stykkinum, og søkja nú um loyvi til at selja óbygda grundstykkið.

Í uppruna skeytinum frá 16.09.2011 vóru tinglýstir servituttir um byggifreist, og um víðarisølu.

**Grein 6**

Byggingin skal vera byrja innan 2 ár frá tí, at byggibúningin er liðug og klárt er at byggja á stykkinum. Byggingin skal vera liðug og byggiváttan útskrivað í seinasta lagið 3 ár frá tí, at byggibúningin er liðug og klárt er at byggja á stykkinum. Annars tilskilar kommunan sær rætt til eina og hvørja tíð at krevja sær ognarrættin til stykkið aftur, móti, at keyparin fær uppruna keypspeningin og tað, hann hevur goldið fyri byggibúning, afturgoldið uttan rentur. Fellur stykkið aftur av hesi orsøk, og keyparin hevur byrjað bygging, kann hann fáa prógvaðar útreiðslur endurgoldnar í tann mun, tað gjørda arbeiðið kemur seljaranum ella øðrum keypara av sama stykki til góðar.

**Grein 7**

Keyparin hevur ikki loyvið til at selja stykkið víðari, fyrr enn egin sethús til privatan bústað eru bygd á stykkinum; og keyparin hevur búð í privatu húsinum í 3 ár. Tórshavnar býráð kann loyva frávik frá hesum, um haldgóð grundgeving fyriliggur.

**Viðmerkingar:**

Kommunan hevur tveir møguleikar. At loyva víðarisølu ella at keypa grundstykkið aftur fyri kr. 800.000,00

Vísandi til at verandi eigarar keyptu grundstykkið í fríðari sølu, verður mett, at eigari skal hava loyvi til at selja grundstykkið aftur.

Víðarisøluskeytið skal vísa til uppruna tinglýstar servituttar, men verður mett rætt, at servittur grein 6, broyttur til.

Byggingin skal vera byrja innan 2 ár frá tí, at byggibúningin er liðug og klárt er at byggja á stykkinum. Byggingin skal vera liðug og byggiváttan útskrivað í seinasta lagið 3 ár frá tí, at byggibúningin er liðug og klárt er at byggja á stykkinum. Annars tilskilar kommunan sær rætt til eina og hvørja tíð at krevja sær ognarrættin til stykkið aftur, móti, at keyparin fær kr. 800.000,00 afturgoldið. Fellur stykkið aftur av hesi orsøk, og keyparin hevur byrjað bygging, kann hann fáa prógvaðar útreiðslur endurgoldnar í tann mun, tað gjørda arbeiðið kemur seljaranum ella øðrum keypara av sama stykki til góðar.

Kommunan tryggjar sær við hesi broyting, at kunna krevja grundstykkið aftur fyri sama prís sum núverandi eigarar hava keypt grundstykkið fyri.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>29. oktober 2020 | Blað nr.: 951 |
| | Formansins merki: |

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni, mæla býráðnum til, umvegis fíggjarnevndina, at loyva verandi eigarum at selja teirra grundstykkið í fríðari sølu, treytað av at tinglýstur servituttur sí grein 6 í uppruna skeytinum, verður broyttur, sambært viðmerkingum.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Einmælt samtykt.

# 222/20 Sp/f Ergo Heini Lassen : Umsókn um keyp av stykki vestanfyri matr. nr. 932c, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 415/16 | 16/03989-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.10.2017 | 223/17 | 16/03989-3 |
| 3 Fíggjarnevndin | 21.10.2020 | 253/20 | 16/03989-3 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 26.10.2020 | 218/20 | 16/03989-3 |
| 5 Fíggjarnevndin | 28.10.2020 | 277/20 | 16/03989-3 |
| 6 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 222/20 | 16/03989-3 |

**Málslýsing:**
Sp/F Ergo søkir um at keypa umleið 50 m2 av matr. nr. 932a. Talan er um lendi millum Ergo og Ellisheimið í V. U. Hammersheimbsgøtu 7.

Orsøkin til umsóknina er m.a. at tey als einki uttanumøki hava og tískil hava trupulleikar av oljutanga og ruskíløtum, sum í løtuni standa á økinum hjá Ellisheiminum.

Sp/F Ergo sendi kommununi líknandi umsókn í 2013, j.nr. 2013-2583, ið ikki var gingin á møti. Um einki nýtt er í málinum er meginreglan, at mál ikki vera tikin uppaftur.

Fíggjarnevndarlimur biður um at fáa málið á skrá.

**Tilmæli:**

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at geva umsøkjaranum brúksrætt til økið, ið søkt verður um, í fimm ár við treytum um, at skal kommunan nýta økið, verður brúksrætturin tikin aftur.

**Ískoyti.**
Økið sum Sp/f Ergo hevur fingið brúksrætt til, verður brúkt av Ellisheiminum og er eisini innrættað til nýtsluna hjá Ellisheiminum við platti og atkomu frá vegnum.

Tiskil ber ikki til at leiga hetta økið til Sp/f Ergo.

Mett verður, at kommunan beinanvegin eigur at uppsiga brúksavtaluna, og at Ellisheimið og Sp/f Ergo sjálvi viðgera staðseting av ruskbingjuni hjá Sp/F Ergo og atgongd til hesa.

Viðvíkjandi oljutanganum, ið hevur staði har í nógv ár, er einki til hindurs fyri at hann verður standandi til kommunan hevur tørv á økinum.

**Tilmæli.**
Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini, mæla til at:

1. siga upp verandi brúksavtalu
2. loyva at oljutangin verður standandi til kommunan hevur tørv á økinum.
3. leiðslan á Ellisheiminum ger avtalu við Sp/F Ergo um staðseting av ruskbingju á 2 m2
   Sp/F Ergo rindar allar útreiðslur ið standast av at innrættað seg á staðnum.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2017:**
Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Sp/f Ergo & Hjálpartól søkir enn einaferð um loyvi til at keypa økið vestan fyri teirra vinnubygning á J. C. Svabosgøtu 6.

Felagið vísir á, at tað er umráðandi at felagið fær økið til keyps, áðrenn Ellisheimið møguliga verður selt.

Felagið hevur tørv á at keypa økið, tí onki pláss er rundan um bygningin, og stendur oljutangi og ruskbingjan hjá felagnum, inni á økinum hjá Ellisheiminum, og er tað ikki vist at møguligur nýggjur eigari heldur tað verða í lagi, at felagið brúkar økið.

Felagið hugsar sær, at økið skal verða 4 metrar og ikki 5 metrar sum áður hevur verið søkt um og í fullari breidd av bygninginum sum er góðar 10 metrar breiður. Sostatt verður nú søkt um eitt økið á uml. 40 fermetrar, heldur enn teir uml. 50 fermetrarnir sum felagið áður hevur søkt um.

Felagið hevur ongar trupulleikar av at ellisheimið brúkar økið, sum tey brúka í dag, higartil at tey flyta, og kann hetta eisini setast sum treyt í samband við søluna.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

Um byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at selja økið, verður virðismeting umbiðin frá ognarmeklara, og verður møgulig søla við grundarlag í hesi virðismeting løgd fyri í fíggjarnevnd og býráð.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Umsitingin er upplýst um, at Ellisheimið hevur fingið góðkenningarloyvið til køkin treytað av, at ruskpláss er á hesum plássinum, og tískil eigur økið ikki at verða selt.

Um bygningurin verður seldur, kann hugsast at nýggi eigarin somuleiðis skal hava hesa góðkenning, og verður tørvurin á ruskplássinum sostatt neyðugur, hóast sølu.

Sostatt er ikki nokk, at Ellisheimið fær møguleikan at brúka økið, men skal nýggi eigarin somuleiðis hava atgongd til økið, um køkurin framhaldandi skal halda góðkenningina.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, leiðarin á Stjórnarskrivstovuni og býararkitekturin mæla frá at selja økið, grundað á ynski um, at ein komandi eigari av ognini somuleiðis skal hava møguleikan til eina framhaldandi góðkenning av køkinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við at geva umsøkjaranum brúksrætt til økið í 5 ár og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Tikið av skrá.

# 223/20 Eldradepil í Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Eldranevndin | 08.10.2020 | 17/20 | 20/03750-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.10.2020 | 255/20 | 20/03750-1 |
| 3 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 223/20 | 20/03750-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Verandi sambýli í Kollafirði hýsir 7 borgarum. Táverandi Kollafjarðar kommuna keypti bygningin Inni í Firði 97 í 1995. Í sambýlinum er rúm fyri 7 borgarum. Sambýli er ikki longur tíðarhóskandi umframt at tørvur er á væl fleiri plássum enn tey 7, sum eru har í dag. Heldur ikki eru umstøður at venja í verandi hølum. Í Kollafirði er heimatænastan integrerað við sambýlið, soleiðis at tað eru somu starvsfólk, sum arbeiða á sambýlinum, sum eisini koyra út til teir heimabúgvandi borgararnar. Henda skipan hevur sum heild virka væl, men av tí at sambýli er so lítið og tørvur ikki er á, at fleiri enn tvey starvsfólk eru til arbeiðis í senn, kann tað gerast ein trupulleiki at annar má fara av heiminum til heimabúgvandi borgarar. Hetta hevði verið væl smidligari skipan um sambýli var størri við fleiri borgarum, tí so hevði starvsfólkanormeringin verið økt samsvarandi.

Í uppskoti til kommunuætlan 2020 sæst m.a., at kommunan vil virka fyri at nøkta tørvin á búplássum á eldraøkinum og at kanna tørvin á og finna hóskandi loysnir til, at eldraíbúðir kunnu byggjast og sostatt gera bústaðarmarknaðin meira fjøltáttaðan. Valið skal ikki standa millum at búgva í sethúsum ella á røktarheimi.

Fyrisitingin hevur gjørt eina virksemisætlan, ið lýsir tørvin á útbyggingum á eldraøkinum. Henda virksemisætlan var løgd fyri eldranevndina 11. sept. 2017 (j. nr. 17/00086). Í virksemisætlanini verður m.a. mælt til, at byggja eldradepil í Kollafirði at taka í nýtslu 2024-2025.

Sambært virksemisætlanini skal á deplinum vera pláss fyri 24-30 borgarum, blandað røktarbúpláss, stutttíðarpláss og røktaríbúðir. Harafturat skulu dagtilhald og venjingarumstøður verða á deplinum.

Niðanfyri verður greitt frá framtíðartørvinum á eldrabúplássum við støði í frágreiðing, ið var gjørd í 2016:

Sí leinki
https://www.torshavn.fo/get.file?ID=2434

Frágreiðingin, s. 29, sí talvu niðast, vísir, at longu í 2030 verður tørvur á 359 røktarbúplássum í Tórshavnar kommunu um verandi dekningsstig[1] verður varðveitt.

Elstu aldursbólkarnir vaksa meira lutfalsvís við tað, at livitíðin gerst longri. Í 2030, um 10 ár, er aldursbólkurin 80+ væntandi næstan dupult so stórur, sum hann var í 2015 og verður væntandi umleið tríggjar ferðir so stórur í 2050, sum hann var í 2015.

[1] Í Tórshavnar kommunu er dekningsstigið 26,5%, hetta merkir eisini, at tað er eitt røktarbúpláss fyri umleið fjórða hvønn borgara, sum er 80 ár og eldri. Hetta er væl hægri enn fyri Danmark, har tað er eitt røktarbúpláss fyri umleið 5. Hvønn borgara 80 ár og eldri. Norra og Svøríki hava uppaftur lægri dekningsstig

Aldursbólkurin 80 ár og eldri

| | 2000 | 2010 | 2015 | 2020 | 2030 | 2040 | 2050 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 80-84 ÁR | 272 | 353 | 372 | 465 | 710 | 825 | 966 |
| 85-89 ÁR | 137 | 192 | 245 | 248 | 405 | 543 | 761 |
| 90-94 ÁR | 40 | 103 | 112 | 141 | 181 | 292 | 369 |
| 95-99 ÁR | 8 | 17 | 26 | 35 | 46 | 85 | 138 |
| 100+ ÁR | 0 | 4 | 7 | 9 | 14 | 24 | 37 |
| TILSAMANS | 457 | 669 | 762 | 898 | 1356 | 1769 | 2271 |
| INDEKS, 2015=100 | 60 | 88 | 100 | 118 | 178 | 232 | 298 |

*Talva 10 Fólkaframrokning býtt á aldur 80 ár og eldri, haraftrat eru árini gjørd um til indeks, 2015=100, kelda: biløgd tøl frá Hagstovu Føroya*

Tí var eyðsæð neyðugt at venda sjóneykuna móti hesum aldursbólki og framtíðartryggja ta røkt og tey átøk, sum væntandi verða neyðug, m.a. rehabilitering og vælferðartøkni sum eru við til at útseta tørvin á røktarbúplássi.

Í lóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. frá 2014 er í grein 13 ásett, at kommunur kunnu seta á stovn bústaðir til fólkapensjónistar. Bústaðir kunnu sbrt. stk. 2 fevna um 1) røktarheim, 2) eldrasambýli, 3) eldraíbúðir, 4) umlættingarpláss og 5) samdøgursendurvenjingarpláss. Í 2019 var lógin broytt og eftir § 13, stk. 3 fingu kommunurnar nú eisini heimild at seta á stovn eldraíbúðir at leiga út til borgarar, ið eru 60 ár og eldri.

Í løtuni verður síðsta hond løgd á Umlættingar- og rehabiliteringsdepil í Hoyvík, umframt at útbygging á Tjarnargarði eru um at vera liðug. Hetta merkir at Tórshavnar kommuna komandi ár hevur 247 lang- og stutttíðarpláss.

Hugsað er, at í eldradeplinum í Kollafirði skulu umframt lang- og stutttíðarpláss eisini vera eitt ávíst tal av røktaríbúðum. Við støði í lógarásetingini, sum nevnd er omanfyri, so eru eldraíbúðir eisini bústaðarloysn, ið kommunur kunnu stovna. Talan kann vera um røktaríbúð og eldravinarliga íbúðir.

Felags fyri allar eldraíbúðir er tó, at tær skulu vera innrættaðar hóskandi við breiðum hurðum, ongum gáttum, egnum vesi og rúmligum baðirúmi, so tað er pláss fyri koyristóli og hjálparfólki. Íbúðirnar skulu ikki hava trappu til høvuðsinngongd, og um íbúðin ikki er í veghædd, skal lyft vera til íbúðina. Eitt annað, ið eisini er øðrvísi við eldraíbúðum í mun til búpláss á røktarheimi er, at í íbúðunum kunnu búgva hjún ella sambúgvandi. Røktaríbúð vil vanliga vera næstsíðsti bústaðurin, áðrenn upptøku til fast røktarheimspláss.

Røktaríbúðir kunnu við tí største fyrimuni byggjast saman við einum røktarheimi, har borgarin fær ágóða av øllum felagsfasilitetunum eitt nú venjingarumstøðum og trivnaðartilboðum annars. Eru røktaríbúðir knýttar at røktarheimi, verða tað starvsfólk á røktarheiminum, sum veita ta heimatænastu, ið borgarin annars vildi fingið sum heimabúgvandi. Hetta lættir sostatt um hjá heimatænastuni, men krevur ávísa tillaging av røktarnormeringini á heiminum. Kommunan hevur, sum omanfyri nevnt, heimild at byggja og reka røktaríbúðir.

Røktaríbúðirnar, hóast bygdar saman við ella upp at einum røktarheimi, eru leiguíbúðir, og kunnu tí byggjast og umsitast við støði í tí, men har kommunan tryggjar sær fullan visitatiónsrætt.

Visitatión til plássini á eldradepilinum í Kollafirði eins og øllum øðrum plássum í kommununi, skal fara fram sambært lóggávuni, har tann borgari sum hevur størsta tørvin, fær bjóðað plássið.

Í sambandi við bygging av nýggjum eldradepli í Kollafirði, er ætlanin sostatt, at bygt verður eitt røktarheim við røktarbúplássum, stutttíðarplássum, røktaríbúðum við dagtilhaldi og venjingarumstøðum og atknýttum røktar íbúðum. Vælferðartøkni og snildtøkni (samskiftisútgerð, trygdar- og ávaringarskipanir) eigur at hugsast inn.

Bygginevnd verður sett at áseta nærri lutfall millum ymisku búplássini og tal av røktaríbúðum saman við fakumboðum.

Lagt verður við hesum upp til at sjøtul verður settur á arbeiðið at fyrireika bygging av einum eldradepli í Kollafirði.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávísøkir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin, eindarleiðari í Heilsuhúsinum mæla til, í samband við ætlan um at byggja eldradepil í Kollafirði sum tað fyrsta at heita á byggi- og býarskipanarnevndina um at ávísa hóskandi grundøki til at byggja á, at sett verður bygginevnd og í hesum sambandi játta kr. 2 mio. á fíggjarætlanini fyri 2021 til byggiskrá og projektering, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Eldranevndin 08. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við Eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Einmælt samtykt.

## 224/20 Gigni : Framtíðar hølisviðurskifti í Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 16.01.2020 | 2/20 | 19/01965-2 |
| 2 Trivnaðarnevndin | 10.09.2020 | 28/20 | 19/01965-2 |
| 3 Mentamálanevndin | 19.10.2020 | 283/20 | 19/01965-2 |
| 4 Mentamálanevndin | 26.10.2020 | 291/20 | 19/01965-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 28.10.2020 | 281/20 | 19/01965-2 |
| 6 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 224/20 | 19/01965-2 |

**Upprunin til málið:**
Tørvur á hóskandi hølum til smábarnavirksemið hjá Gigni

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Kommunan hevur havt hølistørvin hjá Gigni viðvíkjandi smábarnavirkseminum í huga, tá høli eru tøk. Høli til Gigni vóru eisini partur av ætlanini at leiga og innrættta bygning á Hálsi til kommunulæknaviðtalur, men tann ætlanin datt niðurfyri.

Gigni hevur sent ynski teirra um hølir framyvir:

- Skrivstovupláss til 6 heilsufrøðingar við hvør sínum borði og pláss til arkiv
- Ves til starvsfólk
- Køk, sum skal nøkta tørvin til mammubólk og starvsfólk
- Nøktandi arbeiðsamboð, so sum amboð til undirvísing, teldur og skrivstovuútgerð

Høli til mammubólk:

- Rúm við borði til 12-15 persónar og gott gólvpláss til pinkubørn
- Skiftirúm
- Ves til vitjandi
- Pláss til sofu til m.a bróstageving
- Atgongd til køk

Høli til ambulant virksemi:

- Gigni ynskir at kunna bjóða mammum/familjum eitt stað, har tey kunnu venda sær til hvønn dag viðvíkjandi trupulleikum við bróstageving og øðrum trupulleikum í familjuni.

Leiðsla og heilsuføðingar undir sama taki:

- Ynskiligt er at fáa eitt somikið stórt høli at heilsufrøðingar, sum í dag eru knýttir at Kristnastovu, koma undir sama tak sum leiðslan á Gigni.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Lóg um fyribyrgjandi heilsuskipanir fyri børn og ung.

Sambært tulking frá Heilsumálaráðnum hevur kommuna skyldu at veita Gigni høli til smábarnavirksemið umframt viðtalurnar í skúlunum. Henda skylda fevnir tó ikki høli til leiðsluna og sjálva fyrisitingini í Gigni.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Hølistørvurin, sum lýstur omanfyri, krevur rættiliga rúmligan bygning. Aftrat skal hugsast góð atkomuviðurskifti fyri foreldur og barnavognar.

Í máli 19/01969 er nevndur møguleikin, at kommunulæknaviðtalurnar í Frúutrøð, sum nú standa tómar, verða innrættaðar til smábarnavirksemið hjá Gigni. Teknað er ikki uppá henda møguleika, men kann ein tilgongd saman við Gigni meta um, hvørt hetta kann gerast nøktandi loysn.

Skal bygningurin nýtast til hetta endamálið, krevjast broytingar í innrætting umframt nýtt innbúgv og nýggj útgerð. Kostnaðarmeting fyriliggur ikki. Neyðugt verður at útvega fígging til umbyggingina v.m.

Loysn í Frúutrøð skal taka hædd fyri ætlanini um íbúðarbygging í økinum.

Skal hugsast um varandi loysn til Gigni í t.d. nýbygging, so kundi í framskygdari loysn verið hugsað um sambygging við kommunalu barnatannrøktina (sí mál 15/03750).

Barnatannrøktin hevur eisini í mong víst á tørvin at fáa nýggj og tíðarhóskandi høli til tannrøktartænastuna. Bæði viðvíkjandi tannrøktini og Gigni er talan um heilsutænastur sbrt lóg, og ein slíkur bygningur kundi tí blivið ein heilsudepil til børn og ung.

Tannlæknastovan hevur víst á tøkt byggilendi (matr.nr. 917, Hans Andriasar gøta) millum nýggja Musikkskúlan og Skúlan á Fløtum sum vælegnað staðseting til tannrøktina. Økið er í byggisamtyktini skipað sum ítróttaøkið og krevur tí at verða broytt, skal hetta realiserast. Í langtíðaríløguætlanini er bygging av tannlæknamiðstøð sett at fáa ávísa fígging árið 2025.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
19/01969 Tøkir skúlabygningar 2019-2020

Ætlaða íbúðarverkætlanin í Frúutrøð kann hava týdning fyri, um talan kann gerast um varandi hølisloysn til Gigni á hesum stað.

15/03750 nýggj tannlæknastova

**Møgulig frávik/léttar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at kanna saman við Gigni, um hølini í Frúutrøð kunnu innrættast til smábarnavirksemið at leggja aftur fyri nevndina.

Mælt verður somuleiðis nevndini til at umrøða møguliga varandi loysn til Gigni í sambygging saman við barnatannrøktina sum lýst omanfyri.

**Trivnaðarnevndin 16. januar 2020:** Samtykt at umsitingin tekur upp samband við Gigni um hølisloysn á Frúutrøð.

**Ískoyti:**
Í skrivi dagfest 30. august 2020 ynskja nevndarlimirnir Bjørghild Djurhuus og Helena Dam á Neystabø málið á skrá, sí hjálagda skriv.

Fyrisitingin skal upplýsa, at málið er eisini til viðgerðar í mentamálanevndini, mál 19/01969 Tøkir skúlabygningar.

**Trivnaðarnevndin 10. september 2020:** Trivnaðarnevndin er samd um, at Gigni skal verða staðsett í øllum Gula skúla og heitir á fíggjarnevndina um at gera avtalu við Heilsutrygd um tað.

**Ískoyti:**
Í máli 19/01969 Tøkir skúlabygningar 2019-2020 samtykti mentamálanevndin 9. september 2020 "At fáa greinað um tað ber til at sameina virksemi hjá Gigni og Listgrafo í Gula skúla og fyritreytirnar fyri tí."

Umsitingin viðgerð málið og fer ráðgevi væntandi undir greiningar um mánaðarskiftið og er ætlanin at ein meting verður tøk í nov.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða samtyktina í trivnaðarnevndini.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2020:** Útsett.

**Ískoyti:**
Lýsti hølistørvurin hjá Gigni til smábarnavirksemið og til høvuðsskrivstovuna hjá Gigni er umleið 250 m². Hetta svarar til uml. tríggjar fjórðingar av bygninginum.

Mett verður, at til ber at innrætta henda hølistørvin hjá Gigni í Gula skúla soleiðis, at hin parturin av bygninginum, uml. 100 m², harav nakað er í kjallaranum, kann brúkast til annað hóskandi endamál.

Gigni hevur frammaundan skipað virksemi í øllum fólkaskúlunum. Mett verður, at Gigni eisini í størri mun kann brúka skúlahøli til partar av almenna virkseminum.

Umsitingin er í tilgongd at gera uppskot um innrætting og kostnað av tí, har Gigni hevur størra partin av bygninginum sum omanfyri nevnt. Tann parturin av hesum, sum er ætlað høvuðsskrivstovuni, verður at skipa í leigusáttmála við Heilsutrygd.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at Gigni verður staðsett í Gula skúla við uml. 250 m² ásett eftir neyvari ætlan um innrætting v.m.

**Mentamálanevndin 26. oktober 2020:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Halla Samuelsen og Heðin Mortensen, tekur undir við trivnaðarnevndini.

**Fíggjarnevndin 28. oktober 2020:** Ein meiriluti, Bergun Kass, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, taka undir við samtyktini hjá trivnaðarnevndini 19. september 2020. Málið verður lagt fyri aftur fíggjarnevndina við atliti til at gera leigusáttmála.

Ein minniluti, Annika Olsen og Gunvør Balle, taka undir við meirilutanum í mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, ongari ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddu: Annika Olsen og Gunvør Balle.

## 225/20 Lopgrøv í Fimi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 13.03.2019 | 88/19 | 19/00719-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 11.03.2020 | 67/20 | 19/00719-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 02.04.2020 | 98/20 | 19/00719-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 14.09.2020 | 243/20 | 19/00719-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 16.09.2020 | 222/20 | 19/00719-1 |
| 6 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 190/20 | 19/00719-1 |
| 7 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 225/20 | 19/00719-1 |

**Upprunin til málið:**
Áheitan frá foreldrum at elituíðkarum innan fimleik.

**Samandráttur**
Fimleikahøllin Fimi var tikin í nýtslu í 2011. Høllin er karmur um m.a. 2 hallir til estetiskan fimleik og eina stóra høll til amboðsfimleik. Høllin er sera nógv brúkt bæði av fimleikafeløgum, dagstovnum, skúlum og frítíðarskúlum. Hvønn dag koma hundraðtals fólk í høllina.

Innan fimleikin er stór menning og herundir eru nú tveir fimleikarar, ið eru á danska landsliðnum í amboðsfimleiki. Til tær greinirnar hoyrir lopgrøv, ið skal taka stoytin tá ymisk lop o.a. vera gjørd. Við verandi hentleika er vandi fyri skaðum, meðan ynski er um at fáa eina lopgrøv við skúmkubbum, ið betri tekur stoytin tá lopið verður. Meginavbjóðingin er, at slík loysn vil innibera stóran vanda fyri at børn søkka niður í kubbagrøvina, ið er umleið 2 metur djúp og tá kann vera stórur vandi fyri trygdarhendingum, tí annar persónur kann koma av óvart at leypa omaná persón í grøvini.

**Lýsing av málinum**
Ítróttaanlegg hevur kanna loysnir í dialogi við fimleikaumhvørvið og er komin eftir at besta loysnin er frá týska veitaranum Spieth Gymnastics umboðað í Føroyum av Eikini P/F. Sí hjálagt tekning av loysnini og avrit av tilboðnum, umframt myndir av økinum/høllini.
Uppsetingin sum sýnt í tekningini er mett til umleið 800 tkr. íroknað frakt og uppseting. Harumframt inniheldur tilboðið onnur amboð, ið er uppá tal at fáa endurnýggja komandi 2-3 árini fyri umleið somu upphædd.

Ítróttaanlegg metir at henda loysnin er nøktandi bæði funktionelt og við atliti til rakstur og trygd.

Fíggingin av hesi verkætlan rúmast ikki innanfyri raksturin av konto 5717 Ítróttaanlegg. Annar møguleiki er fígging av kontuni til Smærri ítróttaanlegg, sí mál 19/00144 Játtan í 2019 til smærri ítróttaanlegg.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ikki viðkomandi.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Sí skjøl.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Verður fíggingin játtað yvir kontu 5775 Smærri Ítróttaanlegg, er kontan so at siga uppbrúkt fyri árið.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ongir.

**Umhvørvisárin**
Avmarkað.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Málið er ikki viðgjørt enn við byggideildina.

**Skjøl**
Tilboð frá veitara.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið.

**Mentamálanevndin 13. mars 2019:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
TK hevur verið í samskifti við Føroya Fimleikasamband umframt Ljósið og Havnar Fimleikafelag um málið, umframt at onnur í umhvørvinum eisini hava gjørt vart við sjónarmið viðv. møguleikunum og trygdini kring fimleik í fremstu røð.

Ljósið og Havnar Fimleikafelag meta, at tað er mest hóskandi at útvega eina samansetta loysn, ið ger tað møguligt at venja amboðsfimleik í fremstu røð, umframt at annað virksemi kann vera í Fimi undir tryggum umstøðum. Hetta er treytað av neyðugari fígging á uml. 800 tkr. Um henda ikki er tøk í ár ella seinni, verður mett mest hóskandi at bíða við broytingum í viðurskiftunum. Hetta primert fyri framhaldandi at geva breiða virkseminum í Fimi hóskandi umstøður.

Fígging er ikki tøk til endamálið í 2020, men kundi verið umhugsað at sett pening av í fíggjarætlanini fyri 2021.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til, um málið skal fyrireikast víðari og um fígging skal setast av til eina serstaka tekniska loysn til lopgrøvina í Fimi í fíggjarætlanini fyri 2021.

**Mentamálanevndin 11. mars 2020:** Útsett.

**Ískoyti:**
TK hevur nú fingið skrivligt tilmæli frá Føroya fimleikasamband, ið hevur viðgjørt málið við Havnar fimleikafelag og fimleikafelagið Ljósið.

*"Tilmæli til nýggja grøv í FIMI, Tórshavn.*
*Føroya Fimleikasamband, Fimleikafelagið Ljósið og Havnar Fimleikafelag hava í felag gjørt eitt tilmæli til nýggju grøvina í FIMI.*

*Í samband við, at støðið hjá okkara bestu fimleikarum í Føroyum er hækkað, er tørvurin til fimleikaútgerð í FIMI eisini broyttur. Vit ynskja tí at fáa eina opna skúm grøv við endan á hestinum. Grøvin skal nýtast av kappingaríðkarum í øllum aldursbólkum.*

*Vit meta, at FIMI er fyri fimleikin. Tí er ein rúmlig loysn sjálvandi vælkomin, so at breiddaríðkarar eisini kunnu nýta grøvina, og møguleiki eisini verður at dekka grøvina til í øðrum venjingarhøpi.*

*Í mun til trygdina og viðlíkahald av núverandi og komandi útgerð, ynskja vit at veita frálæru hvussu amboðini verða brúkt. Frálæran er m.a. ætlað til dagstovnar, skúlar og venjarar sum nýta FIMI. Á hendan hátt verður farið betur við amboðnum, samstundis sum tey verða brúkt rætt og trygdin er í lagið.*

*Vit hava eina 10 ára ætlan, har vit ynskja støðugt at lyfta støðið á landsliðnum hjá kvinnum og monnum í amboðsfimleiki. Vónandi verða Oyggjaleikir í Føroyum í 2029, har vit kunnu luttaka við einum framúrskarandi liði, sum hevur fingið íblástur frá okkara núverandi íðkarum, sum í ár til hvørja kapping hava skrivað fimleikasøgu. Somu íðkarar hava í ár møguleika at luttaka til altjóða kappingar umvegis danska landsliðið, og grøvin er ein liður í hesum spennandi málsetningi."*

Sí hjálagt tekning yvir amboðshøllina í Fimi, ið sýnir hvat ymisku amboðini v.m. eru.

Ítróttaanlegg tekur undir við tilmælinum og mælir til at útvega eina loysn, ið kann uppfylla ynskini hjá fimleikaumhvørvinum. Kostnaðarmetingin er framvegis umleið tann sama sum nevnd í málinum.

Ítróttaanlegg fer eisini at leggja eina ætlan saman við fimleikaumhvørvinum, ið betri tryggjar frálæru til dagstovnar og skúlar um munagóða og trygga nýtslu av amboðshøllini í Fimi.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til, um málið skal fyrireikast víðari og um fígging skal setast av til eina serstaka tekniska loysn til lopgrøvina í Fimi í fíggjarætlanini fyri 2021.

**Mentamálanevndin 02. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við at arbeiða víðari við at gera eina lopgrøv og at fíggingin verður tikin upp í sambandi við fíggjarætlanina 2021.

**Ískoyti**:
Ljósið og Havnar Fimleikafelag meta, at tað er mest hóskandi at útvega eina samansetta loysn, ið ger tað møguligt at venja amboðsfimleik í fremstu røð, umframt at annað fjølbroytt virksemi kann vera í Fimi undir tryggum umstøðum. Hesum tekur Ítróttaanlegg eisini undir við.

At útvega slíka loysn verður mett at kostað uml. kr. 1 mió.

**Tilmæli**
Kommunustjórin, trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at útvega samansetta loysn við nýggjari lopgrøv í FIMI og til endamálið at játta kr. 500.000 av kontu 5310 Mentanartiltøk og kr. 500.000 av kontu 6275 Fríðkan av býnum (projektkontu L62035 vetrarfriðing) til kontu 5717 Ítróttaanlegg.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 14. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. september 2020:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð. Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

## 226/20 Veiðifelagið Byrsumúli : Áheitan um at fáa samstarv í lag við kommununa fyri at betra um viðurskiftini hjá skjótingini í høvuðsstaðnum.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 03.05.2017 | 108/17 | 15/03761-9 |
| 2 Mentamálanevndin | 15.06.2017 | 162/17 | 15/03761-9 |
| 3 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 234/17 | 15/03761-9 |
| 4 Mentamálanevndin | 29.11.2017 | 310/17 | 15/03761-9 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.04.2018 | 85/18 | 15/03761-9 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.04.2018 | 104/18 | 15/03761-9 |
| 7 Mentamálanevndin | 14.05.2018 | 159/18 | 15/03761-9 |
| 8 Mentamálanevndin | 06.06.2018 | 203/18 | 15/03761-9 |
| 9 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 178/18 | 15/03761-9 |
| 10 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 152/18 | 15/03761-9 |
| 11 Mentamálanevndin | 12.09.2018 | 270/18 | 15/03761-9 |
| 12 Mentamálanevndin | 16.01.2019 | 31/19 | 15/03761-9 |
| 13 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.02.2019 | 26/19 | 15/03761-9 |
| 14 Tekniska nevnd | 12.03.2019 | 18/19 | 15/03761-9 |
| 15 Mentamálanevndin | 13.03.2019 | 98/19 | 15/03761-9 |
| 16 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 01.04.2019 | 13/19 | 15/03761-9 |
| 17 Mentamálanevndin | 08.05.2019 | 143/19 | 15/03761-9 |
| 18 Mentamálanevndin | 22.10.2019 | 278/19 | 15/03761-9 |
| 19 Fíggjarnevndin | 13.11.2019 | 306/19 | 15/03761-9 |
| 20 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 268/19 | 15/03761-9 |
| 21 Mentamálanevndin | 05.02.2020 | 42/20 | 15/03761-9 |
| 22 Fíggjarnevndin | 12.02.2020 | 43/20 | 15/03761-9 |
| 23 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 35/20 | 15/03761-9 |
| 24 Mentamálanevndin | 02.04.2020 | 96/20 | 15/03761-9 |
| 25 Mentamálanevndin | 10.06.2020 | 174/20 | 15/03761-9 |
| 26 Fíggjarnevndin | 17.06.2020 | 169/20 | 15/03761-9 |
| 27 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 143/20 | 15/03761-9 |
| 28 Mentamálanevndin | 09.09.2020 | 226/20 | 15/03761-9 |
| 29 Mentamálanevndin | 26.10.2020 | 294/20 | 15/03761-9 |
| 30 Byggi- og býarskipanarnevndin | | | 15/03761-9 |
| 31 Fíggjarnevndin | 28.10.2020 | 284/20 | 15/03761-9 |
| 32 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 226/20 | 15/03761-9 |
| 33 Mentamálanevndin | 28.10.2020 | 296/20 | 15/03761-9 |

**Málslýsing:**
Veiðifelagið Byrsumúli sendi í 2015 áheitan um at fáa samstarv í lag við kommununa um at betra um viðurskiftini hjá skjótingini í høvuðsstaðnum (sí hjáløgd skjøl). Síðani hevur verið nakað av samskifti millum kommununa og felagið.

4. apríl 2017 sendir felagið umsókn um stuðul til projektering av eini verkætlan at dagføra skjótibreytirnar.

Talan er um tilboð frá Sp/f HMP Consult

"Prísurin fyri at gera eitt projekt er 450.000,- umframt MVG.
Við í hesum er:

- Myndugleikaprojekt og projekt klárt til útbjóðing.
-

Í hesum er íroknað:

- Lendisprojekt við vegum og gøtum.
- Dekkgrót fram við fjørðuni.

Skal viðmerkja, at vanliga er neyðugt at gera simuleringar á Hydraulisk institut í DK, fyri at áseta stødd á dekkgroti og hvussu stórur verjugarðurin skal gerast.
Hettar er so ikki íroknað prísin og kostar hettar neyvan undir 100.000,- at fáa gjørt. Tað kunnu vit so venda aftur til, kanska "overkill" frá mínari síðu.

- Innbyggja skýli, smærri bygningar o.t. í samb. við skjótivøllin.
- Ljós fram við vegum og gøtum.
- Uppmáting av lendinum.
- Visualisering av verkætlanini.

Tit senda okkum mát og plasering av skýlum, lutum o.t.
Er nakað eg havi gloymt, so hoyri eg frá tykkum. Eg hugsaði at tit skuldu hava eina samlaða loysn frá okkum."

Í sambandi við at skjótibreytin bleiv gjørd í farnu øld og síðani hevur verið drúgt samskifti við ymiskar myndugleikar v.m. um viðurskiftini har.

Møgulig útbygging vil kunna viðføra at ymisk viðurskifti skulu takast uppaftur, herundir:

- atlit til friðing sbrt. lógini um náttúrufriðing: http://www.logir.fo/Logtingslog/48-fra-09-07-1970-um-natturufriding-sum-seinast-broytt-vid-logtingslog-nr-110-fra-29
- atlit til landsvegalógina sbrt. lógini um landsvegir: http://www.logir.fo/Logtingslog/51-fra-25-07-1972-um-landsvegir-sum-seinast-broytt-vid-logtingslog-nr-18-fra-8
- atlit til lógina um umhvørvisvernd: http://www.logir.fo/Logtingslog/134-fra-29-10-1988-um-umhvorvisvernd-sum-seinast-broytt-vid-logtingslog-nr-128-fra-22

Í fall farið verður undir hesa tilgongd og herundir projektering er hóskandi at gera eina nærri avtalu við felagið um innihald og treytir í verkætlanini.
Samstundis er ivasamt um tað er skilagott at gera eina projektering áðrenn neyvari loyvi fyriliggja. Í sofall má eini meiri principiell tilgongd vera fyrst. Spurningurin er so eisini um tað er felagið ella kommunan sum skal standa fyri tí?

Ongin peningur avsettur til endamálið Konta 5365 - Stuðul til ítrótt rúmar ikki slíka játtan í verandi støðu.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:
a). at taka principiella støðu til um farast skal víðari við umsóknini
b). at taka støðu til møguliga raðfesting á fíggjarætlan 2018 ella seinni ella á eykajáttan.

**Mentamálanevndin 03. mai 2017:** Ein minniluti, Gunvør Balle og Marin Katrina Frýdal, tekur ikki støðu til tilmælini, men vil taka málið upp aftur á seinni fundi.

Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen, tekur undir við tilmælunum.

**Tilmæli:**
Til tess at taka málið upp aftur mæla trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin til, at umsitingin saman við felagnum nágreinar verkætlanina við Sandvíkir, bæði í mun til neyðug myndugleikakrøv og verkseting sum grundarlag fyri seinni støðutakan til projektering, útboð og fígging.

**Mentamálanevndin 15. juni 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Í summar hevur umsitingin havt samskifti við Býrsumúla um málið. Mett verður at mest hóskandi er at fyrireikingarnar av verkætlanini verða í tveimum stigum. Í fyrstu atløgu at fáa ment verkætlanina fram til sonevnt skipanaruppskotsstig og við støði í tí fáa til vega dagførdar góðkenningar, áðrenn farið verður undir detailprojektering og myndugleikaverkætlan. Leysliga mett kann eitt slíkt fáast til vega fyri 150 tkr.

Í samskiftinum hevur kommunan eisini fingið avrit av góðkenningum fyri verandi skjótianlegg t.e.:
- góðkenning frá yvirfriðingarnevndini
- skjótiloyvi frá politinum
- umhvørvisgóðkenning

Viðv. viðurskifti í mun til lógina um landsvegir, so er tað samskifti ikki endaliga avklárað.

Ítøkiliga er hugsanin at gera eina samstarvsavtalu við Byrsumúla og ráðgevarafelag um menning av verkætlanini. Uppskot til avtalu kann ætlandi verða klárt til nevndarfundin í oktober. Tá tann tilgongdin er komin á mál ber til at projektera verkætlanina lidna og bjóða hana út.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at fáa heimild at gera samstarvsavtalu við Byrsumúla og ráðgevarafelag um menning av skipanaruppskoti fíggjað av rakstri kontu xxx.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Útsett.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Samtykt at umsitingin fer undir samskifti við Byrsumúla og aðrar áhugapartar innan skjóting fyri at kanna aðra møguliga staðseting og felags loysn við skjótibreyt. Málið verður beint í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Við støði í samtyktini í mentamálanevndini frá 29. november 2017, varð fundur fyriskipaður við Byrsumúla, Veiði- og skjótifelagið, Ark. Kommando og løgregluna, har feløgini/eindirnar vóru biðin um at greiða frá sínum virksemi og staðsetingum. Umrøtt varð, um til ber at samantvinna fleiri áhugapartar innan skjóting á einum stað.

Tørvurin hjá ymsu áhugapørtunum innan skjóting er ymiskur. Byrsumúli hevur aðrar fortreytir enn hinir partarnir, sum heilt avgjørt kundu verið saman um eina felags loysn við skjótibreyt. Millum annað hevur rætningurin og sólargangurin stóran týdning fyri Byrsumúla, meðan hesi ongan týdning hava fyri hinar partarnar. Í verandi støðu er ikki nøkur eyðsæð staðseting eyðmerkt ella uppskot komin um framtíðar staðsetingar, har hesi feløgini/eindirnar kunnu savnast á einum stað.

Um hugt verður eftir økinum, matr. 139e, har Byrsumúli heldur til í dag, so hóskar staðsetingin avbera væl til teirra virksemi, og stuðlar økið undir fortreytunum, sum skulu til fyri at skapa góðar karmar til skjótingina hjá Byrsumúla. Tó skal hædd takast fyri, at breytirnar verða góðkendar av altjóða serfrøðingum fyri at skipa

altjóða kappingar. Umframt at øll trygdarkrøv, fráleika- og fráboðanarkrøv verða lokin í mun til almenna ferðslu á landi og sigling fram við landi. Í Danmark er tað ”Politiets og Justitsministeriets skydebane inspektør”, sum tekur sær av slíkum málum.

Óljóð- og dálkingarstøðan eigur eisini verða endurskoðað aftaná seinastu umhvørvisgóðkenning, ið var í 2006. Skjótibreytir eru kap. 5 virkir, ið Umhvørvisstovan hjá landinum varðar av. Virksemið er broytt, har skotið verður sunnu- og halgidagar. Virksemið í økinum hevur aftaná 30 ár sett síni neiligu merki á annars serstaka vakra lendið í Sandvíkum.

Í dag liggur økið á markinum til útjaðaran av Havnini, og er økið náttúruvakurt við fjøru og fríum útsýni út á sjógv. Ídnaðarøkið á Hjalla er nærmasti granni og ber økið brá av nógvari ferðslu. Í nærmastu framtíð, tá tunnilin verður liðugur, fer økið at liggja mitt í einum knútapunkti, ið verður bindilið millum oyggjarnar við øktari ferðslu. Tá hugsað verður um rekreativ øki, so leita fólk vanliga burtur frá ferðslu og óljóði, tískil er í mun til býarskipanarlig viðurskifti einki til hindurs fyri, at Byrsumúli heldur fram á verandi øki. Umsitingin mælir tó til at fáa altjóða grundreglur og serkønan at meta um staðsetingina.

Byrsumúli hevur fleiri vitjandi, ið øll fáa ágóðan av hesum náttúruvakra øki, men samanborið við almenningin er talið á borgarum lítið í mun til um hetta lendið lá sum fríøki til almenningin.

Harafturat er ynski frá umsitingini, at Byrsumúli ikki ger seg inn á rættina, ið liggur tætt upp at ynskta matrikli. Rættin er áleið túsund ára gomul, men verður ikki brúkt longur orsakað av skjótivirkseminum og øðrum, hegning o.s.fr. Men rættin er tó eitt mentanar- og siðsøguligt minni, ið er vert at varðveita.

Ynski er um at atlit verða tikin til fjøru, og at farið verður væl um náttúruna sum heild, bæði í sambandi við dálking og ovurnýtslu, men náttúruvakurleikin er ikki tann sami aftaná 30 ára virksemi, økið treingir til at ruddast og hampast sum heild. Stranga eftirlitið, sum sigst vera, er ikki sjónligt.

Onnur staðseting er á Glyvursnesi, at gera skjótibreyt í grótbrotinum á Glyvursnesi ella í økinum sunnanfyri, har er vítt lendi burturfrá fjølbygdum øki. Men henda staðseting er partur av heildaruppskotinum í sambandi við gerð av golfvølli á Glyvursnesi.

Treytirnar, sambært umhvørvisgóðkenning í máli nr. 61010-200300445-36 (skjal 1), *Góðkenningartreytir frá 4. juli 2006, frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni*, eiga at dagførast, og eftirkannast, um treytirnar eru hildnar seinastu 22 árini. Virksemið er munandi broytt hesi árini, t.d. er nógv tons av stálhøglum skotin út á økið.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til, at Byrsumúli heldur fram á økinum, har teir eru í dag, at øll loyvi verða dagførd, umhvørvisgóðkenning verður framd og altjóða ásetingar til kappingar verða hildnar og at beina málið aftur í mentamálanevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2018:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. apríl 2018:** Nevndin mælir til at Byrsumúli heldur fram á økinum, har teir eru í dag**.**

**Ískoyti**:
Síðani fundin í Byggi- og býarskipanarnevndini er komið uppskot frá Politinum og Arktiskt kommando um staðsetingar av skjótibreyt til teirra tørv. Sí hjálagt skriv.

Á løgukonto 5775 er játtan á 1.500 tkr, ið er ætlað til fyrireikingar v.m. í sambandi við ymiskar verkætlanir innan ítróttaanlegg, herundir skjóting. Kontan er ikki fult disponerað enn.

Mál um endurnýggjan av leigusáttmála við Byrsumúla um økið verður lagt fyri fíggjarnevndina í næstum.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at geva umsitingini heimild til at gera uppskot til samstarvsavtalu við Byrsumúla og ráðgevarafelag um menning av skipanaruppskoti og koma aftur í nevnd við einum uppskoti.

**Mentamálanevndin 14. mai 2018:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Sambært umbøn frá nevndini, kemur umboð fyri nevndina í Byrsumúla á fundin at greiða frá um virksemi og um útbyggingarætlanir felagsins.

**Mentamálanevndin 06. juni 2018:** Umboð fyri nevndina í Byrsumúla greiddi frá virkseminum og um útbyggingarætlanir felagsins.

**Ískoyti:**
Nýggjur 25 ára leigusáttmálið verður ætlandi undirskrivaður. Sí skjal 15/03761-32.

Avtalað er, at kommunan letur gera seyðasmogu, og annars letur tilfarð til hegn og pelar v.m. leystliga mettur kostnaður í alt kr. 87.000,00 Upphæddin verður at rindað av konto 6275 ( vetrarfriðing ) Sí útrokning skjal 15/03761-42

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin í stjórnarskrivstovuni mæla til at gera nýggjan 25 ára leigusáttmála við leigaran, sí skjal 15/03761-32, og at rinda gerð av seyðasmogu umframt tilfarð til hegn,pelar v.m. áleið kr. 87.000,00 av konto 6275 ( Vetrarfriðing )

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í økinum í Sandvíkum eru atlit at taka til umhvørvi, frítíðarvirksemi, seyðahald o.a. Felagið hevur í dag nógv stríð av upprudding sambært galdandi umhvørvisgóðkenning. Sum liður í at menna verkætlanina og tryggja neyðug atlit, verður mett hóskandi saman við felagnum at fáa landslagsarkitekt at gera uppskot um skipan av øki og lendi. Mett verður neyðugt at seta kr. 100.000 av til endamálið av játtan ætla til smærri ítróttarverkætlanir, sí mál 18/03320.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við ætlanini og vísa til mál 18/03320 viðvikjandi játtan.

**Mentamálanevndin 12. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og tryggja, at atlit verða tikin til umhvørvið, fjøruna, gomlu rættina og møguleikan fyri almennum uppihaldi.

**Ískoyti:**
Uppskot um skipan av øki og lendi er nú tókt, sí hjáløgdu fílu, umframt at limirnir fáa handaða mappu á fundinum.

Málið kemur fyri í nevnd 13. februar 2019.

**Mentamálanevndin og byggi- og býarskipanarnevndin 16. januar 2019:** Limirnir fingu handað tilfar.

**Ískoyti:**
**Samandráttur av skipanaruppskotinum**
Skipanaruppskotið fevnir um uppskot til nýtt skjótianlegg í Sandvíkum hjá Veiðufelagnum Byrsumúli. Tað hevur verið týdningarmikið í sambandi við gerð av skipanaruppskotinum, at anleggið (skjótibreytin við

tilhoyrandi viðurskiftum) hóskar inn í lendið og náttúruna kring økið. Harumframt hevur tað verið týdningarmikið, at nýggja anleggið er vakurt á at líta, er vælvirkandi og nútímans við fleiri virkismøguleikum og skjótibreytum.

Tað sum eyðmerkir uppskotið er, at serlig atlit eru tikið fyri uppruddingar arbeiðinum í sambandi við skjóting. Breytirnar vera fluttar longur frá fjøruni, lendið verður drenað og slættað so gjørligt verður at skipa ruddingina betur.

Ein vallgarður er teknaður at liggja á markinum millum anleggið og fjøruna, hann skal forða splintrum frá leirdúgvunum í at enda í fjøruni. Somuleiðis skal vallgarðurin tryggja, at tað framvegis verður atkomuligt hjá almenninginum til fjøruna. Men upplýsast skal, at tá anleggið er í brúk, tá verður ikki møguligt at nýta fjøruna til uppihald.

Anleggið skal vera fyri øll, tí eru atkomuviðurskiftini fyri rørslutarnað raðfest høgt. Hetta verður gjørt við at ein gøta kemur at leggja seg gjøgnum lendið og virka sum bindiligur millum felagshúsið við yvirdekkaðum hátúni, áskoðaraskýlið og skjótistøðini.

Í dag hevur Byrsumúli eitt felagshús, sum er gjørt av tveimum bingjum, men í skipanaruppskotinum er lagt upp til, at eitt felagshús verður gjørt við øllum hentleikum, so sum hølum/umstøðum til innivist, smærri móttøkur, veitslur, vesir o.a. hugsanin er, at sjálvt felagshúsið er uppbygt sera einkult, bygningsgrindin verður gjørd í pørtum, ið skjótt kunnu setast upp.

Yvirhøvur er tilfarsvalið sera einkult við timbri og flagtekju, sum hóskar væl til umhvørvið og náttúruna.

Vallgarðurin og ymisk skot á gøtuni vera prýdd við stórum gróti og vøkstri, ið somuleiðis hóskar væl til lendið og umhvørvið.

Aftrat hesum kemur ein eyrvegur at liggja aftanfyri anleggið, ið skal nýtast í sambandi við rakstur. Hesin skal flætta natúrliga inn í umhvørvið. Framvið eyrvegnum verður grót og runnar, hjálpirót og onnur planta, ið hóskar til umhvørvið.

**Góðkenning til altjóða kappingar:**
Fyrispurningar hava verið um viðurskiftini viðvíkjandi góðkenning til altjóða kappingar. Veiðifelagið Byrsumúli hevur greitt frá hesum viðurskiftunum í skrivið til kommuna,
*sí skjal Svar vidvíkjandi krøvum til skjótibreytir.*

Fyrst er at viðmerkja, at eingin altjóða felagsskapur góðkennir nakra skjótibreyt yvirhøvur, hvørki her ella aðra staðni. Góðkenningarnar koma frá lokalum myndugleikum í mun til teirra lógarkrøv um trygd og umhvørvi v.m., meðan ítróttarligu reglurnar um kappingarnar eru ásettar av ISSF.

<u>Ítróttarlig krøv</u>: Ásetingar fyri mát/stødd á breyt, longd/ferð og vinklar, hvussu dúgvurnar skulu flúgva o.s.fr. eru at finna í kappingarreglunum frá ISSF. Sí skjal *ISSF reglur um skjótibreytir.* Skipanaruppskotið er í tráð við hesar ásetingarnar. Harumframt vendir økið rætt í mun til ljósviðurskiftini, sum ISSF mælir til, og veðurlagið á staðnum er tað besta, sum felagið kann ynskja sær.

Tað er kappingarleiðslan til einstøku kappingina, sum góðkennir ''breytina'', og tað snýr seg um, hvørt kastimaskinurnar eru innstillaðar rætt í mun til ítróttargreinina, til dømis OL-trap og OL-skeet.

Tá tað kemur til umstøðurnar rundan um breytina; felagshús, vesir o.a. er ikki talan um ítróttarlig krøv, tó sum liður í verkætlanin skulu hesi viðurskiftir; felagshús, vesir o.a. vera á nøktandi støði eftir BK17. Harumframt er tað ynski hjá kommununi, at nøktandi athølir/umstøður eru funktionel til virksemið.

<u>Trygdarkrøv</u>: Tað er løgreglan, sum góðkennir trygdina, her er talan um trygdarfrástøðu og hvønn veg skotið verður. Verandi breyt er góðkend, og skal nýggja breytin somuleiðis góðkennast, tá hendan er liðug.

Umhvørviskrøv: Umhvørvisstovan umsitur Umhvørvisgóðkenningina fyri virksemið á breytini. Somuleiðis er verandi breyt góðkend. Skipanaruppskotið leggur upp til, at virksemið tekur enn størri hædd fyri umhvørvinum.

Nevnast skal at Veiðifelagið Byrsumúli hevur sett seg í samband við Danmarks Jægerforbund. Og fingið tey at meta um skipanaruppskortið viðvíkjandi góðkenning til altjóða kappingar. Danmarks Jægerforbund er av tí fatan, at nýggja skjótibreytin lkur allar treytir, ið eru galdandi til kappingar í OL-trap og OL-skeet. Sí skjal *190204 DJ skrivelse/MLMAL.*

Umsitingin hevur sett seg í samband við Skjótisamband Føroya við fyrispurning um viðurskiftini viðvíkjandi góðkenning til altjóða kappingar. Skjótisamband Føroya hevur kanna skipanaruppskoti og greitt frá í skrivið til kommuna, sí skjal *Svar til Tórshavnar kommunu.*

Sagt verður at uppskotið um nýggja breyt lýkur allar treytir til heimligar kappingar eins væl og hon lýkur treytirnar til einar komandi oyggjaleikir. Breytin kemur sjalvsagt ongantíð at rúma heimmeistarakappingar ella Olympisku leikunum, men við einari OL-trap breyt og tveimum OL-skeet breytum, kunnu flest allar aljtóða og millumtjóðakappingar um okkara leiðir haldast her.

Verður hugt at møguligum framtíðarkrøvum til kappingar, so bendir einki á at møgulig broyting í reglunum fyri kappingargreinarnar skuldi viðført, at broytingar skulu gerast á sjálva breytina, so hon ikki kann nýtast longur. Áður, tá ið broytingar hava verið so hevur tað snúð seg um ferð og vinklar á dúgvunum viðvikjandi kastimaskinunum og ikki sjálvari breytini.

Í sambandi við oyggjaleikir so við breytin kunna rúma, OL.trap, Automatic Ball Trap og OL-skeet, eins væl og ovara skeet breytin í uppskotinum kann brúkast til Compak-Sporting-breyt. Til tað síðst krevst tó, at fleiri kastimaskinur verða settar upp, men hetta rúmar breytin væl.

Sjótisamband Føroya metir tí, at uppskotið uppá nýggja breyt vil tryggja skjótiítróttin í Føroyum í mong ár.

**Átøk í verkætlanini:**
Skipanaruppskotið leggur upp til, at anleggið kann skipast í pørtum. Ynskiligt hjá felagnum er, at skjótibreytirnar verða gjørdar sum tað fyrsta, soleiðis at uppruddingin gerst meiri lagalig. Síðani skulu vollarnir gerast, umframt gøtur og felagshús.

**Víðari fyrireikingar**
Í sambandi við viðgerð í mentamálanevndini kemur umsitingin at gera ítøkiligt tilmæli um, hvussu farast kann fram í mun til møguliga víðari fyrireikingar, herundir projektering, samstarvið við felagið, kostnaðarmetingar, fígging v.m.

**Skjøl:**
- *Journal nr. 15-03761-55 BYRSUMÚLI SKIPANARUPPSKOT DES.2018*
- *Journal nr. 15-03761-58 Svar vidvíkjandi krøvum til skjótibreytir*
- *Journal nr. 15-03761-58 ISSF reglur um skjótibreytir*
- *Journal nr. 15-03761-60 190204 DJ skrivelse/MLMAL*
- *Journal nr. 15/03761-61 Svar til Tórshavnar kommunu*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla byggi- og býarskipanarnevndini til, at skipanaruppskotið verður samtykt sum ætlan fyri økið/virksemið, at øll loyvi og myndugleikakrøv verða dagførd, nú skjótibreytin verður endurnýggjað, og at beina málið í mentamálanevndina, náttúru- og umhvørvisnevndina, teknisku nevnd, fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. februar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Við støði í skipanaruppskotinum er nú klárt at fyrireika verkætlanina víðari saman við Veiðifelagnum Byrsumúla. Fyrsta stig er at fáa í lag avtalu við ráðgevarafelag um projektering av lendisarbeiðinum.

Til ber at projektera verkætlanina í einum ella í stigum, har sjálvt lendisarbeiðið eisini tekur atlit til, at felagið kann halda fram við venjingum í arbeiðstíðarskeiðnum. Á fundinum verður greitt frá viðurskiftum kring kostnað vm. í sambandi við projektering av slíkum anleggi/lendi og bygningum.

Mett verður hóskandi at seta av 300 tkr. í fyrstu atløgu til víðari tilgongdina. Sí tilmæli í máli 19/00144 Játtan í 2019 til smærri ítróttaanlegg.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at samtykkja, at farið verður í tilgongd at bjóða út ráðgeving um projektering av skjótibreytini at leggja aftur fyri nevndina.

**Tekniska nevnd 12. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum til byggi- og býarskipanarnevndina 13. februar 2019.

**Mentamálanevndin 13. mars 2019:** Samtykt at gera samstarvsavtalu við Veiðifelagið Byrsumúla um víðarimenning av verkætlanini og at bjóða út ráðgeving um projektering av skjótibreytini, at leggja aftur fyri nevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 01. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at samstarvsavtalan eisini umfatar regluliga rudding.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur verið í innleiðandi samráðingum við Veiðifelagið Byrsumúla um samstarvsaavtalu.

Umsitingin hevur eisini mett um, hvør leistur er tann frægasti í mun til at fáa projektera og útint verkætlanina. Mett verður at mest átroðkandi er at fáa drenað skjótiøkið og fáa gjørt vøllgarðarnar. Í fyrsta lagi tí at tað verður tað sum gerð mest mun at vera framt fyrst og í øðrum lagi at avmarkað kostnaðin til hetta fyrsta verkætlanarstigið.

Viðv. framferðarhátti kann veljast millum:

a). Projektera verkætlanina og síðani fara í útboð
Fyrimunurin er at ymsar møguligar óvissur vera færri og tað fæst eitt gott tilfar til grund fyri útboðnum av lendisarbeiðinum.

b). Bjóða arbeiðið út sum eina heildararbeiðstøku
Høvuðsfyrimunurin er at arbeiðið helst verður lættari at laga til og innan fyri ásettan kostnaðarrammu. Tó er neyðugt við nakað av nøgdarmetinginum áðrenn farið verður undir útboð so tað er nøkulunda greitt hvørjar nøgdir talan er um so skulu flytast, herundir gera nakrar kanningar viðv. dýpinum av tilfari í økinum. Hetta er mett til nakrar 10 tkr. og kann dekkast av kontu 5365 Stuðul til løgur.

Kostnaðarmeting
Í verandi støðu er ikki nøkur dagført kostnaðarmeting. Talan er um verkætlan, ið helst kostar fleiri mio.kr. Felagið bjóðar seg fram til at gera arbeiðir við bygningar, pallar o.a. meðan lendisarbeiðið sum heild krevur arbeiðstakara við røttu amboðunum og royndunum.

Fígging
Byrsumúli hevur ikki nakra fíggjarogn av týdningi og sum munar í hesum føri. Kommunan hevur ikki tøka fígging til verkætlanina í ár og tí má støða takast til um fígging skal setast av í løguætlanini fyri 2020 ella 2021.

Felagið bjóðar seg hinvegin at gera sjálvboðið arbeiðið innan onnur viðurskifti enn grót og moldarbeiðið og kann tað so innganga sum egininnsatsur.

Skotið verður upp at felagið og TK í næstum fara undir fyrireikingar til at søkja uttanhýsis stuðul til verkætlanina ella partar av henni.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til:

a). Um verkætlanin í fyrsta umfarið verður avmarkað til at drena skjótiøkið og gera vøllgarðar.

b). Um antin at projektera verkætlanina og síðani fara í útboð ella at bjóða arbeiðið út sum heildararbeiðstøku.

c). Við støði í valinum av pkt. a og b. at fara undir endaligar samráðingar um eina samstarvsavtalu at leggja fyri nevndina aftur.

**Mentamálanevndin 08. mai 2019:** Samtykt ikki at taka undir við tilmælinum. Nevndin staðfestir, at játtan ikki er tøk í ár og at málið verður tikið upp í sambandi við fíggjarætlanar-arbeiðið og langtíðarløguætlanina.

**Ískoyti:**
Við atliti til at fáa betri grundarlag fyri møguligari verkætlan og útbjóðing verður mett hóskandi at fáa gjørt ymiskar fyrireikingar, herundir:

Við støði í skipanaruppskotinum at:
1. Søkja um loyvi hjá friðingarmyndugleikunum til verkætlanina
2. Søkja um nýggja umhvørvisgóðkenning

Umframt:
3. Fáa gjørt lendis- og jørðkanningar, uppmátingar og avseting av verkætlanarøkinum fyri m.a. at fáa metingar um nøgdir av tilfari, ið skal flytast og útvegast og herundir kostnaðarmeting.
4. Fáa gjørt samstarvsavtalu við Byrsumúla um verkætlanina, herundir egininnsatsin hjá Byrsumúla og ætlan um at søkja um uttanhýsis fígging.

Fyribils verður mett, at pkt. 3 kostar 100 tkr. Mett verður at fígging til endamálið kann útvegast av upphæddini, ið var játtað til konto 5717 Ítróttaanlegg til fyribils bingjuloysn við Hoyvíksvøll (mál 18/00009), ein verkætlanin, ið ikki er útlit fyri at útinna í ár. Ætlanin er at fáa ráðgeva til kanningarnar.

Tíðarætlan:
Mett verður, at tilgongdin viðv. pkt. 1-4 tekur nakrar mánaðir og at eitt útboð helst kann vera í 2020, treytað av neyðugum loyvum og fígging.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á verkætlanardeildini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at fáa til vega uppskot til ráðgevaraavtalu um fyrireikingar til at bjóða út arbeiðstøku uppá drening, planering og gerð av vøllgarðum til nýggja skjótibreyt, herundir neyðug loyvi.

**Mentamálanevndin 22. oktober 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Jákup Dam var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 13. november 2019:** Samtykt taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Eftir viðgerðina seinast er fíggjarætlanin fyri 2020 samtykt, umframt at tað í langtíðaríløguætlanini er lagt upp til fígging til skjótibreyt hjá Byrsumúla í 2021 og 2022.

Á løgukontu 5775 eru fyri fíggjarárið 2020 játtaðar 3.000 tkr. til skjótibreyt, t.e. játtanin skal brúkast til at byggja skjótibreyt, herímillum drening og vøllgarðar at verja fjøruna, umframt ætlaðar 4.000 tkr. til 2021 og 1.000 tkr. til 2022.

Við hesum ber sannlíkt til at fara undir at fyrireika og byggja nýggja skjótibreyt í Sandvíkum, ið nýtast kann til venjing, fráløru og altjóða kappingar.

Ætlanin er at gera avtalu við felagið, ið gjørdi skitsuprojektið at standa fyri liðugt projektering og útboðnum av verkætlanini.

Tilgongdin við at fáa neyðug loyvi til vega og tekur væntandi nakrar mánaðir.

Málið er at arbeiðið kann vera klárt at bjóða út í vár, tá neyðug loyvi væntandi eru fingin til vega, og fara undir útinning í summar. Byggiarbeiðið í lendinum væntast at ganga inn í 2021.

Forkanningar viðv. lendinum byrja í næstum og er dialogur í gongd við felagið um samstarvsavtalu. Ætlandi verða úrslitini av forkanningunum, uppskot til samstarvsavtalu og ráðgevaraavtala klár til fundin í nevndini 11. mars 2020.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). at heimila umsitingini at fara undir samráðingar um ráðgevaraavtalu.
b). at flyta 3.000 tkr av løgukarminum konta 5775 á nýggja projektkontu.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 05. februar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. februar 2020:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Viðv. samstarvsavtalu
Umsitingin hevur verið í samráðingum við Veiðifelagið Byrsumúla um eina samstarvsavtalu og eru komin ásamt um eina avtalu. Sí hjálagt uppskot.

Viðv. umsóknum um loyvir
Tilgongd at fáa neyðug loyvi er í gongd.

Roknað verður við at svar fyriliggja frá øllum myndugleikum innan mai 2020.

Viðv. forkanningum av lendinum
Tær eru ikki byrjaðar enn, men verður tað væntandi í apríl-mai 2020.

Viðv. ráðgevaraavtalu

Samráðingar eru ávegis og væntast eitt úrslit at fyriliggja í mai 2020.

Alt eftir hvussu tað gongur við ymsu loyvunum og forkanningunum er málið at kunnu bjóða arbeiðstøkuna út í juni 2020. Væntandi verður talan um innbodna lisiatión.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at innganga hjáløgdu samstarvsavtalu við Veiðifelagið Byrsumúla. Málið verður beint í býráðið umvegis byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 02. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Loyvisviðurskifti
Tilgongdin er væl ávegis og verður vónandi komið á mál við tí í summar.

Forkanningar
Sum liður í at fáa neyvari nøgdarmetingar viðv. økinum hevur Sp/f Munin gjørt sonevndar GEO-kanningar. Frágreiðingin verður væntandi tøk í viku 24.

Ráðgevaraavtala
Við støði í forkanningunum vera í juni samráðingar við Osbjørn Jacobsen/Henning Larsen, Føroya deild um ráðgevaraavtalu.

Útbjóðing
Ætlandi verður arbeiðið boðið út í innbodnari lisitatión so skjótt viðurskiftini omanfyri eru klár. Ætlandi kann arbeiðið byrja í heyst.

Teknisk útgerð
Felagið hevur søkt um at kunna fáa stuðul til at endurnýggja teknisku leirdúgvuskjótiútgerðina. Felagið hevur heintað inn tilboð, ið ljóðar uppá 175 tkr., felagið ynskir ein stuðul á 175 tkr.. Felagið kemur at gera ein egininnsats við niðurtøku av verandi útgerð og uppsetan av teirri nýggju mett til 30 tímar.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at játta felagnum 175 tkr. í stuðli til kastiútgerð at rinda av løgukontu L57033.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 10. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Verkætlanin hevur nú fingið umhvørvisgóðkenning frá Umhvørvisstovuni, umframt at Yvirfriðingarnevndin júst hevur staðfest avgerðina hjá friðingarnevndini fyri Streymoyar sýslu.

Í summar eru gjørdar lendiskanningar, umframt at gjørdar eru innleiðandi kostnaðarmetingar. Sí hjáløgd skjøl.

Eftir er nú at fáa gjørt ráðgevaraavtalu um projektering og eftirlit við verkætlanini, umframt manglar eisini endalig avkláring við Landsverk um viðurskifti í mun til landsvegalógina og at fáa endaligt byggiloyvi frá byggivaldinum. Málið er at verkætlanin kann fara í útboð í okt. 2020.

Í vár samtykti býráðið at gera samstarvsavtalu við Veiðifelagið Byrsumúla og verður henda undirskrivað ein av komandi døgunum.

Á fundinum greiðir umsitingin nærri frá gongdini higartil, herundir lendiskanningini v.m.

Veiðifelagið Byrsumúli er farin undir útvegan av kastiútgerðini, ið felagið fekk stuðul til fyrr í ár.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið.

**Mentamálanevndin 09. september 2020:** Umrøtt. Nevndin samtykti at seta ein politiskan samstarvsbólk, har andstøða og samgonga velja hvør sítt umboð, at fylgja við útinnanini av arbeiðnum.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur til fundin.

**Mentamálanevndin 26. oktober 2020:** Útsett.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur verið í samráðingum við ráðgevarafelagið Henning Larsen (deildina í Føroyum) um avtalu um tekniska ráðgeving viðvíkjandi lendisarbeiðinum og ávísum innstallatiónum til skjótibreyt til Veiðifelagið Byrsumúla í Sandvíkum. HMP Consult er undirráðgevi. Semja er við feløgini um at avrokna ráðgevaraarbeiðið eftir brúktum tímum og gera tað upp regluliga. Higartil eru brúktir 160 tímar.

Tilgongdin og vavið av verkætlanini, er viðgjørt og avstemmað við Veiðifelagið Byrsumúla.

Um farið verður undir projektering í november 2020 kann roknast við at útboð av verkætlanini kann vera um 2-3 mánaðir og arbeiðið fara í gongd í fyrsta ársfjórðingi 2021.

**Kostnaðarmeting**
Á fundinum kemur umsitingin at greiða frá metingum viðv. heildarkostnaðinum fyri verkætlanina, bæði ráðgevaraútreiðslur, hondverkaraútreiðslur (HVÚ) og aðrar útreiðslur í verkætlanini. Hugsanin er at bjóða anleggsarbeiðið út sum undirhondsboð til tvey feløg.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). at heimila umsitingini at gera ráðgevaraavtalu við felagið Henning Larsen við støði í avtalaðum tímum og tímataksti fíggjað av løgukontu L57033 Byrsumúli, skjótibreyt.

b). at heimila umsitingini at bjóða verkætlanina út og at samráðast við lægsta tilboðsgeva um sáttmála at leggja fyri nevnd.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 28. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Einmælt samtykt.

# 227/20 Útgerð - Musikkskúlin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 14.09.2020 | 245/20 | 20/03440-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.09.2020 | 224/20 | 20/03440-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 195/20 | 20/03440-1 |
| 4 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 227/20 | 20/03440-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Nýggi Tórshavnar musikkskúli hevur nú virkað í eitt ár. Við støði í royndunum hevur skúlaleiðslan víst á tørv á ávísari útgerð og hentleikum til tess at gera funktiónirnar og upplivingina betri.

Talan eru um viðurskifti, sum ikki vóru við í byggiverkætlanini og tí krevur aðra fígging.

Ætlanin er at útvega lørift (biografstødd) og sjónvørpu til Hátún. Harumframt lørift og sjónvørpu til Tinnuna, ið eisini ætlast broytt, so hølið betur hóskar til framførslur og fundir. Eisini er talan um smærri íløgur í skíggjar, gardinur v.m.

Musikkskúlin kemur saman við umsitingini at standa fyri hesum útveganum, ið mettar eru at kosta uml. 2 mió.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at játta kr. 2 mió av kontu 7710 Ferðavinna til kontu 5510 Tórshavnar musikkskúli.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 14. september 2020:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Halla Samuelsen, tekur ikki undir við tilmælinum, vísandi til at endalig uppgerð ikki fyriliggur og at biðið er um frágreiðing um verkætlanina.

**Fíggjarnevndin 16. september 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við Mentamálanevndini og beinir málið í býráðið til tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við Mentamálanevndini, vísandi til at endalig uppgerð ikki fyriliggur og biðið er um frágreiðing um verkætlanina.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið hjá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, 2 blonkum atkvøðum og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson.

Málið soleiðis samtykt við fyrstu viðgerð og beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

## 228/20 Uppskot um avtalu við Fjølrit um nýtslu av vardum verkum.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 27.08.2018 | 251/18 | 18/00115-5 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.09.2018 | 257/18 | 18/00115-5 |
| 3 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 216/18 | 18/00115-5 |
| 4 Mentamálanevndin | 07.11.2018 | 334/18 | 18/00115-5 |
| 5 Fíggjarnevndin | 05.12.2018 | 353/18 | 18/00115-5 |
| 6 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 311/18 | 18/00115-5 |
| 7 Mentamálanevndin | 19.10.2020 | 272/20 | 18/00115-5 |
| 8 Fíggjarnevndin | 21.10.2020 | 259/20 | 18/00115-5 |
| 9 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 228/20 | 18/00115-5 |

**Upprunin til málið:**
Áheitan frá Fjølrit at gera avtalu um nýtslu av vardum verkum.

**Lýsing av málinum**
Fjølrit er felagsskapur, sum er góðkendur sambært § 40 í upphavsrættarlógina til at umsita rættindi hjá upphavsrættarfólki og er meginfelag hjá feløgum, sum umboða rættindahavarar, tá ið verk, vard av lógini um upphavsrætt, verða nýtt.

Kommunufelagið hevur samskift við Fjølrit um avtalu og hevur gjørt eitt uppskot til standardavtalu. Nakrar kommunur ætla at leggja avtaluna fyri kommunustýrini at taka støðu til. Higartil hevur bert Runavíkar kommuna skriva undir avtaluna.

Sambært uppskotinum til avtalu verður gjaldið 200 kr. fyri hvønn næming í fólkaskúlunum í kommununi. Næmingatalið í Tórshavnar kommunu er uml. 3.000, sostatt er tørvur á 600.000 kr., og verður avtalan undirskrivað, er neyðugt at játta hesa upphædd á kontu 5313 Gjøld til rættindi. Á kontu 5313 er játtan til Sprotan og Koda.

Uppskot til fyribils avtalu við fjølrit er hjálagt.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 30 frá 30. apríl 2015 um upphavsrætt.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/léttar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja hjáløgdu standardavtalu at galda í eini royndartíð á tvey ár frá 1. januar 2019.

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja, at í fíggjarætlan 2019 verða 600.000 kr. játtaðar aftrat á kontu 5313 Gjøld til rættindi og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina..

**Mentamálanevndin 27. august 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. september 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Uppskotið til avtalu er umrøtt á fundi við skúlaleiðarar í Tórshavnar kommunu, og samskifti er millum Fjølrit og Eysturskúlan um skráseting.

Uppskotið til avtalu er galdandi fyri tvey skúlaár frá 1. august 2018 til 1. august 2020. Fjølrit sendir rokning í mai. Rokningin er fyri eitt skúlaár og tekur støði í næmingatalinum 1. september árið fyri. Sostatt verður rokningin fyri hetta skúlaárið send í mai 2019.

Á býráðsfundi 27. september varð hjálagda uppskot til avtalu samtykt at galda í tvey ár frá 1. januar 2019. Sambært uppskotinum er avtalan tó galdandi fyri tvey skúlaár tvs. frá 1. august 2018.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til, at avtalan verður galdandi fyri skúlaárini 2018/2019 og 2019/2020.

**Mentamálanevndin 07. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 05. desember 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 13. desember 2018**: Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Fjølrit ynskir, at fyribils avtalan óbroytt heldur fram í tvey skúlaár afturat, frá august 2020-2022, tí tað eru ymisk viðurskifti sum Fjølrit ikki er komin á mál við enn m.a. vegna støðuna við korona, m.a. at gera eina kanning viðv. upplýsingum um brúk av verkum á skúlum við endamálinum at býta pening út til rættindahavar. Rokningin er fyri eitt skúlaár og tekur støði í næmingatalinum 1. september árið fyri. Gjaldið er kr. 200,- fyri hvønn næming og gjaldið hjá kommununi verður sostatt uml. kr. 600.000,- pr. skúlaár.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til, at fyribils avtalan framhaldandi verður galdandi fyri skúlaárini 2020/2021 og 2021/2022.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Einmælt samtykt.

# 229/20 Uppskot at velja uttanhýsis umboð fyri kommunustýrið í tvey skúlastýri

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 11.09.2019 | 246/19 | 18/03914-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 19.10.2020 | 269/20 | 18/03914-1 |
| 3 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 229/20 | 18/03914-1 |

**Upprunin til málið:**
Uppskot frá Gunvør Balle, at tað eina kommunustýrisumboðið í skúlastýrum verður eitt uttanhýsis umboð.

**Lýsing av málinum**
Sambært fólkaskúlalógini § 50 skal kommunustýrið velja umboð í skúlastýrini. Tvey kommunustýrisumboð skulu veljast í hvørt stýri, men eru færri enn 20 næmingar í einum skúla, skal bert eitt kommunustýrisumboð veljast í skúlastýrið í tí skúlanum.

Sambært frískúlalógini § 12 stk. 4 kann kommunustýrið eftir áheitan frá skúlastýrinum gera av, at ein av limum tess er við á skúlastýrisfundi uttan atkvøðurætt. Eitt kommunustýrisumboð er í skúlastýrinum í Lítlaskúla.

Í Tórshavnar kommunu eru 10 kommunalir fólkaskúlar og tveir frískúlar.

Á fundum við forkvinnur/formenn í skúlastýrunum og í eftirmetingini av Nám X hevur verið umrøtt, at annað kommunustýrisumboðið í skúlastýrinum kundi verið eitt uttanhýsis umboð. Sostatt hevði býráðið valt eitt umboð, sum er býráðslimur og eitt uttanhýsis umboð. Hetta umboð kundi t.d. verið fyri vinnuna, arbeiðsmarknaðin, miðnámsútbúgvingarnar ella frítíðarfelagsskapir.

Ætlanin er, at hesi umboð styrkja samband og samstarv millum skúla og útbúgvingarstovnar, vinnu, felagsskapir og lokalsamfelag. Sum eina roynd verður mælt til, at í fyrstu syftu fer ein býráðslimur úr skúlastýrunum í ávikavist Eysturskúlanum og Skúlanum á Fløtum, og býráðið velur so eitt umboð fyri vinnuna í skúlastýrið í Eysturskúlanum og eitt umboð fyri miðnám í skúlastýrið í Skúlanum á Fløtum.

Mannagongdin at velja uttanhýsis umboðini í Tórshavnar kommunu kann vera tann, at heitt verður á Vinnuhúsið at finna eitt umboð fyri vinnuna og á Glasir at finna eitt umboð fyri miðnámsútbúgvingarnar.

Val til skúlastýrini er samstundis sum býráðsval, og valskeiðið hjá skúlastýrinum er tað sama sum valskeiðið hjá kommunustýrinum. Sostatt eru smá tvey ár eftir av hesum valskeiði. Við støði í eini tílíkari roynd at velja uttanhýsis umboð í tvey skúlastýri, kann á heysti 2020 støða takast til, um Tórshavnar kommuna skal velja eitt uttanhýsis umboð í øll skúlastýrini, sum sambært lógini hava meir enn eitt kommunustýrisumboð, ella hildið verður fram sum nú, at bæði umboðini eru býráðslimir.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 44 frá 30. apríl 2018
Løgtingslóg nr. 46 frá 26. mars 2002 um frískúlar

**Upplýsingar frá umsitingini**
Einki at viðmerkja

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Einki at viðmerkja

**Møgulig frávik/læ ttar frá ásetingum**
Einki at viðmerkja

**Umhvørvisárin**
Einki at viðmerkja

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka undir við uppskotinum at velja eitt uttanhýsis umboð í skúlastýrið í Eysturskúlanum og eitt uttanhýsis umboð í skúlastýrið í Skúlanum á Fløtum og beina málið í býráðið.

**Mentamálanevndin 11. september 2019:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Halla Samuelsen og Bjørghild Djurhuus, stemma blankt.

**Ískoyti**:
Síðani samtyktina er málið ikki komið víðari í skipanini.

Skotið verður tí upp at taka málið uppaftur nú í sambandi við at kommunustýrisval er í næstum og at eitt komandi nývalt býráð kann fáa høvi til at velja nýggj umboð við støði í hesum máli.

Skotið verður upp at halda fast við ætlanina og evt. víðkað royndarverkætlanina við onkrum skúla afturat.

Møguligt samtykt í málinum kemur so at liggja til grund í málunum viðv. val av kommunustýrisumboðum í skúlastýrini, ið ætlandi verður í desember 2020. Av tí at talan er um lutfalsval í sambandi við val av slíkum umboðum, verður mælt til, at møgulig samgongu/andstøða avráða sínamillum í hvørjum føri tey velja eitt kommunustýrisumboð, sum er býráðslimur og sum ikki er tað.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at velja eitt uttanhýsis umboð í skúlastýrið fyri Skúlan á Fløtum og Eystursskúlan, ið ikki er býráðlimur. Málið verður beint í býráðið.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2020:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam, samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minnluti, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen, atkvøður ímóti og mælir til at ein heildarætlan verður gjørd fyri økið.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Tikið av skrá.

## 230/20 Útbjóðing av útstykking við Miðhorn í Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 06.10.2020 | 53/20 | 20/03654-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.10.2020 | 182/20 | 20/03654-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 21.10.2020 | 262/20 | 20/03654-1 |
| 4 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 230/20 | 20/03654-1 |

**Upprunin til málið:**
Ásannandi at tørvur støðugt er á fleiri bústøðum í Tórshavnar kommunu, og at neyðugt er at útvega fleiri byggiøki, fer kommunan undir at bjóða økið við Miðhorn út í almenna sølu.
Kommunuætlanin vísir á, at tørvur er á ymiskum bústaðasløgum, og metir umsitingin at hetta økið kann skipast við blandaðari bústaðabygging.

Mál nr. *19/01753* um útstykking av økinum við Miðhorn varð viðgjørt og samtykt í fíggjarnevndini 22. januar 2020.

Samtykt var:
- at kanna eftir um NN Holding eru áhugaðir í at makaskifta til íbúðarbygging, sambært avtalu undir Kongavarða.
- at økið, sum er eftir, eftir møguligt makaskifti, verður lýst til sølu í almennum útboði, til bústaðarbygging, eftir treytum sum umsitingin setur.

Kommunala eftirlitið hevur ikki góðkent ætlanina um at makaskifta ognina til NN Holding, og verður tí mett, at økið undir Miðhorni eigur at verða boðið út til almenna sølu til skipan av blandaðari bygging, bæði sethúsa- og íbúðabygging, herundir eisini leigubústaðir, eftir treytum ið umsitingin setur.
Økið, ið boðið verður út er sambært vegleiðandi kortskjali: *Møgulig byggilinja og útstykking til bústaðir, journal nr. 20/03654 - 3.*

Økið við Miðhorn liggur millum tveir býlingar, ið lýsa hvør sín bústaðardám. Vestanfyri liggur Norðasta Horn við sethúsum og tvíhúsum og eystanfyri liggur Millum Horna við íbúðarhúsum og sethúsum.
Um hugt verður eftir lendinum, kundi ein byggilinja við íbúðarhúsum verið løgd sum framhald frá íbúðarhúsunum Millum Horna og vestureftir móti Norðasta Horni og sethúsaútstykking verðið sambinding millum býarpartarnar.
Sí skjal 20*/03654 – 3 møgulig byggilinja og útstykkingar til bústaðir*

Keypari av ognini, skal prosjektera útstykkingina, soleiðis at samlaða byggingin er skipað í eini heild í mun til lendið og felagsøki. Økið skal skipast við atliti at atkomuviðurskiftum fyri øll, bæði í bygginini sjálvari og í mun til atkomu- og ferðsluviðurskiftum í økinum.

Tilboðsgevarar skulu hava neyðugar fakligar førleikar til at lýsa og loysa samlaðu ætlanina í síni heild.

**Lýsing av málinum – samandráttur**:
At byggja bústað á økinum við Miðhorn, hevur tað við sær, at Norðasta Horn fær betri samband við býin. Talan er um eitt avmarkað øki á matr. nr. 1160a, sum er ogn hjá Tórshavnar kommunu, sí kortskjalið.

Kortskjalið er bert vegleiðandi, og skal eitt hóskandi øki sundurbýtast frá matr. 1160a til endamálið. Á økinum eru fýra leigumál um traðarbrúk, sum eru uppsøgd at fara úr gildi 30. November 2020.

Í sambandi við útbjóðingina av økinum, fáa grannar høvi at koma við viðmerkingum, so teirra ynski í størst møguligan mun verða tikin við í ætlanina.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Vegaatkoma verður frá Landsvegi ella frá privatum vegi, millum Horna.
Økið liggur í 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum í høvuðsheitum verður nýtt til landbúnað og alment frílendi og tilíkt. Loyvt verður einans at byggja fjós, úthús og annað, sum hevur við vanligt traða- og jarðarbrúk at gera.
Almenna byggisamtyktin skal tí broytast fyri økið, um farið verður undir útstykkingina, soleiðis at økið verður fevnt av ásetingunum fyri A1 øki, og alt eftir nágreiniligu útstykkingarætlanini, verður helst neyðugt at gera serstaka byggisamtykt. Tað vil siga, at byggisamtyktin skal broytast fyri økið.
Hugsast kann, at partur av økinum verður í A1 øki og partur verður í A3 øki, og at serstøk byggisamtykt skal gerast fyri part av økinum.

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Málið verður avgreitt við allar avvarðandi myndugleikar og leigarar. T.d. liggur økið upp at landsvegi, sum krevur eina hoyring hjá Landsverki. Harafturat skal ein matrikulering fara fram, sum krevur eitt samskifti við Umhvørvisstovuna.

**Skjøl:**
*Møgulig byggilinja og útstykking til bústaðir, journal nr. 20/03654 - 3.*

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, býverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til:
- at umsitingin fær heimild at bjóða økið við Miðhorn út í almenna sølu.
- útbjóðingin skal skipast í tvær verkætlanir:
  1. Sethúsaøki
  2. Íbúðarbygging til leigu
- Útbjóðingin verður skipað eftir sama leisti, ið áður er brúkt, sambært útbjóðingartreytum, ið umsitingin setir.

Umframt at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 06. oktober 2020:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal, Bergun Kass og Tróndur Sigurðsson, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, atkvøður blankt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. oktober 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn, Bogi Andreasen og Helena Dam á Neystabø, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, atkvøður blankt.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, taka undir við Byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen, tekur ikki undir við málinum og mælir til, at spurningurin um yvirtøku av landsvegnum verður avgreiddur, áðrenn økið verður boðið út sambært omanfyristandandi treytum.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, ongari ímóti og seks blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

# 231/20 Dagføring av vegnum Argjavegur/Argjaboðagøta

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 26.11.2019 | 83/19 | 19/04645-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 04.02.2020 | 7/20 | 19/04645-1 |
| 3 Ferðslunevndin | 20.02.2020 | 7/20 | 19/04645-1 |
| 4 Tekniska nevnd | 10.03.2020 | 16/20 | 19/04645-1 |
| 5 Tekniska nevnd | 08.09.2020 | 36/20 | 19/04645-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 16.09.2020 | 229/20 | 19/04645-1 |
| 7 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 201/20 | 19/04645-1 |
| 8 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 231/20 | 19/04645-1 |

**Upprunin til málið:**
Umsókn er komin um at byggja íbúðarhús við 27 íbúðum umframt felagshús á matr. nr. 43g, á Argjaboða (j.nr. 18/03069).

Býráðið hevur samtykt at gera eina serstaka byggisamtykt fyri økið, og í tí sambandi eru fleiri kærur komnar inn frá íbúgvum á Argjaboða, sum klaga um at vegurin er ov vánaligur til meira ferðslu, í støðum bert 1 spor og eingin gongubreyt.

Byggi- og býarskipanarnevndin samtykti 11. September 2019, at góðkenna uppskotið um nýggja serstaka byggisamtykt og at kommunan fær vegin út á Argjaboða dagførdan.

Fíggjarnevndin samtykti 13. november 2019 at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið viðvíkjandi byggisamtyktini í býráðið og at beina málið um dagføringina av vegnum út á Argjaboða í teknisku nevnd og stovna nýtt mál hesum viðvíkjandi.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Sunnari partur av Argjavegnum út ímóti Argjaboðagøtu, íalt 160 m, er einans uml. 4 m breiður. Vegirnir báðumegin eru góðar 9 m í breidd.

Skal vegurin breiðkast, so er neyðugt hjá kommununi fyrst at ogna sær lendið og møguliga bygningar. Á niðaru síðu eru 13 privatir eigarar og fleiri neyst og á ovaru síðu eru 9 privatir eigarar og 2 sethús.

Um tann parturin av vegnum, sum bert er 4 m breiður, skal breiðkast, so hann er eins breiður sum restin, verður arbeiðið mett at kosta áleið (20.000 x 160) kr. 3,2 mió., tá er ognartøka, keyp av húsum/neystum o.a. ikki við.

Ein fyribils loysn kundi verið, at sett upp ferðsluljós við radara, fyri at stýra ferðsluni, soleiðis at bilar ikki møtast á tí smala partinum. Kostnaðurin av hesum verður mettur til uml. 300.000,- kr.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Umsókn at byggja á matr. nr. 43g, á Argjaboða, j.nr. 18/03069.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Tað eru ongin frávik, men málið skal viðgerast av ferðslunevndini, áðrenn nakað kann gerast.

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at arbeitt verður víðari við eini loysn, har tað verða sett upp ferðsluljós við radara, fyri at stýra ferðsluni og at leggja málið fyri nevndina aftur, tá eitt liðugt uppskot fyriliggur.

**Tekniska nevnd 26. november 2019:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Bergun Kass, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, atkvøður ímóti og mælir til, at vegurin verður dagførdur.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, atkvøður blankt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt eitt meira ítøkiligt uppskot til eina loysn, har ferðslan verður stýrd við ferðsluljósum, og eitt gonguøki á 1 m verður strikað upp á ovara borð. Uppskotið hevur verið til ummælis hjá ferðslugrannskoðara, har hann gevur sítt viðmæli til uppskotið við smærri viðmerkingum so sum uppstriking v.m. Hetta kemur við í endaligu projekteringini av ferðsluloysnini.

Eisini er ein støðulýsing gjørd av vegastrekkinum, sum m.a. sigur at vegastrekkið er í góðum standi, tá hugsað verður um stabilitet av vegnum.

Eisini er umbiðin ein ferðslugrannskoðan av økinum í verandi líki. Hon er ikki tøk enn.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at arbeiða víðari við uppskotinum j.nr. 19/04645-5 støðumynd – ferðsluljós, at strika 1 m gongubreyt á ovara borð og beina málið í ferðslunevndina umframt at hava ein ástaðarfund.

**Tekniska nevnd 04. februar 2020:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Bergun Kass, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, atkvøður blankt.

**Tilmæli:**
Ferðslubólkurin mælir til at taka undir við ætlanini.

**Ferðslunevndin 20. februar 2020:**
Uppskot um ferðsluljós er ein brúkbar loysn. Ferðslunevndin mælir tó til at bíða verður fyribils við at gera broytingar á nevnda vegastrekki, vísandi til at ferðslan er sera lítil. Higartil eru ikki skrásett ferðsluóhapp ella líknandi á staðnum.

**Ískoyti:**
Møguleiki er at breiðka vegin í støðum, har økið fram við vegnum er kommunal ogn. Hetta kann gerast beinanvegin. Eisini eigur man at kanna møguleikan um keyp/gerðabýti við ánarar, har hetta kann lata seg gera. Umsitingin hevur gjørt tekning, ið vísir á hesar møguleikar, sí "*Kort – víðkanar økir*" . Kostnaðarmetingin av hesum er mett til 3,65 mill. sí kostnaðarmeting .
Fyrst eigur projekt og nágreinilig kostnaðarmeting av verkætlanini at verða gjørd. Hetta arbeiðið er mett til 200.000 kr. Hetta kann fíggjast av rakstrarkonto fyri vegir 8110.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við at projekt og nágreinilig kostnaðarmeting verður gjørd, og at málið kemur aftur í nevnd, tá hetta er gjørt.

**Tekniska nevnd 10. mars 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur samráðst við Tummas Rubeksen, ánara av matr. 214 og 39a, Argir, um at kommunan keypir ognir hansara, og at hann fær eitt hóskandi grundstykki hinumegin vegin av matrikul nummar 122k.

Semja varð um at fáa tvær óheftar metingar av ognunum og hesar eru:

Protek sp/f: virðið av húsi kr. 1.800.000 kr.
Skyn: virðið av húsi kr. 2.550.000 kr.

Grundstykkið er mett til 750.000 kr.

Húsini hjá Tummas eru øll umvæld og eru í sera góðum standi, og hann hevur ætlanir um at byggja út í nærmastu framtíð og ynskir tí eina skjóta avgerð í hesum máli. Hann upplýsir, at ognin er skuldarfrí, og um hann skal góðtaka eina semju, so skal hann somuleiðis vera skuldarfríur í nýggju húsunum.

Hann sigur seg hava kannað kostnaðin fyri at byggja nýggj hús, t.v.s. útgrevstur og bygging, og at hetta kemur at kosta honum áleið 3,6 mió. kr. T.v.s. at hann, umframt grundstykkið frá kommununi, skal hava 3.600.000 kr. fyri ognir sínar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- At kommunan letur honum hóskandi grundøki av matrikul 122k
- At kommunan keypir ognina frá Tummas Rubeksen fyri kr. 3.600.000
- At keypið av ognini verður flutt á konto 6175, L61020, Keyp av jørð, og verður fíggjað soleiðis:
    - Kr. 350.000 av konto 6875, L68035, Kloakk Tróndargøta
    - Kr. 500.000 av konto 6875, L68027, Kloakk Signabø
    - Kr. 389.000 av konto 6875, L00002, framfluttur karmur
    - Kr. 611.000 av konto 6875, L00001, karmur fyri árið
    - Kr. 1.050.000 av konto 6810, kloakkir o.a.
    - Kr. 700.000 av konto 6811, áir, yvirflatuvatn og veitir

  At málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 08. september 2020:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum treytað av góðkenning frá kommununala eftirlitinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Bjørghild Djurhuus, tekur ikki undir við tilmælinum og mælir til at ein heildarloysn verður funnin fyri allar eigararnar á vegastrekkinum og at peningurin heldur verður játtaður av keyp og sølu.

**Ískoyti:**
Í tilmælinum viðvíkjandi mál 19/04645 skal tað ikki standa 389.000 kr. av 6875, L00002, men L00001.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- At kommunan letur honum hóskandi grundøki av matrikul 122k
- At kommunan keypir ognina frá Tummas Rubeksen fyri kr. 3.600.000
- At keypið av ognini verður flutt á konto 6175, L61020, Keyp av jørð, og verður fíggjað soleiðis:
  - Kr. 350.000 av konto 6875, L68035, Kloakk Tróndargøta
  - Kr. 500.000 av konto 6875, L68027, Kloakk Signabø
  - Kr. 389.000 av konto 6875, L00001, framfluttur karmur
  - Kr. 611.000 av konto 6875, L00001, karmur fyri árið
  - Kr. 1.050.000 av konto 6810, kloakkir o.a.
  - Kr. 700.000 av konto 6811, áir, yvirflatuvatn og veitir

  At málið verður beint í býráðið sum eykajáttan til tvær viðgerðir umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. september 2020:** Ein meiriluti**,** Annika OLsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum og mælir til at ein heildarloysn verður funnin fyri allar eigararnar á vegastrekkinum og at peningurin heldur verður játtaður av keyp og sølu.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri, 1 atkvøðu ímóti og trimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Karina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddi: Tróndur Sigurðsson.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Helena Dam á Neystabø og Bjørghild Djurhuus.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Tikið av skrá.

| | **Býráðsfundur**<br>29. oktober 2020 | Blað nr.: 995<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

## 232/20 Broytan av svingi í Blómubrekku

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 09.06.2020 | 28/20 | 20/01731-2 |
| 2 Tekniska nevnd | 08.09.2020 | 35/20 | 20/01731-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 16.09.2020 | 230/20 | 20/01731-2 |
| 4 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 199/20 | 20/01731-2 |
| 5 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 232/20 | 20/01731-2 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í sambandi við at Blómubrekka er knýtt í Villingadalsvegin, er stór ónøgd við krappa svingið miðskeiðis á strekkinum. Hetta sving er gjørt fyri langari tíð síðan, áðrenn ætlanina at knýta í Villingadalsvegin.

Kommunan hevur havt samráðingar við Bústaðir um at sleppa inn á økið hjá teimum, fyri at gera svingið meira lagaligt at koyra ígjøgnum.
Grundin til at tað verður gjørt nú er tann, at Fjarhitafelagið skal leggja leiðingar har nú.

Verkætlanin verður fíggjað av rakstrarkonto fyri vegir 8110. Kostnaðurin er 1 mió. kr.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið.

**Tekniska nevnd 09. juni 2020:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Upprunaliga var ætlanin at fíggja arbeiðið, at broyta svingið við Blómubrekku, av rakstarkonto 8110 vegir.

Í veruleikanum er talan um eina verkætlan. Harumframt er talan er um eina upphædd, sum tyngir rakstrarkonto 8110 ov nógv, og tí verður heldur mælt til at fíggja hesa verkætlan av 6875 – L00002, framfluttur løgukarvmur, við kr. 389.000 og av 6875 – L00001, løgukarmur fyri árið, við kr. 611.000.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- at játta kr. 389.000 av konto 6875, L00002 framfluttur løgukarmur fyri árið, til konto 8175, nýggj verkætlan «Broytan av svinginum í Blómubrekku»
- at játta kr. 611.000 av konto 6875, L00001, løgukarmur fyri árið, til konto 8175, nýggj verkætlan «Broytan av svinginum í Blómubrekku»
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 08. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. september 2020:** Samtykt at taka undir við Teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð. Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

## 233/20 Vegur til biogassverkið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 08.09.2020 | 37/20 | 20/02256-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.09.2020 | 231/20 | 20/02256-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 200/20 | 20/02256-1 |
| 4 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 233/20 | 20/02256-1 |

**Upprunin til málið:**
Nýtt biogassverk á Skarðshjalla

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í sambandi við at Biogassverkið hevur keypt øki inni á Skarðshjalla til sítt virksemi, er neyðugt hjá kommununi at fáa veg gjørdan til økið. Talan er um at leinga verandi veg áleið 70 m.

Upprunaliga var ætlanin at fíggja arbeiðið av rakstarkonto 8110 vegir.

Í veruleikanum er talan um eina verkætlan. Harumframt er talan um eina upphædd, sum tyngir rakstrarkonto 8110 ov nógv, og tí verður heldur mælt til at fíggja hesa verkætlan av 6875 – L00001, løgukarmur fyri árið, við kr. 1.300.000.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- at játta kr. 1.300.000 av konto 6875, L00001 løgukarmur fyri árið, til konto 8175, nýggj verkætlan «Vegur til Biogassverkið»

- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 08. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. september 2020:** Samtykt at taka undir við Teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð. Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

## 234/20 Heimasta horn, matr. nr. 1121a - byggibúgvið øki til tríggjar íbúðarblokkar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.10.2020 | 209/20 | 20/03778-1 |
| 2 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 234/20 | 20/03778-1 |

**Upprunin til málið:**

Marin Katrina Frýdal, forkvinna í byggi- og býarskipanarnevndini, leggur fylgjandi mál fyri byggi- og býarskipanarnevndina.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Á Heimasta horni, matr. nr. 1121a, Tórshavn er eitt byggibúgvið øki til tríggjar íbúðarblokkar. Grundstykkið hevur staðið órørt í nógv ár og síðani 2010 hevur Betri banki átt ognina. Vísandi til stóru og vaksandi íbúðarneyðina í høvuðsstaðnum, hevði verið ynskilig, at fíggingarstovnurin varð meira virkin og vísti samfelagsligtsinni og ábyrgd við at luttaka í arbeiðinum við at loysa bústaðarneyðina.

Á grannaognini matr. nr. 1119b eigur Bústaðir tveir íbúðarblokkar, men við teirra skerdu orku og kørmum er avmarkað hvat tey kunnu byggja. Tí kundi Betri t.d. farið í samstarv við Bústaðir ella onnur um at byggja leiguíbúðir, ið størstur tørvur er á og soleiðis at verða við til at lyfta hesa tungu samfelagsligu uppgávu.

**Lógir, ásetingar o.a.**
**Upplýsingar frá umsitingini**
**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Nevndin tekur støðu á fundinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. oktober 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, mælir til at umsitingin, umvegis býráðið, fer í samráðingar við Betri um at fáa bygt á økinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Helena Dam á Neystabø, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, ongari ímóti og 5 blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Heðin Mortensen.

Blankt atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

# 235/20 Áheitan á Tórshavnar kommunu at gera eina meting av hvat skal gerast og at fáa svar aftur frá Tórshavnar kommunu um hvør ætlanin er við Heinagøtu á hesum økinum og nær?

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 06.10.2020 | 47/20 | 20/01228-7 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.10.2020 | 264/20 | 20/01228-7 |
| 3 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 235/20 | 20/01228-7 |

**Upprunin til málið:**
Áheitan frá íbúgva við Heinagøtu, um at kommunan umvælir og asfalterar vegin.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Heinagøta er bæði privatur og kommunalur vegur. Fyrsti partur av Heinagøtu er privatur vegur, sum er gjørdur í 1972. Eigarin av vegnum er deyður og eisini ein av arvingunum til vegin. Tað eru 9 hús, sum eru knýtt at tí privata partinum av Heinagøtu. Fyri at koma til tann kommunala partin av Heinagøtu, skal koyrast ígjøgnum privata partin. Til tann kommunala partin av Heinagøtu eru knýtt 20 hús.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 64 frá 11. desember 1962 um matrikulering og sundurbýti v.m.
Víst verður til §27, c, stk. 2, um yvirtøku av vegi, sum hevur ligið óátalaður í 20 ár.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Fólk frá umsitingini/rakstrardeildini hava gjørt eina kostnaðarmeting av hvat tað kemur at kosta kommununi at dagføra tann privata partin av Heinagøtu.

Privati parturin av Heinagøtu

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1413m | 250 kr. | 400 kvm | 100.000 kr. |
| 1412r | 250 kr. | 81,4 kvm | 20.350 kr. |
| 1413e,f g,h,i,k | 250 kr. | 120 kvm | 30.000 kr. |

**PRIVATI PARTURIN: 150.350 kr**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Tað eru nógvir privatir vegir í kommununi, har eigarin ella avvarðandi hava sent umsókn til kommununa um at yvirtaka vegin. Fleiri av vegunum eru ikki í góðkendum standi og eru tí ikki yvirtiknir. Verður Heinagøta yvirtikin av kommununi, setur hendan yvirtøkan eitt fordømi fyri aðrar yvirtøkur av øðrum privatum vegum, og tað kann koma at viðføra stórar útreiðslur fyri kommununa.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Løgtingslóg nr. 64 frá 11. desember 1962 um matrikulering og sundurbýti v.m.
Kort yvir Heinagøtu

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>29. oktober 2020 | Blað nr.: 1002<br><br>Formansins merki: |

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at vegurin verður yvirtikin, sambært serligu reglum í matrikullógini fyri vegir, ið eru eldri enn 20 ár og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 06. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Einmælt samtykt.

## 236/20 Lendisgøtur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2018 | 40/18 | 18/00992-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.03.2018 | 81/18 | 18/00992-1 |
| 3 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 67/18 | 18/00992-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.03.2019 | 36/19 | 18/00992-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.03.2019 | 83/19 | 18/00992-1 |
| 6 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 68/19 | 18/00992-1 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.04.2020 | 65/20 | 18/00992-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 06.04.2020 | 86/20 | 18/00992-1 |
| 9 Býráðsfundur | 06.04.2020 | 58/20 | 18/00992-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 23.04.2020 | 82/20 | 18/00992-1 |
| 11 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 82/20 | 18/00992-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 21.10.2020 | 265/20 | 18/00992-1 |
| 13 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 236/20 | 18/00992-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Ein mió. kr. eru avsettar á íløgum 2018 til lendisgøtur og verður mælt til at gera hesa raðfesting:
1. Sandá heimari partur av gøtuni 765 m
2. Part av 235 m ringgøtuni í Villingadalsfoss.

Kostnaður er mettur til 1 mió. kr.

Ad. 1. Framhald og nýgerð av gøtu við Sandá, nýgerð av gøtu uml. 765 m.
Búnaðarjørð, krevur skrivligt samtykki frá Búnaðarstovuni og festara.

Ad. 2. Nýgerð av gøtu við Villingadalsfoss, niðan á fossin. So langt sum 235.000 kr. røkka.
Búnaðarjørð, krevur skrivligt samtykki frá Búnaðarstovuni og festara.

Havast skal í huga ognarviðurskifti, brúksrættindi, viðlíkahaldsskyldur, kostnaður og fígging. Avgerandi er, at eigarin av lendinum gevur loyvi, har sum kommunan ikki eigur, og at ferðslurættindi verða lýst á farleiðina, antin sum servituttur ella onnur avtala.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at játtaðar verða kr. 1 mió. av løgukarminum L00001 á konto 6275 Fríðkan av kommununi til framhaldandi gerð av lendisgøtum og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Einmælt samtykt.

Bergun Kass luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Í 2019 er ætlanin at fara undir gøtuna við Sandá, sum varð sett á breddan í 2018, umframt gøtuna frá gl. vatnbrunninum yvir til ánna í Villingadali.

Fyri gøtuna við Sandá hevur umsitingin í 2018 fingið til vega tilboð, áljóðandi 2.9 mió. kr. Arbeiðið varð raðfest í 2018, og er nakað av arbeiðinum longu gjørt. Játtanin í 2019 skal fevna um írestandi fígging, soleiðis at allur teinurin kann raðfestast.

Gøtan frá gl. vatnbrunninum yvir til ánna í Villingadali er mett til at kosta einar 500.000 kr.

Írestandi fígging fyri 2019 sæst niðanfyri:

| | |
|---|---|
| Gøta við Sandá | 2.900.000 kr. |
| Gøta við Sandá (goldið) | 701.250 kr. |
| Gøta Villingadal (meting) | 500.000 kr. |
| Írestandi játtan fyri 2018 | 1.200.000 kr. |
| **Eftir at játta fyri 2019** | **1.500.000 kr.** |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at játta 1.5 mió kr. av íløgukarminum L00001 á konto 6275 Fríðkan av kommununi til lendisgøtur L62019, og at beina málið **í** býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býraðið.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeitt hevur verið fyri 1.9 mill. í 2019, á strekkinum fram við Sandá. Stígur kom í við at fáa endaligt loyvi frá lendisánara til seinasta strekkið. Sambært tilboði frá arbeiðstakara er kostnaðurin til seinasta strekkið 1,0 mill. kr. eftir. Skjal 18/00992-22 Planlagdar lendisgøtur 2020 Sandá

Lendisgøtan við Villingadal bíðar eftir loyvi frá Búnaðarstovuni. Rykt er fleiri ferðir eftir loyvi, og hevur Búnaðarstovan boðað frá, at loyvi verður sent í næstum. Arbeiðið er mett til 500.000,- kr. Skjal 18/00992-22 Planlagdar lendisgøtur 2020 Villingadal

Ynski er at gera gøtusamband millum gomlu Vatnbrunnarnar í Grásteinsgøtu og Rossagøtuna. Rás er traðkað, men lendisviðurskiftini og hall á lendinum gera tað neyðugt at gera trappur í støðum í lendinum. Skjal 18/00992-22 Planlagdar lendisgøtur 2020 til Rossagøtuna

**Skjøl:**
18/00992-22 Planlagdar lendisgøtur 2020 Sandá
18/00992-22 Planlagdar lendisgøtur 2020 Villingadal
18/00992-22 Planlagdar lendisgøtur 2020 til Rossagøtuna

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at framflyta avlop frá 2019 1.227 mió. kr. og at játta 1.00 mió. kr. av íløgukarminum L00001 á konto 6275 Fríðkan av kommununi til lendisgøtur L62019, og at beina málið **í** býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 06. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 06. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Rættleiðing til gøtuna við Sandá
Gøtan við Sandá varð boðin út í 2018.
2 tilboð komu inn, lisitatión var 6. novembur 2018:
Tikið varð av lægra tilboðnum, sum var áljóðandi 2.221.250 kr.

**Mettur kostnaður var sostatt:**

| | |
|---|---|
| Tilboð | 2.221.250 kr. |
| Mettur eykakostnaður | 678.750 kr. |
| **Mettur kostnaður íalt** | **2.900.000 kr.** |

**Status:**

| | |
|---|---|
| Goldið higartil tilboð | 1.765.550 kr. |
| Goldið higartil eyka (t.e. Eyka hegn, eyka atkoma frá AB vøllinum.o.a. | 258.520 kr. |
| **Goldið higartil** | **2.024.070 kr.** |
| Arbeiði eftir av gera tilboð | 455.700 kr. |
| Eftir til eyka | 420.230 kr. |
| **Eftir av játtan** | **875.930 kr.** |

Henda upphædd er íroknað framflutta upphædd frá 2019

Avlop verður brúkt til Lendisgøturnar planlagdar í 2020. T.e. gøtan í Villingadali og niðan á Rossagøtuna.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 23. apríl 2020:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti.**

Viðvíkjandi lendi burtur av matr.nr. 32a, Kirkjubøur/Argir, sum er privatogn. Sí kortskjal 18/00992 - 33

Kommunan hevur í samráð við eigaran gjørt gøtu framvið ánni, inni á matr. nr. 32a, Kirkjubøur/Argir, og hevur í hesum sambandi flutt hegnið niðan um gøtuna. ( Sí kortskjal 18/00992 – 33 )

Neyðugt verður at keypa uml. 270m2, av lendi til gøtuna, frá verandi eigara.

Talan er um D1 øki í byggisamtyktini. Fermeturprísur sambært yvirliti hjá Búnaðarstovuni fyri velt lendi og væl dyrkingarbært lendi, sum liggur væl fyri er 137kr. pr. m2. Samlaður keypsprísur verður uml. 37.000,- kr. og skal kommunan harumframt rinda rinda allar allar útreiðslur til matrikulering. Mettur kostnaður kr. 4.000,-

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>29. oktober 2020 | Blað nr.: 1006 |
| | Formansins merki: |

**Tilmæli.**

Kommunustjórin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at keypa neyðugt lendið uml. 270 fermetrar, burtur av matr.nr. 32a, Kirkjubøur/Argir, til gøtuna fyri 37.000,00 kr. og at rinda útreiðslur til matrikulering uml. 4.000,00 kr.

Konto 6275 Fríðkan av kommununi til lendisgøtur L62019.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Einmælt samtykt.

## 237/20 Skógfriðing av øki fram við Hoydalsá ísv makaskifti við Búnaðarstovuna

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.06.2020 | 126/20 | 20/01272-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 25.06.2020 | 189/20 | 20/01272-1 |
| 3 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 150/20 | 20/01272-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 26.10.2020 | 213/20 | 20/01272-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 28.10.2020 | 286/20 | 20/01272-1 |
| 6 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 237/20 | 20/01272-1 |

**Upprunin til málið:**
Ynskiligt er at víðka avtaluna um makaskifti millum Føroya Landsstýri og Tórshavnar kommunu ísv bygging av Glasir við øki framvið Hoydalsá, við skjali *20/01272-2 skógfriðing_makaskifti_Búnaðarstovan_23_01_2020*.
Fundur var millum Skógfriðingarnevndina og Tórshavnar kommunu 24. Januar um hetta málið, har avtalað varð, at Tórshavnar kommuna skuldi venda aftur til Skógfriðingarnevndina við teimum ognum, ið Tórshavnar kommuna tekur undir við skulu skógfriðast ísv avtaluna um makaskifti.
ískoyti í málið um makaskifti, skal sendast sum umbøn til Føroya Landstýri, má samtykkjast politiskt og sendast ráðnum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Umsitingin tekur undir við, at økið rundanum Hoydalsá skal skógfriðast. Fyri almenningin er frílendið fram við Hoydalsá av stórum týdningi fyri uppihald og trivnað, og er upplagt at skógfriða økið. Umsitingin ger eisini vart við, at tá talan er um skógfriðing so tætt uppat verandi bygging, vil reglan um at hoyra Skógfriðingarnevndina, um bygt verður nærri enn 300 metrar frá skógfriðaðum øki, geva óneyðuga umsiting fyri Skógfriðingarnevndina. Avtalast má við Skógfriðingarnevndina hvussu hetta kann umsitast í praksis, og varð eisini semja um hetta, tá málið varð umrøtt á fundinum við Skógfriðingarnevndina í januar 2020.

Umsitingin tekur undir við, at økið verður skógfriðað sambært viðlagda korti skjal 20/01272-3 makaskifti_búnaðarstovan_juni 2020, og at frílendisætlan verður gjørd, sum skipar økið, sum liggur innanfyri friðingarlinjuna fyri Hoydalsá.

**Lógir, ásetingar o.a.**
72/2015:Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um viðarlundir (Fyrisitingarheimild til Umhvørvisstovuna) Galdandi lóg

Uppskot um lóg um Náttúrumargfeldi

**Upplýsingar frá umsitingini**
Skógfriðing av øki er bindandi í mun til røkt, og krevur árliga játtan til hald av økinum. Hetta kann avtalast nærri við Skógrøkt landsins.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
*14/01476 Frílendisætlan fyri Hoydalsá,*
*17/01142 Skógfriðing, samstarv millum Tórshavnar kommunu og Skógfriðingarnevndina*
*18/00982 Skógfriðing*
*19/02816 Kampingøkið sambært ferðavinnupolitikkinum*

*20/00778 Innkomuvegurin samstarv við LV*
*Ymisk mál um urtagarðsstykkir*

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Mælt verður til, at kannað verður um til ber at skógfriða hetta økið, við áseting um, at friðingarlinjan fyri Hoydalsá er mark.
Hetta skal skiljast soleiðis, at sæð verður burtur frá ásetingini um at bygging 300 m frá skógfriðaða økinum skal til hoyring hjá Skógfriðingarnevndini, men at bygging uttanfyri friðingarlinjuna verður viðgjørd eftir reglum í galdandi byggisamtyktum.

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
skjal 20/01272-3 makaskifti_búnaðarstovan_juni 2020

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
| --- | --- | --- | --- | --- |
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**
Hald av skógfriðaðum øki er í løtuni uml. 2,50 kr./m$^2$/ár. Tó kann nærri avtalast millum Tórshavnar kommunu og Skógrøkt landsins um hetta.
Harumframt kostnaðir fyri hegn, gøtuskipan og træplanting o.a. meting er ikki gjørd fyri hendan partin. Hetta raðfestir kommunan.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, leiðarin á stjórnarskrivstovuni og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at spyrja Búnaðarstovuna, um tað ber til at víðka verandi avtalu sambært skjali 20/01272-3 og hvørjar treytir og bindingar eru og verða settar í tí sambandi, og leggja málið aftur fyri nevnd til endaliga støðutakan.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. juni 2020:** Ein meiriluti, Turið Horn, Gunvør Balle og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.
Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, atkvøður ímóti.
Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum, fyri hana luttók Gunvør Balle.

**Fíggjarnevndin 25. juni 2020:** Ein meiriluti, Annka Olsen, Gunnvør Balle og Turið Horn, tekur undir við Byggi- og býarskipanarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við at skógfriða økið vísandi til at økið frammanundan liggur sum D1 økið og mælir til at økið verður varðveitt sum D1 økið.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, 6 ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunnvør Balle, Sigrun Wardum, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddi: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Upprunaliga avtalan frá 2012 um makaskifti í sambandi við bygging av Glasir var, at Tórshavnar kommuna læt 31.492 $m^2$, og afturfyri fekk 32.087 $m^2$ frá Búnaðarstovuni. Búnaðarstovan ynskir at víðka avtaluna, til eisini at umfata ovara part av Hoydølum og urtagarðsøkini á Ternuryggi, tilsamans 149.362 $m^2$, við teirri treyt, at økið verður skógfriðað.
Talan er sostatt um, at kommunan í avtaluni letur 31.492 $m^2$ og fær 149.362 $m^2$.
Lutfallið er 1:4,74

Tórshavnar kommuna hevur í sambandi við at ynski er at víðka avtaluna um makaskifti, við økinum smb. *skjal 20/01272-13 makaskifti Búnaðarstovan yvirlit*, verið á fundi við umboð fyri Búnaðarstovuna, Yvirfriðingarnevndina og Skógfriðingarnevndina, fyri at viðgera hvørjar treytir verða galdandi fyri byggiøki, ið liggja á uppatliggjandi matriklum. Vanligt er, at ætlanir í frástøðu innanfyri 300 m frá skógfriðaðum øki skulu til hoyringar hjá Skógfriðingarnevndini.
Á fundinum 25. september varð lagt fram, at Tórshavnar kommuna ynskir at bygging, ið liggur í byggisamtyktarøki, ið er útlagt til bygging og liggur uppat skógfriðaðum øki, fylgir ásetingum fyri byggisamtyktina og ásettu friðingarlinjuni við Hoydalsá.
Hetta skal skiljast soleiðis, at ynski er, at sæð verður burtur frá ásetingini um at bygging 300 m frá skógfriðaða økinum skal til hoyring hjá Skógfriðingarnevndini, og at bygging uttanfyri friðingarlinjuna verður viðgjørd eftir reglum í galdandi byggisamtyktum.
Náttúrfriðingarnevndin og Skógfriðingarnevndin ynskja eisini einfaldari mannagongd á økinum.

**Niðurstøðan frá fundinum:**
Yvirfriðingarnevdin boðaði frá, at um byggisamtyktir hava verið til hoyring hjá Náttúrufriðingarnevndini og eru góðkendar, skulu umsóknir um byggiloyvi, ið fylgja ásetingum í byggisamtyktini ikki til hoyringar hjá náttúrufriðingarmyndugleikanum.
Skógfriðingarnevndin boðaði frá, at fyri skógfriðaða økið, ið verður partur av makaskiftisavtaluni, skal ein umsitingarætlan gerast í samstarvi millum Tórshavnar kommunu, Búnaðarstovuna og Skógfriðingarnevndina.
Umsitingarætlanin ásetur eisini treytirnar, sum liggja til grund fyri at bygging innan 300 m frá skógfriðaða økinum ikki skulu til hoyring hjá Skógfriðingarnevndini.

**Mannagongd:**
Næsta stig er at fáa býráðsins góðkenning at fara undir at gera umsitingarætlan sum partarnir semjast um. Eftir hetta kann víðkaða makaskiftisavtalan avgreiðast endaliga.

**Skjøl:**
*skjal 20/01272-13 makaskifti Búnaðarstovan yvirlit*
*skjal 20/01272-6 makaskifti_búnaðarstovan_juni2020*

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, leiðarin á stjórnarskrivstovuni og býararkitekturin mæla til at samtykkja, at avtalan um makaskifti millum Tórshavnar kommunu og Búnaðarstovuna verður víðkað sambært skjali 20/01272-13, at økið verður skógfriðað smb. skjali 20/01272-6, og at Tórshavnar kommuna í samstarvi við Búnaðarstovuna og Skógfriðingarnevndina fer undir at gera eina umsitingarætlan fyri skógfriðaða økið, ið ásetir treytir fyri økið, og byggisamtyktarøki, ið eru innanfyri 300 m frá skógfriðaða økinum. Tá semja er

um umsitingarætlanina, verður hon løgd fyri til politiska støðutakan, og verður endaliga makaskiftið tá endaliga avgreitt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. oktober 2020:** Ein meiriluti, Turið Horn, Gunvør Balle og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, mæla til at samtykkja at avtalan um makaskifti millum Tórshavnar kommunu og Búnaðarstovuna verður víðkað sambært skjali 20/01272-13 og at umsitingarætlanin fyri økið verður gjørd, áðrenn endaliga støðutakan.

Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum, fyri hana luttók Gunvør Balle.

**Fíggjarnevndin 28. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Einmælt samtykt. Markin Katrin Frýdal fór av fundinum vegna ógegni og í hennara sess kom Jógvan Arge.

## 238/20 Umsókn um keyp av geira at leggja afturat matr. nr. 139p, á Hjalla, Hoyvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 26.10.2020 | 217/20 | 20/02427-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 28.10.2020 | 287/20 | 20/02427-2 |
| 3 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 238/20 | 20/02427-2 |

**Upprunin til málið:**
Umsókn um keyp av økinum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Umsókn um at keypa umleið 93 fermetrar av matr. 139p, sum kommunan eigur til at leggja saman við matr, 139p, sum er eitt vinnustykki á Hjalla.

Eigarin hevur keypt tvey vinnustykkir frá Tórshavnar kommunu, sum hann síðan hevur lagt saman til eitt stykki, nú biður hann um at keypa meira øki, umleið 93 fermetrar.

Endamálið við at hann vil keypa meira øki er at fáa økið frammanfyri ætlaða bygningin meira reglulert og rúmligt, soleiðis at lættari verður at koma við stóru maskinunum til og frá verkstaðshallunum í bygninginum.

Verandi markið og skrái, har ætlanin er at gera broytingina, sæst frá Kaldbaksvegnum og tí verður hetta ikki meira sjónligt av hesi reguleringini. Skráin verður eitt sindur størri, men tá mold er koyrd á og sáða er í, so ber ikki til at síggja mun frá Kaldbaksvegnum.

Ætlanin hjá umsøkjaranum er at byggja ein lágan bygning út ímóti markinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í umráðspartinum B8 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavn.

**§ 15. Ásetingar fyri umráðispart B8 í 3. grundumráði**

1 Loyvt er einans at byggja hús til vinnuvirkir, her undir umsitingar- og tænastuvirki, verksmiðjur, goymslur og tílíkt og til tænastuvirksemi, ið hevur samband við hesi.

2 Virkini í hesum umráðispartinum skulu kunna flokkast í umhvørvisflokkunum 4 til 6 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

3 Bygging skal verða sett samsvarandi heildarætlan fyri alt økið ella hóskiligar partar av økinum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Onki mál sum hevur týdning fyri málið

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 4 til 6.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Viðmerkingar frá Verkætlanardeildini.**

Friðingarnevndin gav loyvi til útstykkingina, tá hon bleiv gjørd. Um man vil viðmæla hesum, kann vantast at fleiri ella allir, sum eiga stykkið í hesi útstykking, møguliga fara at biðja um tað sama í framtíðini og talan er um brattlendi, har skráarnir kunnu gerast sera markantir í lendinum.

**Viðmerkingar frá býarskipanardeildini.**
Tá útstykkingin á Hjalla varð planløgd, varð stórur dentur lagdur á at skipa grundøkini soleiðis í lendinum, at bygningarnir og virksemið annars fylgdi lendinum og í størstan mun ikki skuldu síggjast frá Kaldbaksvegnum. Við nøkrum fáum undantøkum er hetta eydnast sera væl, og vinnuøkið liggur væl fjalt, inntil koyrt verður inn á økið, sí viðhefta skjal. Hetta er m.a. orsøkin til, at vinnuøkið á Hjalla verður mett at verða eitt av teimum best eydnaðu vinnuøkjunum í Tórshavnar kommunu, tá hugsað verður um lendisplanleggin.

Um loyvi verður givið til at víðka matrikulin, verður meginreglan við skipanini av økinum brotin og vandi er fyri, at virksemið og byggingin á matriklinum gerst sjónligari frá Kaldbaksvegnum.

Ein slík víðkan hevði somuleiðis kunnað verið nýtt sum fordømi hjá øðrum grundøkjaeigarum á Hjalla, ið ynskja at víðka um ogn sína.

Býarskipanardeildin mælir tískil frá víðkanini av matriklinum.

**Skjøl**
Umsókn frá Magnus Hansen arkitekti j.nr. 20/02427/1
Raðútsýni myndir frá býarskipanardeildini j.nr. 20/2427-3

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til at ganga umsóknini á møti, vísandi til at talan er um eina minni regulering, treytað av at prosjekt av uppfylling og skráa verður latið inn og góðkent av kommununi, at sáa verður í skráan, og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 28. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Einmælt samtykt.

# 239/20 Endurskoðan av byggisamtyktum - almenna- og serstakar byggisamtyktir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2017 | 170/17 | 17/02748-1 |
| 2 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 222/17 | 17/02748-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 23.06.2020 | 145/20 | 17/02748-1 |
| 4 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 157/20 | 17/02748-1 |
| 5 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 23.06.2020 | 34/20 | 17/02748-1 |
| 6 Tekniska nevnd | 23.06.2020 | 32/20 | 17/02748-1 |
| 7 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 05.10.2020 | 40/20 | 17/02748-1 |
| 8 Tekniska nevnd | 06.10.2020 | 48/20 | 17/02748-1 |
| 9 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.10.2020 | 194/20 | 17/02748-1 |
| 10 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 239/20 | 17/02748-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu var á fyrsta sinni gjørd í 1972 sambært løgtingslóg nr. 13 um byggisamtyktir og býarskipan frá 21. mai 1954.

Byggisamtyktin varð endurskoðað í 1996 og seinast í 2009 í sambandi við, at býráðið og umsitingin ynsktu at endurskoða almennu byggisamtyktina og tær serstøku byggisamtyktirnar.
Síðani eru nógvar broytingar gjørdar bæði í kortskjalinum í almennu byggisamtyktini og tekstinum tó uttan, at hon er endurskoðað sum heild.
Dagførda almenna byggisamtyktin varð endaliga góðkend í desember 2012.

Byggi- og býarskipanarnevndin samtykti 2. mai 2005 og býráðið 26. mai 2006 (mál nr. 2005-1123) at seta ein bólk til at endurskoða og nútíðargera byggisamtyktina.
Endamálið var at fáa eitt betur stýrisamboð til dagligan rakstur og framtíðar útbyggingar av kommununi. Samstundis varð tað gingið ígjøgnum verandi byggisamtykt, bæði viðvíkjandi ásetingum og reglum eins og kortskjal.
Býráðið tók undir við hesum tilmæli:

***Tilmæli:***
*Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at býráðið, um byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevnd, heilsu- og umhvørvisnevndina og fíggjarnevndina góðkennir ætlaðu skipanina av arbeiðinum og velur eina serstaka nevnd við heimild í §36 í Ll. nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri, samansett av 2 umboðum fyri byggi- og býarskipanarnevndina, 1 umboð fyri teknisku nevnd, 1 umboð fyri heilsu- og umhvørvisnevndina, tekniska stjóranum, býararkitektinum og býarverkfrøðinginum, til at standa fyri arbeiðinum at endurskoða og nútímansgera byggisamtyktina. Samstundis verður mælt til, at fylgibólkurin ið settur er sambært býráðssamtykt 26. mai 2005, j. nr. 2005-1123, verður avtikin.*

Tey seinastu árini eru heilt nógvar umsóknir um broyting í byggisamtyktum komnar umsitingini í hendi. Søkt verður um broytingar, ið ikki skuldu verið neyðugar í mun til bygging og samtíðina. Tí er ynski um at endurskoða ta almennu byggisamtyktina og serstøku byggisamtyktirnar av nýggjum. Ítøkiliga skulu byggisamtyktirnar dagførast, gerast tíðarhóskandi, verða meiri skipaðar og kunna umsitast skynsamt.

Bygningskunngerðin ásetir, at har sum ein góðkend byggisamtykt er, gongur hon framum ásetingarnar í BK17 kap. 2 um bygningsreguleringar og ásetingar.
Serstakar byggisamtyktir liggja omaná bæði bygningskunngerð og almennu byggisamtyktina.
Broytingar í byggisamtyktum eru ikki fyrisitingarligar avgerðir, men skal metast sum eitt reguleringsamboð ella "lóggávubroyting". Tí skal viðmælast til at tær skulu fylgjast.

**Mannagongd:**
Í fyrstu atløgu verður málið lagt fram til býráðið at umrøða.

Skotið verður upp at skipa ein arbeiðsbólk og stýrisbólk, har tíð verður sett av til at arbeiða miðvíst við byggisamtyktunum. Atlit skulu takast til bygningskunngerðina og aðrar kunngerðir og ætlanir, soleiðis at gjøgnumskygni og samsvar er millum almennu byggisamtyktina, serstøku byggisamtyktirnar, kunngerðir og ætlanir, ið annars umrøða bygging og byggisamtyktir.

Allar deildir og starvsfólk, ið beinleiðis hava við byggisamtyktir at gera, skulu vera tikin til orðanna. Byggisamtyktirnar eru eitt sera týdningarmikið amboð og grundarlag fyri framtíðar útbygging av kommununi. Tí er neyðugt at øll, ið dagliga arbeiða við byggisamtyktum, gerast ein partur av arbeiðinum at endurskoða byggisamtyktirnar.

Týdningarmikið er, at tíð verður sett av til endurskoðanina. Arbeiðið kann skipast við einum arbeiðs- og stýrisbólki, har avgerast skal, hvør situr í ávikavist arbeiðs- og stýrisbólkinum. Í stýrisbólkinum kunnu býráðslimir og umboð fyri teknisku umsiting sita við heimild í §36 í Ll. nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri. Fylgibólkar kunnu samstundis setast í verk við ávísum uppgávum, um neyðugt.

Uppskot til arbeiðsbólk:
Sigurd Justinussen, málsviðgeri
Rakul Vest Højgaard, málsviðgeri
Hans Suni Eiriksfoss, byggimálsviðgeri

Uppskot til stýrisbólk:
Forkvinnan í byggi- og býarskipanarnevndini
Tekniski stjórin
Leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini
Býararkitekturin

Endurskoðan og dagføring av byggisamtyktum kann fara fram 5. hvørt ár.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Fyrra málið um endurskoðan av byggisamtyktunum:
2009-0216

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla nevndini til at umrøða málið um endurskoðan av byggisamtyktunum, at samtykkja uppskotið til mannagongd við arbeiðs- og stýrisbólki, umframt at dagføring av byggisamtyktum fer fram 5. hvørt ár og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at politisku umboðini verða Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam og Tróndur Sigurðsson.

**Ískoyti:**
Vísandi til § 36, stk. 1 í løgtingslóg um kommunustýri kann kommunustýrið seta serstakar nevndir at taka sær av einstøkum málum ella at ráðgeva kommunustýrinum, fíggjarnevndini ella aðrari fastari nevnd, og sambært § 36, stk. 2 í somu lóg er tað kommunustýrið, sum ásetir nærri reglur um virksemi, virkisskeið og manning av serstøkum, ráðgevandi nevndum.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og tekniski stjóri mæla býráðnum til at velja limir í stýrisbólkin, ið skal endurskoða byggisamtyktirnar.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Atkvøtt varð um tilmæli frá Anniku Olsen, um at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Síðani seinastu býráðssamtykt hevur støðugt verið arbeitt við at endurskoða byggisamtyktirnar. Ásannast má, at arbeiðið hevur verið drúgt, men eftir gjølla gjøgnumgongd er klárt at leggja uppskotið av endurskoðaðu almennu byggisamtyktini til viðgerðar.

Saman við stýrisbólkinum varð avgjørt at raðfesta almennu byggisamtyktina fyrst, síðani byggisamtyktirnar fyri bygdirnar og til síðst tær serstøku byggisamtyktirnar.

Arbeiðið at endurskoða ta almennu byggisamtyktina varð býtt í trý stig:

1. **Endurskoðan í mun til Bygningskunngerðina 2017 (BK17)**

   Í 2016 setti Landsverk Bygningskunngerðina 2017 í gildi, sum er galdandi fyri bygging í øllum Føroyum. Í BK17 eru ásetingar um ymisk viðurskifti innan bygging, so sum byggiregulerandi ásetingar, innrætting av bygningum, konstruktiónir, brunaviðurskifti, inniumhvørvi, orka og innleggingar.

   Áðrenn BK17 kom í gildi, vóru ongar landsdekkandi reglur viðvíkjandi omanfyristandandi viðurskiftum, og tí vórðu tær flestu av hesum ásetingunum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Eftir at BK17 kom í gildi, vórðu fleiri av teimum somu viðurskiftunum umrødd í bæði BK17 og í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, og kundi hetta tykjast ørkymlandi hjá summum borgarum. Tí varð tað mett at verða skilabest, at tær ásetingarnar, sum nú eisini stóðu í BK17, vórðu tiknar úr almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

   Sí annars skjalið *Endurskoðan í mun til BK17*, sum samanber kapitlarnar í almennu byggisamtyktini við kapitlarnar í Bygningskunngerðini 2017.

2. **Endurskoðan av kortinum (býarskipanini)**
   Næst varð farið í holt við at endurskoða kortið, ið skipar býin í tey ymisku økini. Nógvar broytingar/tillagingar eru gjørdar, og kunnu hesar síggjast á skjalinum *Endurskoðan av býarskipanini 17.06.20*, men nakrar orsakir eru gjøgnumgangandi, og tær eru:

   - Tillaging í mun til markaviðurskifti.
   - Broyting soleiðis at samsvar er við virksemið í økinum.
   - Broyting í sambandi við at ásetingarnar fyri økið eru broyttar.
   - Broyting, soleiðis at skúlar liggja í D3 øki, sum er kannað endamálinum.

3. **Endurskoðan av byggifyriskipandi ásetingunum**
   Tað er í kapitlinum "byggifyriskipandi ásetingar", at reglur viðvíkjandi bygging, so sum hædd, byggistig, nýtslustig, í teimum ymisku økjunum eru ásettar. Kapittulin er tann størsti parturin av Almennu byggisamtyktini, og tá tey viðurskiftini, ið eru umrødd í BK17, eru tikin úr Almennu byggisamtyktini, er tað eisini hesin kapittulin, ið fyllir meginpartin av Almennu byggisamtyktini.

   Broytingin av teimum byggifyriskipandi ásetingunum er býtt í tveir partar:

   - Raðfylgja og orðagreiningar; Raðfylgjan av ásetingunum í teimum ymisku økjunum var ymisk og orðað ymiskt. Fyrsta stigið í endurskoðanini av teimum byggifyriskipandi ásetingunum var at skipa ásetingarnar eins, við t.d. at brúka tær somu orðingarnar og raðfylgjuna. Somuleiðis

var tørvur á at greina nøkur av orðunum, m.a. orðið “miðstaðabygging” nærri, sí skjal *Byggifyriskipandi ásetingar.*

- Broytingar av ásetingum; Nakrar fáar broytingar eru av ásetingunum fyri tey ymisku økini, t.d. er áseting um umhvørvisflokking koyrd inn í øllum økjum, har bústaðir og vinna er blandað.

  Størsta broytingin er í B-vinnuøkjunum. Áðrenn endurskoðanina vóru 11 ymisk vinnuøki, og í fleiri av teimum eru frábrigdini lítil. Yvirskipað eru tey býtt í 4 bólkar: 2 ymisk øki til havnavirksemi, 3 ymisk øki til vinnuvirki við “lættari” vinnu, 3 ymisk øki til vinnuvirki við “tyngri” vinnu og 2 ymisk øki, sum eru blandað vinna og miðstaðabygging.

  Tað, at tað eru so nógv ymisk vinnuøki, kann tykjast fløkjut og hevur eisini fleiri broytingar við sær, av tí at munirnir teirra millum eru so lítlir. Ynskið er at fækka um hesi vinnuøkini, soleiðis at ásetingarnar í Almennu byggisamtyktini verða heldur breiðari, meðan man, um neyðugt, kann gera neyvari ásetingar fyri ymisk øki í serstakari byggisamtykt. Hetta við tí fyri eyga, at færri broytingar verða í tí almennu byggisamtyktini, meðan man í teimum serstøku byggisamtyktunum kann taka atlit til ítøkiligar verkætlanir. Soleiðis kann man fremja ein hugburð og siðvenju, har tann Almenna byggisamtyktin verður tann støðuga, varandi skipanin av býnum, meðan tær serstøku byggisamtyktirnar taka atlit til gongdina í samfelagnum, politikkir, ætlanir o.s.fr.

  Uppskotið til endurskoðanina av B-vinnuøkjunum er gjørt út frá meginreglunum, sum eru nevndar omanfyri, og eftir endurskoðanina eru tey 11 vinnuøkini minkaði niður í 6 ymisk vinnuøki: 2 til havnavirksemi, 2 til vinnuvirki við “lættari” vinnu og 2 til vinnuvirki við “tyngri” vinnu.

  Sí annars nærri frágreiðing um broytingar av byggifyriskipandi ásetingum í skjalinum *Byggifyriskipandi ásetingar B og C øki.*

Nøkur avleidd mál standast av endurskoðanini av Almennu byggisamtyktini:

- Ein avleiðing av at hava eina meginreglu, har økini (t.d. vinnuøkini) gerast færri er, at fleiri serstakar byggisamtyktir skulu gerast, og er neyðugt at gera hesar, samstundis sum at endurskoðaða Almenna byggisamtyktin verður sett í gildi.
- Av tí at tær serstøku byggisamtyktirnar eru heimilaðar í tí Almennu byggisamtyktini, og at hendan nú verður endurskoðað, er somuleiðis neyðugt at gera broytingar í nøkrum av teimum serstøku byggisamtyktunum, samstundis sum at endurskoðaða Almenna byggisamtyktin verður sett í gildi, sí skjal *Yvirlit yvir avleidd mál.*

**Viðmerkingar frá øðrum deildum:**
Í stýrisbólkinum vóru:
Marin Katrina Frýdal (Politiskt umboð)
Jákup Dam (Politiskt umboð)
Tróndur Sigurðsson (Politiskt umboð)
Marius Müller (Tekniskur stjóri)
Óli á Grindafløtti (Leiðari á byggi- og umhvørvisdeildini)
Birita Wardum(Býararkitektur)/Barbara Mikkelsen (Leiðari á Býarskipanardeildini)

Í arbeiðsbólkinum vóru:
Rakul Vest Højgaard (Býarskipanardeildin)
Hans Nielsen (Tekniska deild)
Hans Suni Eiriksfoss (Byggi- og umhvørvisdeildin)

Harumframt hevur hoyring og framløga verið fyri umboðum fyri býarskipanardeildina, byggi- og umhvørvisdeildina, teknisku deild, stjórnarskrivstovuna, og havnarskrivstovuna.

**Skjøl:**
- *Endurskoðan í mun til BK17,* journal nr. 17/02748-25.
- *Byggifyriskipandi ásetingar,* journal nr. 17/02748-25.
- *Byggifyriskipandi ásetingar B og C øki,* journal nr. 17/02748-25.
- *Endurskoðan av almennu byggisamtyktini 17.06.20,* journal nr. 17/02748-26.
- *Endurskoðan av býarskipanini 17.06.20,* journal nr. 17/02748-26.
- *Yvirlit yvir avleidd mál,* journal nr. 17/02748-27.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at:
- Samtykkja uppskotið til endurskoðaða Almenna byggisamtykt sambært skjølunum *Endurskoðan av almennu byggisamtyktini 17.06.20* og *Endurskoðan av býarskipanini 17.06.20.*
- Samtykkja, at umsitingin fer undir at gera og broyta tær serstøku byggisamtyktirnar, sum verða beinleiðis ávirkaðar av endurskoðaðu Almennu byggisamtyktini.
- Beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 23. juni 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Helena Dam á Neystabø, atkvøður blankt.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 23. juni 2020:** Ein meiriluti, Turið Horn, Gunvør Balle, Bergun Kass og Bjørghild Djurhuus, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Halla Samuelsen, atkvøður blankt.

**Tekniska nevnd 23. juni 2020:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Helena Dam á Neystabø, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri, ongari ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn, Jákup Dam, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at uppskotið til endurskoðan av almennu byggisamtyktini hevur ligið til almenna hoyring, eru 4 viðmerkingar innkomnar. Niðanfyri er ein samandráttur av teimum og viðmerking frá umsitingini:

1. Viðmerking 1 sí skjal *Viðmerking 1.*
   Matr. nr. 1292n við Oknarvegin varð broyttur frá C3 til A1 í 2018, í sambandi við bygging av gistingarhúsi í økinum. Tá sendu grannar eina áheitan um, at økið ikki fór at verða nýtt til høg raðhús ella blokk á stykkinum. Nú senda teir somu áheitan við hesum uppskotunum:
   a) Áheitan um at varðveita matr. nr. 1292n við Oknarvegin sum verandi grønan blett við lyngi og klettum á.
   b) Annar møguleiki er at gera parkeringsøki har, sum t.d. kann nýtast í sambandi við tiltøk í Gundadali.

Ad. 1. Tað verður ikki ásett við byggisamtykt, um matr. nr. 1292n við Oknarvegin verður varðveittur sum grønur blettur ella sum parkeringsøki. Ongar ítøkiligar ætlanir eru við matr. nr. 1292n, og tí ber ikki til at siga, hvør nýtslan av hesum verður í framtíðini.

2. Viðmerking 2, sí skjal *Viðmerking 2.*
   a) "KAP. I §4
   Í almennu byggisamtyktini (2017 og 2020) stendur skrivað, at byggiloyvi hevur gildi í eitt ár frá tí degi, at tað er játtað. Eg havi upplivað, at fyrisitingin arbeiðir út frá, at byggiloyvið hevur gildið í tvey ár, sum eisini stendur í standard tekstinum í útflýggjaðum byggiloyvum. Annaðhvørt eigur byggisamtyktin ella praksis at verða broytt, soleiðis at hesi samsvara."
   b) "KAP. II §28.
   Á blaðsíðu 23 stendur skrivað, at bygningar í 3. Grundumráði skulu standa í minsta lagi 2,5 m frá markinum. Eg dugi ikki at skilja, hví hendan reglan ikki er galdandi fyri onnur grundumráði. Tildømis er 2. Grundumráði somuleiðis bústaðarøki, og tykist tað løgið, at tað ikki eisini her er eitt minsta mark fyri frástøðu, tá nýbygging fer fram."
   c) "KAP. III §3
   Á blaðsíðu 25 stendur skrivað, at í 1. og 2. grundumráði skal bera til at gjalda til ein parkeringsgrunn, um tað ikki ber til at útvega øll tey ásettu parkeringsplássini. Eg havi verið í sambandi við fyrisitingina, ið hevur játtað, at ætlanirnar um at seta á stovn parkeringsgrunn eru sleptar. Tískil eigur hendan reglan at verða strikað. At loyva fólki at byggja uttan parkeringspláss tykist burturvið soleiðis sum ferðslan er í miðbýnum í dag."
   d) "Annað
   Ein regla átti at verið løgd afturat ið tryggjar, at nýbygging ella umvæling ikki hevur við sær, at grannar fara at síggja beint inn til hvønn annan."

Ad. 2, a. Hetta verður broytt til 2 ár, soleiðis at samsvar er við Byggilógina, Bygningskunngerðina og praksis.

Ad. 2, b. 1. grundumráði er eitt samanhangandi miðstatt býarøki, 2. grundumráði er eitt umráði, ið liggur upp at miðstadda býarøkinum og 3. grundumráði eru teir partar av kommununi, ið annars eru lagdir til byggingar. Bygging í 2. grundumráði er tættari enn í 3. grundumráði, og bygging í 1. grundumráði er somuleiðis tættari enn í 2. grundumráði. Hetta sæst m.a. aftur við at grundstykkini eru minni, byggi- og nýtslustigini eru er hægri og mest loyvda hædd er hægri. Í summum førum verður harumframt loyvt, at samanbyggja hús, og at hús verða sett í veglinju. Hetta er alt við til at skapa ynskta dámin í bústaða- og miðstaðaøkinum. Av tí at grundstykkini í 2. Grundumráði ofta eru lítil, er ofta ikki møguligt, at hava eina frástøðu á 2,5 m frá marki.

Ad. 2, d. Um ein tílík regla skuldi verið við í Almennu byggisamtyktini, so átti hon at staðið undir kapitlinum "Innrætting av húsum". Hesin kapitulin er tikin úr Almennu byggisamtykini, og ístaðin verður Bygningskunngerðin nýtt. Í BK17, kap. 2.3.3., stik 2 stendur annars:

"*Við ásetingum av fráleikum sbrt. Stk. 1 skal annars tryggjast, at:*
1) *Takvatn verður hildið á egnum grundøki.*
2) *Vindeygu, altanir o.tíl. ikki hava við sær, at grannar í ov stóran mun síggja inn til hvønn annan. Ásetingin er bæði galdandi fyri aðra bygging á sama grundøki og bygging á grannagrundøkinum."*

3. Viðmerking 3, sí skjal *Viðmerking 3.*
   Ynskt verður at ogning hjá viðmerkjara, matr. nr. 733b, Tórshavn, sum í dag liggur sum D1 øki, verður broytt, soleiðis at til ber at stykkja út til sethús. Hon vísir á, at ásetingarnar fyri fleiri av ognunum í økinum eru broyttar seinastu árini, og ynskir somuleðis at fáa loyvi at stykkja út til sethúsabygging.

Ad. 3. Matr. nr. 733b liggur sum partur av einum størri samanhangandi D1 øki og er grøna bindiliðið millum grøna geiran fram við R.C. Effersøes gøtu og grøna økið við Hálsatjørn. Yvirskipað er ynski hjá Tórshavnar kommunu at varðveita D1 økini í kommununi, og av tí at matr. nr. 733b er partur av einum samanhangandi grønum øki, verður mælt frá at broyta hendan til byggiøki.

4. Viðmerking 4, sí skjal *Viðmerking 4.*
   Mótmælisskrivið vísir eina gjøgnumgangandi ónøgd við uppskotið til endurskoðaðu byggisamtyktina við sjónarmiðum so sum:
   - "Ein byggisamtykt má metast sum eina avtala millum myndugleika og Bústaðar, Vinnuøkið ella annað tilskila. At broyta hettar er avtalu brot."
   - "Orði Byggilist verður innan økið hjá Tórshavnar Kommunu. Einans brúkt í nostalgiskum samanhangi, eftir broytingina."
   - "Sum nú er, hevur býurin eina byggisamtykt, sum gevur møguleikar, sum tann nýggja forðar fyri."

Ad. 4. Høvuðsendamálið við at endurskoða almennu byggisamtyktina, er at endurskoða byggisamtyktina í síni heild, skipa ásetingar eins og at endurskoða í mun til Bygningskunngerðina 2017 (BK17). Í endurskoðanini er arbeitt við trimum høvuðsyvirskriftum:

1. **Endurskoðan í mun til BK17**, har tað mesta av tí, sum stendur í BK17, verður tikið úr Almennu byggisamtyktini, soleiðis at yvirskipað viðurskifti, so sum brunaviðurskifti, konstruktión, orka o.s.fr., verða reguleraði við BK27, sum er galdandi fyri alt landið.
2. **Endurskooðan av býarskipanini** (kortinum), snýr seg í størstan mun um tillagingar í mun til markaviðurskifti, broyting, soleiðis at samsvar er við veruliga virksemið í økinum og broyting í sambandi við at ásetingar fyri økið eru broyttar.
3. **Endurskoðan av byggifyriskipandi ásetingum,** snýr seg um at skipa ásetingarnar eins og nýta somu orðingar. Nakrar fáar broytingar av ásetingum eru, t.d. er áseting um umhvørvisflokking í økinum, har bústaðir og annað virksemi er blandað, umframt at í ávísum førum verður krav sett um løðistøðir til el bilar. Harumframt var ynski at fækka og einkla tey ymisku økini í byggisamtyktini, og eru hesi farin frá 25 ymiskum niður í 19 ymisk.

Mett verður, at hetta gevur eina almenna byggisamtykt, sum er lættari at skilja og brúka – hjá borgarum og hjá umsiting.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta ásetingina um, at byggiloyvi hevur gildi í eitt ár, til at hava gildi í tvey ár, men annars at halda fast í uppskotinum, sum samtykt á býráðsfundi 25. juni 2020 og beina málið í býráðið.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 05. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 06. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Einmælt samtykt.

## 240/20 Broyting av almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 894a og 913, frá D1 til A1

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.10.2020 | 186/20 | 19/04432-5 |
| 2 Fíggjarnevndin | 28.10.2020 | 289/20 | 19/04432-5 |
| 3 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 240/20 | 19/04432-5 |

**Upprunin til málið:**
1. november 2019 sendu eigarar av matr. nr. 913 og matr. nr. 894a umsókn til Tórshavnar kommunu, um at broyta markið millum A1 øki og D1 øki, soleiðis at húsini á teirra matriklum ikki longur liggja lutvíst innanfyri D1 øki, sum verður lagt til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál.

Av tí at matr. nr. 894b liggur í sama øki og hevur somu byggisamtyktarligu avbjóðingarnar, verður hesin matrikulin viðgjørdur í sama máli.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Eigari av matr.nr. 894a ynskir at byggisamtyktin verður broytt soleiðis, at markið millum D1 og A1 fylgir matrikulmørkunum norðan fyri ognina. Eigarin av matr.nr. 913 ynskir, at markið verður flutt, soleiðis at í minsta lagi húsini eru innanfyri A1-øki.

Á ástaðarfundi 21.11.2019 bóðu eigarar av hesum trimum ognunum um, at byggisamtyktin verður rættað til, soleiðis at byggingin liggur innanfyri byggisamtyktarøki ið er ætlað til bygging, sí skjal *21-11-19_Fundarfrágreiðing_ástaðarfundur*.

Fyri at fáa greiðu á, hví bygningarnir liggja lutvíst innanfyri D1-øki, er søgan handan nevnda D1-øki kannað.

Fríøkið fram við Rættará eystan fyri Glasir hevur sín uppruna, tá gott 30.000 m$^2$ vórðu avsettir sum D1-øki í 1972. Økið øktist munandi (upp til 80.000 m$^2$) í sambandi við endurskoðan av almennu byggisamtyktini í 1982.

Bygningarnir á omanfyri nevndu matriklum, vórðu bygdir í ávikavist 1980 og 1987/88 og vóru tá innanfyri A1 øki, sum víst í viðhefta skjali *D1-øki 1982-1997*.

D1 økið varð víðkað aftur, hesaferð upp til umleið 92.000 m$^2$, sí skjal *Almenn byggisamtykti 20 juni 1996*. Tá varð D1 økið vaksið, soleiðis sum byggisamtyktin er í dag, og gjørdi tað, at bygningarnir á matr. nr. 913 og 894a og 894b endaðu lutvíst innanfyri D1 øki. Kort, ið vísa søguligu gongdina, eru á viðhefta skjalinum *Søguliga gongdin yvirlit 1972-2019*.

Einasta tekstlýsing, ið er funnin í skjalagoymslu av tí seinastu broytingini, er frá býráðssamtykt 30. mai 1996, og er soljóðandi: *"Samtykt at mæla býráðnum til at nýtt D3-øki verður lagt í Marknagili sambært býráðssamtykt frá 14. juni 1990 og **samstundis víðka smávegis D1-øki** og A2 økið í Marknagili."* sí skjal *Býráðssamtykt 30 mai 1996*. Eingin grundgeving sæst fyri, hví markið verður lagt júst har sum tað er lagt og ígjøgnum 3 sethús.

Eigarar av 894a hava í fleiri førum ynskt at útstykkja á ognini. Bæði í 2008 (*journal nr. 2007-3030*) og í 2016 (*journal nr. 16/04700*) verður umsókn noktað, tí at ognin liggur í D1 øki og A1 parturin av matriklinum er ov lítil.

Í 2017 (*journal nr. 17/02869*) verður søkt um at frámatrikulera fýra grundøkir, men byggi- og býarskipanarnevndin gekk ikki umsóknini á møti, vegna at ognin liggur í D1 øki, og at hetta er partur av einum størri fríøki.

Eigarar av matr.nr. 913 hava somuleiðis søkt um ymiskar broytingar, og fingið noktað umsókn, av tí at ognin liggur í D1 øki.

Seinast í 2018 (journal nr. 18/00986) ynskti umsøkjarin at sundurbýta 500 fermetrar kring bygningin, men fekk noktandi svar frá byggi- og býarskipanarnevndini orsakað av at ætlanin ikki er í samsvari við galdandi byggisamtykt.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingarnar fyri A1 øki eru m.a.:

- *Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð, og eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð og raðhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski. Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.*

Ásetingarnar fyri D1 øki eru m.a.:

- *Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tílíkt. Økið fram við Hoydalsá kann einans verða skipað og bygt sambært serstakari byggisamtykt fyri økið.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Býarskipanardeildin hevur trupult við at síggja orsøkina til, at markið varð flutt soleiðis sum tað varð í 1997.

Mett verður, at byggisamtyktarmarkið eigur at verða rættað, so bygningarnir aftur liggja sum tá teir vórðu bygdir.

Uppskot til nýtt mark millum A1-øki og D1-øki, sí skjal *Aftaná broyting*, er gjørt við støði í byggisamtyktarmarkinum áðrenn broytingina í 1997. Mett verður, at hetta skilmarkar eitt fríøki, ið verður lættari at fyrihalda seg til fyri eigarar og almenningin, av tí at linjan er greið og fylgir øðrum linjum í økinum.

Avleiðing av broytingini kann verða krav um endurgjald mótvegis kommununi frá teimum, ið áður hava fingið noktað loyvi, grundað á byggisamtyktarligar ásetingar. Hóast hetta verður mett, at markið eigur at verða rættað.

Skotið verður upp, at omanfyri nevndu matriklar skulu sundurbýtast, soleiðis at parturin sum liggur í A1 øki verður býttur frá partinum ið liggur í D1 øki. Hetta ger t.d. málsviðgerðina av byggimálum greiðari.

Gamlir servituttar á økinum eiga eisini at verða dagførdir, soleiðis at samsvar er við gøturnar, sum tær liggja í dag.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
*Journal nr.: 39/3.1995* Útdráttar – Útskrift úr gerðabókini hjá Tórshavnar býráð
*Journal nr.: 2007-3030* Claire og Poul Jákup Thomsen: Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 894a, Tórshavn
*Journal nr.: 2012-1293* Hákun Eysturlíð : Bjóðar kommununi part av matr. nr. 913, Tórshavn
*journal nr.: 16/04700* Fyrispurningur viðvíkjandi matr. nr. 894a, Tórshavn og svar frá byggideildini
*journal nr.: 17/02869* Uppskot um útstykkingarætlan á matr. nr. 894a, Suðuroyarvegur 16, Tórshavn
*journal nr.: 18/00986* Umsókn um loyvi at sundurbýta 500 fermetrar av matr. nr. 913, Tórshavn
*Journalnr.: 18/02377* Umsókn um byggiloyvi til terassu á matr. nr. 894a, Tórshavn

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

- *21-11-19_Fundarfrágreiðing_ástaðarfundur*, journal nr.:19/04432-3.
- *Áðrenn broyting*, journal nr.: 19/04432-6.
- *Aftaná broyting*, journal nr.:19/04432-6.
- *Søguliga gongdin yvirlit 1972-2019*, journal nr.: 19/04432-6.
- *D1-øki 1982-1997,* journal nr.:19/04432-6.
- *Almenn byggisamtykt. 20 juni 1996*, journal nr.:19/04432-6.
- *Býráðssamtykt 30. mai 1996*, journal nr.:19/04432-6.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

Um byggisamtyktin verður broytt, hækkar virðið á ognunum í mun til tá tær lógu innanfyri D1-øki. Avleiðingin kann verða, at fyrrverandi eigarar, ið hava fingið noktandi svar uppá umsóknir, senda endurgjaldskrav mótvegis kommununi.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna broytingina av almennu byggisamtyktini sambært kortskjali *Aftaná broyting.* Mælt verður somuleiðis til at góðkenna sundurbýti av matriklum, so teir fylgja markinum í byggisamtyktar broytingingini, og rætting av servitutti um gøtur, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina. Heitt verður á fíggjarnevndina at taka støðu til, um Tórshavnar kommuna ella eigari skal bera kostnaðin av sundurbýti.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at umsitingin tryggjar gonguleið gjøgnum matr. nr. 913, sambært fundarfrásøgn frá 21. november 2019, skjal nr. 19/04432-4.

**Fíggjarnevndin 28. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Einmælt samtykt.

# 241/20 Nýggj serstøk byggisamtykt fyri vindmyllur í Hoyvíkshaga

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 05.10.2020 | 47/20 | 20/00719-6 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.10.2020 | 187/20 | 20/00719-6 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 26.10.2020 | 211/20 | 20/00719-6 |
| 4 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 241/20 | 20/00719-6 |

**Upprunin til málið:**
Á býráðsfundi hin 23. mai 2019 varð samtykt at geva tilsøgn til, at vindmyllur kunnu setast upp í Hoyvíkshaga, m.a. treytað av at serstøk byggisamtykt verður gjørd fyri økið.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Útbygging av grønari orku minkar um brúk av dálkandi orkukeldum og mett verður, at tað er hóskandi at seta fleiri vindmyllur í øki, sum frammanundan hevur vindmyllur.

Ætlanin er at seta 6 vindmyllur upp, og hava hesar eina hædd á uml. 79 m upp til tornið, og veingjabreiddin er uml. 82 m. Soleiðis eru tær nakað hægri enn t.d. vindmyllurnar í Húsahaga, sum eru uml. 67 m høgar.

Økið, sum ætlanin er at seta vindmyllur á, er sambært Kommunuætlanini ikki partur av býarvakstrarøki fram til 2030.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í 4. Grundumráði, sum m.a. hevur hesar ásetingarnar:

*§ 26, stk. 1. 4. Grundumráði verður í høvuðsheitum nýtt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt.*

*Stk. 1, pkt. e. Harafturat kann onnur bygging og virksemi, sum ikki hóskar seg at liggja í bygdum øki, staðsetast í 4. Grundumráði.*

*Pkt. f. Øll bygging í 4. Grundumráði sambært § 25, stk. 2, litra d og e, skal gerast sambært serstakari byggisamtykt.*

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *Umsókn um byggiloyvi at reisa vindmyllur í Hoyvíkshaganum (Gellingarklett) tilhoyrandi Hoyvík, matr. nr. 139a,* journal nr. 19/01208
- *Lendi til vindmyllulund,* journal nr. 19/01609
- *Umsókn um byggiloyvi til smáttur á matr. nr. 1175l, Tórshavn,* journal nr. 20/02026

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**
Greiningar vísa, at partur av byggisamtyktarøki A1, D1 og F øki liggur innanfyri økið, har ljóðstøðið sambært ásetingunum ikki hóskar til bústaðabygging, sí appilsingula ringin á s. 1 í viðhefta skjali *Umhvørvisdálking*.

Kommunan hevur ikki í løtuni ítøkiligar ætlanir um at byggja bústaðir á hesum A1 økinum, men innan 20 ár er ikki óhugsandi, at bygt verður á hesum øki.

Hinvegin, so eru ítøkiligar ætlanir við matr. nr. 1175l, sum er partur av F økinum, sum liggur innanfyri appilsingula markið. 2. juni 2020 móttók kommunan umsókn um byggiloyvi til smáttur og kampingøki á matriklinum.

Staðsetingin av vindmyllunum kann ikki endaliga staðfestast, fyrr enn boriroyndir eru gjørdar í økinum og verður mælt til, at umsøkjari leggur seg eftir, at ljóðviðurskiftini órógva byggiøkini minst møguligt og flytur vindmyllurnar soleiðis, at F øki ikki verður órógvað av vindmyllunum.

Ein lítil partur av D1 økinum liggur somuleiðis innanfyri óljóðsmarkið, men mett verður, at útbyggingin av grønari orku vigar tyngri enn atliti til at verja ítøkiliga D1 øki við Villingadal.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Tekniska deild:
- Møguleikin fyri óhappi, og at dálking kann ávirka vatngóðskuna í byrgingini í Havnardali og Villingadali er lítil. Vandin er størri í byggifasuni, enn tá projektið er liðugt. Vandin liggur í, at olja so ella so kann setast oman í vatnbrunnin. Atlit mugu takast til tey akfør og maskinur, sum koma at arbeiða í økinum, og tiltøk mugu vera klár, um óvæntað dálking hendir.

Málið er til hoyringar hjá friðingarmyndugleikanum og hjá Landsverki.

Málið varð sent til hoyringar hjá SEV. Teir høvdu viðmerking um at serstaka byggisamtyktin somuleiðis átti at fevnt um ætlaðu vindmyllulundina hjá SEV. Hendan ætlanin er tó ikki komin eins langt og omanfyri nevnda vindmylluætlan, og tískil verður mælt til at bíða við at gera serstaka byggisamtykt fyri ætlanina hjá SEV.

**Skjøl**
- *Serstøk byggisamtykt fyri vindmyllur í Hoyvíkshaga,* journal nr. 20/00719-19
- *Umhvørvisdálking,* journal nr. 20/00719-20

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri vindmyllur í Hoyvíkshaga, treytað av:
- loyvi frá Yvirfriðingarnevndini og Landsverk
- at ljóðviðurskiftini órógva byggiøkini minst møguligt og at vindmyllurnar verða fluttar soleiðis, at F økið ikki verður órógvað.
- og beina málið í býráðið.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 05. oktober 2020:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Síðani seinastu viðgerð í byggi- og býarskipanarnevndini, eru nýggjar upplýsingar komnar í málinum.

Upplýsingarnar eru viðvíkjandi óljóðsmátingunum, og hvussu trupulleikarnir, við at partur av kampingøkinum á F økinum liggur innanfyri markið fyri óljóði, kunnu loysast.

Tá vindmyllurnar eru settar upp og smátturnar bygdar, verður mælt til at óljóðsmátingar verða gjørdar, fyri at staðfesta veruliga óljóðstøðið í økinum. Um mátingarnar vísa, at óljóðstøðið í F økinum er ov høgt, verður mælt til at vindmyllurnar, ið eru atvoldin til ov høga óljóðstøðið, steðga ella verða niðurreguleraðar tey tíðspunkt, tá óljóðið er ov høgt. Talan er um lutfalsliga fáar tímar á árinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri vindmyllur treytað av:
- Loyvi frá Yvirfriðingarnevndini og Landsverk.
- At ljóðviðurskiftini verða kannaði, tá vindmyllurnar eru settar upp og smátturnar í F økinum er bygdar. Um tað vísir seg, at óljóðstøðið er ov høgt í økinum, skulu viðkomandi vindmyllur steðgast ella niðurregulerast tey tíðspunkt, tá óljóðið er ov høgt.

og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Einmælt samtykt.

## 242/20 Umsókn um broyting av byggisamtykt og prinsipielt byggiloyvi til Vælveruhús

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.02.2020 | 26/20 | 20/00198-3 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 18.05.2020 | 96/20 | 20/00198-3 |
| 3 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 115/20 | 20/00198-3 |
| 4 Fíggjarnevndin | 21.10.2020 | 263/20 | 20/00198-3 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 26.10.2020 | 212/20 | 20/00198-3 |
| 6 Fíggjarnevndin | 28.10.2020 | 288/20 | 20/00198-3 |
| 7 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 242/20 | 20/00198-3 |

**Upprunin til málið:**
Hotel Føroyar eru í gongd við eina umfatandi útbygging av verandi hotelli, soleiðis at hotellið kemur at hava íalt 200 kømur eftir útbyggingina, sum eftir ætlan verður liðug á sumri 2020.

Í sambandi við útbyggingina, verður ein vælverudepil gjørdur í niðaru hædd í nýggju útbyggingini, á uml. 500 fermetrar. Vælverudepilin, sum í høvuðsheitum hýsir umklæðing, massagu, yoga og ymiska viðgerð, kemur at hava egna inngongd frá parkeringsøkinum vestan fyri hotellið.

Afturat hesum vælveruparti inni í hotellinum, ynskir hotellið at gera eitt minni sjálvstøðugt vælveruhús, á uml. 300 m$^2$, sunnan fyri hotellið, oman móti viðarlundini, sum skal hýsa tí 'váta' partinum av deplinum.

Tankin er, at almenningurin hevur atgongd til vælverudepilin, ikki bert gestir á hotellinum.

Fyri einum 3-4 árum síðani arbeiddi Gist og Vist við eini verkætlan um at leggja matstovuna KOKS í hettar økið sunnan fyri hotellið. Fyri at fáa bygningin at liggja so lágt í lendinum sum gjørligt, so varð byggisamtyktin fyri økið broytt, soleiðis at áleið 220 m$^2$ av ikki gróðursettum D1 øki á matr. nr. 1229 vóru lagdir út til C2 økið.

Ósbjørn Jacobsen Arkitektar søkja vegna Gist og Vist um:
• At sleppa at staðseta omanfyri nevnda vælveruhús áleið á sama stað, sum undanfarna KOKS verkætlan varð staðsett, tað vil siga at G&V framhaldandi sleppur at gera nýtslu av hesum 220 fermetrunum í nýggju verkætlanini.
• Prinsipielt byggiloyvi fyri verkætlan sambært viðhefta tilfari, skjal *Vælveruhús_Skitsuuppskot*.

Um so er, at tað er ynskiligt at 220 m$^2$ verða lagdar afturat økinum hjá viðarlundini, av øki hjá G&V, so vil G&V fegin finna eina loysn á tí.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í 2017 søkti Hotel Føroyar um at fáa loyvi til at byggja KOKS í økinum heilt oman móti viðarlundini í Kerjum – ein partur av hesi ætlan var innanfyri ogn kommununnar og lá í D1 øki og í skógfriðaðum øki, sí mál *Broyting av almennu byggisamtyktini fyri økið við Hotel Føroyar, matr. nr. 1229, Tórshavn*. Tískil var uppskot um broyting av almennu byggisamtyktini fyri øki, frá D1 øki til C2 øki sent friðingarmyndugleikanum til hoyringar. 14. desember 2017 gav Yvirfriðingarnevndin, við nøkrum treytum, loyvi til broytingina sí skjal *Viðmerkingar frá Yvirfriðingarnevndini 13.12.17*, og broytingin varð endaliga góðkend, sí viðhefta skjal *Broyting í almennu byggisamtyktini 14.03.17*.

Í sambandi við at tað alment kom fram, at ætlanirnar um at byggja KOKS í økinum við viðarlundina í Kerjum vóru sleptar, sendi Skógfriðingarnevndin hin 30. august 2018 kommununi eina áheitan um at broyta økið aftur til eitt D1 øki, av tí at fyrra loyvið var tengt at tí nágreiniliga virkseminum. Hesum tók Tórshavnar kommuna undir við og gav tilsøgn fyri, at økið varð broytt aftur til eitt D1 øki í sambandi við endurskoðanina av almennu byggisamtyktini. Somuleiðis varð tilsøgn givin Yvirfriðingarnevndini um, at Hotel Føroyar vórðu bidnir um at flyta vælverudepilin út um markið, og at málið varð sent friðingarmyndugleikanum til góðkenningar, áðrenn byggiloyvi varð givið, sí skjal *Hoyringssvar til Yvirfriðingarnevndina 09.04.19*.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingarnar fyri C2 øki eru m.a.:
- Umráðisparturin verður í síni heild lagdur til miðstaðaendamál, serstakliga ætlað stovnum, framsýningarhølum, samkomuhúsum, tónleikahøllum og øðrum mentunarligum stovnum og tílíkum, og til tænastuvirksemi, ið hava samband við hesi, skrivstovur, matstovur o.t.

Ásetingarnar fyri D1 øki eru m.a.:
- Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tílíkt. Økið fram við Hoydalsá kann einans verða skipað og bygt sambært serstakari byggisamtykt fyri økið.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Av tí at tilsøgn er givin Yvirfriðingarnevndini um, at økið, sum søkt verður um at byggja vælverudepilin á, verður broytt aftur til eitt D1 øki, má málið viðgerast, sum lá tað í D1 øki. Tískil verður mælt til, at vælverudepilin verður fluttur, soleiðis at hann liggur á matr. nr. 1175d og innanfyri C2 økið.

Um umsøkjarin framvegis ynskir at staðseta vælverudepilin inn á matr. nr. 1229, soleiðis sum tekningarnar í skjali *Vælveruhús_Skitsuuppskot vísa,* so má málið viðgerast av nýggjum, og sendast friðingarmyndugleikanum til nýggja hoyring.

Umsøkjarin hevur víst á øki, á leið 2000 fermetrar, ið plantast kann á, í staðin fyri økið sum liggur í skógfriðaða økinum, teir ynskja at byggja á.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *Broyting av almennu byggisamtyktini fyri økið við Hotel Føroyar, matr. nr. 1229, Tórshavn,* journal nr. 17/00940.
- *Broyting av almennu byggisamtyktini fyri økið við Hotel Føroyar, matr. nr. 1229, Tórshavn,* journal nr. 18/03313.

**Viðmerkingar frá øðrum deildum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl:**
- *Vælveruhús_Skitsuuppskot,* journal nr. 20/00198-7.
- *Broyting í almennu byggisamtyktini 14.03.17,* journal nr. 20/00198-8.
- *Hoyringssvar til Yvirfriðingarnevndina 09.04.19,* journal nr. 20/00198-9.
- *Viðmerkingar frá Yvirfriðingarnevndini 13.12.17,* journal nr. 20/00198-10.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at geva umsøkjaranum boð um, at vælverudepilin skal flytast, soleiðis at hann liggur á matr. nr. 1175d og innanfyri C2 økið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. februar 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Jákup Dam, samtykti at fara á ástaðarfund saman við umboði frá Skógfriðingarnevndini.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, mælir til at ganga umsóknini á møti.

**Ískoyti:**
20. mars 2020 var byggi- og býarskipanarnevndin á ástaðarfundi saman við umboði frá Skógfriðingarnevndini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. mai 2020:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Helena Dam á Neystabø og Bogi Andreasen, samtykti at ganga umsóknini á møti.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal og Turið Horn, tekur undir við tilmælinum og krevur málið fyri býráðið.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið hjá meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, trimum atkvøðum ímóti og tveimum blonkum.

Fyri atkvøddu: Bogi Andreasen, Bergun Kass, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Marin Katrina Frýdal, Gunvør Balle og Turid Horn.

Blankt atkvøddu: Annika Olsen og Jákup Dam.

**Ískoyti.**
Fyri at kunna fara undir bygging av nýggja vælverudeplinum er neyðugt, at P/F Gist & Vist ognar sær lendi upp til uml. 280 fermetrar av kommunalum lendi av matr.nr. 1229, og fær kommunan afturfyri samsvarandi fermetrar av lendi av matr.nr. 1175d, sum er ogn hjá P/F Gist & Vist.

Skógfriðingar nevndin setur sum treyt fyri hesum, at ein avtala um at gróðurseta 1.000 fermetrar verður gjørd innan 31.12.2020 og at neyva staðsetingin verður gjørd við leiðaran á Skógrøktini. Staðsetingin er ikki avtalað enn, men verður helst talan um eitt økið, sum liggur oman til matr.nr. 1229.

Av teimum 1.000 fermetrunum, sum skulu útleggjast til planting, verða sundurbýttir upp til uml. 280 fermetrar til kommununa, sum er sama fermetratal sum sum kommunan letur, og verður restin framvegis partur av matr.nr. 1175d, sum er ogn hjá P/F Vist og Gist, tó við áløgdum treytum um, at økið verður brúkt til gróðurseting, sí avtalu við Skógfriðingarnevndina.

Kommunan hevur umbiðið virðismeting av lendinum frá BetriHeim.

Sambært virðismeting pr. 15.10.2020 er mett virði á lendinum sum kommunan letur 1.000 kr/m2 og mett virði av lendinum sum kommunan fær 100 kr/m2.

P/F Gist og Vist, rindar munin sum er 900 kr/m2.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni, mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at gera avtalu um gerðabýtið við P/F Gist & Vist, um lendi upp til uml. 280 fermetrar til omanfyri nevndu treytir.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2020:** Samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Málið hevur verið til hoyringar hjá friðingarmyndugleikunum, og hevur Yvirfriðingarnevndin givið loyvi við treytum, sum Skógfriðingarnevndin setir, sí skjøl *Loyvi frá Yvirfriðingarnevndini* og *Viðmerkingar frá Skógfriðingarnevndini.*
Treytirnar hjá Skógfriðingarnevndini eru:

1) At ætlanin at byggja ein vælveruhús fylgir tekningum og framløgum lagdar fram á fundinum tann 11. september 2020.
2) At ein avtala um at gróðurseta 1000 $m^2$ verður gjørd innan 31.12.2020. Neyva staðsetingin verður gjørd í samráð við leiðaran á Skógrøktini, Rakul A. Dam.
3) Áskotið, sum kemur frá útgrevstrinum, verður lagt á hóskandi stað, eisini í samráð við leiðaran.
4) At ljós og óljóð frá komandi virkseminum ikki órógvar skógfriðaðu lundina.
5) At verandi atgongd verður varðveitt.

**Skjøl:**

- *Uppskot til gerðabýti,* journal 20/00198-35.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, kommunustjórin, leiðarin á Stjórnarskrivstovuni og býararkitekturin mæla til at samtykkja ætlanina við treytum, sum Skógfriðingarnevndin setur, gera avtalu um gerðabýtið samb. skjali *Uppskort til gerðabýti* við P/F Gist & Vist um lendi upp til uml. 280 fermetrar og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 28. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Einmælt samtykt.

## 243/20 Fíggjarætlan 2021, Tórshavnar kommuna

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.09.2020 | 243/20 | 20/03416-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 206/20 | 20/03416-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 05.10.2020 | 248/20 | 20/03416-1 |
| 4 Trivnaðarnevndin | 08.10.2020 | 34/20 | 20/03416-1 |
| 5 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 05.10.2020 | 41/20 | 20/03416-1 |
| 6 Vinnunevndin | 05.10.2020 | 75/20 | 20/03416-1 |
| 7 Tekniska nevnd | 06.10.2020 | 50/20 | 20/03416-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.10.2020 | 208/20 | 20/03416-1 |
| 9 Eldranevndin | 08.10.2020 | 16/20 | 20/03416-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 28.10.2020 | 291/20 | 20/03416-1 |
| 11 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 243/20 | 20/03416-1 |

**Upprunin til málið**
Fíggjarnevndin skal sambært kommunustýrislógini leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið í seinasta lagi 1. oktober.

Býráðið skal síðani viðgera uppskotið tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

Býráðið hevur fyrstu viðgerð 29. oktober og aðru viðgerð 26. november.

**Onnur mál, sum kunnu hava týdning fyri málið**
20/03322 Fíggjarætlan 2021 [Tórshavnar havn]

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Tøknilig framskriving**
Í juni mánaða bleiv gjørd ein tøknilig framskriving av fíggjarætlanini 2021. Kunnað varð um hesa framskrivingina í fíggjarnevndini 17. juni 2020.

Fortreytirnar fyri tøkniligu framskrivingini vóru varisligar vísandi til corona-óvissu, og avlopið til íløgur, frároknað Tórshavnar havn, varð tá mett til 133 mió.kr.

**Fíggjarætlan 2021, fortreytir**
Eftir kunning um tøkniligu framskrivingina í fíggjarnevndini hevur verið arbeitt víðari við uppskotinum til fíggjarætlan 2021 at leggja fyri fíggjar- og faknevndir og býráðið.

Í uppskotinum til fíggjarætlan 2021 er roknað við, at kommunuskattaprosentið og barnafrádrátturin framhaldandi verða ávikavist 19,00% og 8.000 kr.

Tiknar eru eisini við allar kendar framskrivingar og virksemisbroytingar. Í talvuni niðanfyri síggjast høvuðstølini býtt á kommunugreinar.

| 1.000 kr. | | Roknskapur 2019 | Ætlan 2020 | Ætlan 2021 | Broyting 2020/2021 pct. | kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | |
| **Inntøkur** | | | | | | |
| 20501 | Kommunuskattur | 846.629 | 846.694 | 873.135 | 3,1% | *26.441* |
| 20601 | Felagsskattur | 49.230 | 35.000 | 28.000 | -20,0% | *-7.000* |
| 20502 | Húsaleiguskattur | 1.293 | 2.000 | 2.000 | 0,0% | *0* |
| 20801 | Skattur af eftirlønarinngjøldum | 150.072 | 145.397 | 149.032 | 2,5% | *3.635* |
| 20802 | DIS, FAS og frádráttir | 37.616 | 35.353 | 35.353 | 0,0% | *0* |
| 20803 | Tíðaravmarkað flyting til eldraøkið | 0 | | | | |
| | **Inntøkur íalt** | **1.084.839** | **1.064.444** | **1.087.520** | **2,2%** | ***23.076*** |
| | | | | | | |
| **Rakstur** | | | | | | |
| §1 | Kommunal fyrisiting | 91.172 | 92.991 | 95.895 | 3,1% | *2.904* |
| §2 | Almanna- og heilsumál | 245.626 | 256.490 | 282.668 | 10,2% | *26.178* |
| §3 | Børn og ung | 191.563 | 193.131 | 200.198 | 3,7% | *7.067* |
| §4 | Undirvísing | 40.807 | 43.946 | 44.713 | 1,7% | *767* |
| §5 | Mentan og frítíð | 54.691 | 58.679 | 61.810 | 5,3% | *3.131* |
| §6 | Teknisk mál | 133.087 | 141.892 | 144.852 | 2,1% | *2.960* |
| §7 | Kommunal virkir TK | 77.731 | 77.485 | 79.064 | 2,0% | *1.579* |
| §7 | Kommunal virkir TH | -46.216 | -36.318 | -32.858 | -9,5% | *3.460* |
| | **Rakstur íalt** | **788.462** | **828.296** | **876.343** | **5,8%** | ***48.047*** |
| **Aðrar útreiðslur** | | | | | | |
| 20101 | Stuðul til rentuútreiðslur | 18.344 | 18.000 | 18.000 | 0,0% | *0* |
| 20910 | Aðrar inntøkur | 1.523 | 2.500 | 2.000 | -20,0% | *-500* |
| | **Aðrar útreiðslur íalt** | **19.867** | **20.500** | **20.000** | **-2,4%** | ***-500*** |
| | | | | | | |
| | **Úrslit áðrenn rentur** | **276.510** | **215.648** | **191.177** | **-6,3%** | ***-13.621*** |
| | | | | | | |
| **Rentur** | | | | | | |
| 20301 | Rentuútreiðslur TK | 477 | 1.200 | 800 | -33,3% | *-400* |
| 20301 | Rentuútreiðslur TH | | 5.500 | 5.500 | 0,0% | *0* |
| 20401 | Rentuinntøkur | -348 | 0 | 0 | 0,0% | *0* |
| | **Rentur íalt** | **826** | **6.700** | **6.300** | **6,6%** | ***440*** |
| | | | | | | |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **275.685** | **208.948** | **184.877** | **-11,5%** | **-24.071** |
| | | | | | | |
| | **Avdráttir** | **46.456** | **19.607** | **17.107** | -12,8% | *-2.500* |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **229.229** | **189.341** | **167.770** | **-11,4%** | **-21.571** |
| | | | | | | |
| | **Avlop til skattafíggjaðar íløgur hjá TK*** | **183.013** | **176.896** | **156.285** | **-11,7%** | **-20.611** |
| | | | | | | |

Búskaparráðið hevur júst lagt sína heystfrágreiðing framm. Ráðið væntar búskaparliga afturgongd í BTÚ í ár upp á -6,9% og ein vøkstur aftur komandi ár upp á 5,5%.

**INNTØKURNAR**
Partar av vinnuni hava merkt ein stoyt av corona. Hóast hetta ikki sæst so væl aftur í inntøkunum hjá kommununi higartil, er inntøkumetingin nú nakað varligari og lægri.

Kommunuskatturin er framroknaður við støði í inntøkunum fyrstu átta mánaðirnar í 2020 við einum mettum vøkstri í skattagrundarlagnum á 2,00% løgdum aftrat.

Inntøkurnar frá kommunuskattinum vaksa tá 3,1% ella 26,4 mió.kr upp í 873,1 mió.kr í mun til 846,7 mió.kr í fíggjarætlanini 2020.

Skattainntøkurnar av eftirlønargjøldum eru mettar til 149 mió.kr, sum er ein vøkstur á 2,5%.

Felagsskatturin er mettur til 28,0 mió.kr, sum er 7,0 mió.kr ella 20% lægri enn metingin í fjør. Orsøkin er, at summi rakstraravlop fara at verða lægri orsakað av corona.

Samlaðu inntøkurnar vaksa sostatt 23,1 mió.kr ella 2,2% upp í 1.087,5 mió.kr í mun til 1.064,4 mió.kr í fíggjarætlanini 2020.

Til samanberingar vuksu inntøkurnar íalt í fíggjarætlanini 2020 við 60,5 mió.kr ella 6,0% í mun til fíggjarætlanina 2019.

**RAKSTRARÚTREIÐSLURNAR**
Kommunan er enn sum áður í stórum vøkstri, og hevur hetta við sær munandi øking í virksmeminum, tænastunum og rakstrarútreiðslunum.

Rakstrarútreiðslurnar hjá kommununi íalt vaksa netto 48,0 mió.kr upp í 876,3 mió.kr úr 828,3 mió.kr. Hetta er ein vøkstur upp á 5,8% í mun til fíggjarætlanina 2020.

**Útbyggingarnar á eldraøkinum økja raksturin 2,00%-stig**
Vøksturin í kommununi sæst serliga aftur í vøkstrinum í útreiðslunum á eldraøkinum, har ið tveir nýggir deplar - tvey stór rakstrarstøð - verða tiknir í nýtslu fyrsta dagin.

Talan er um nýggja umlættingar- og rehabiliteringsdepilin URD upp í Hoyvík og nýggja demensdepilin á Tjarnargarði uppi í Stoffalág.

Út av nettovøkstrinum í rakstrarútreiðslunum á 48,0 mió.kr eru 43,8 mió.kr hækking í lønum, harav 17,4 mió.kr er hækking á eldraøkinum; fyrst og fremst frá nýggju deplunum.

Hækkingin á 17,4 mió.kr svarar til góð 2,00-%-stig í hækking í rakstrarútreiðslunum. Frároknað hesa lønarhækkingina var útreiðsluvøksturin 3,8% í mun til nú 5,8%.

**Lønirnar eru munandi partur av rakstrinum**
Lønirnar hjá kommununi, sum eru 60% av samlaðu bruttokostnaðunum og 75% av nettokostnaðunum, vaksa sum nevnt omanfyri 43,8 mió.kr í mun til fíggjarætlan 2020.

Av hesum er 15,2 mió.kr ella 35% av vøkstrinum lønardagføring fyri 2021 og so ein øking á 28,6 mió.kr, har ið størsti parturin er ísv nýggj størv á nýggju deplunum. Sí talvu niðanfyri.

Lønirnar eru dagførdar við kendum sáttmálabroytingum, og lagt er harumframt upp fyri, at onkrar sáttmálasamráðingar draga út.

| | Lønar-reguleing | Lønar-vøkstur | Íalt |
|---|---|---|---|
| §1 Kommunal fyrisiting | 2.254 | 471 | 2.725 |
| §2 Almanna- og heilsumál | 5.792 | 17.410 | 23.202 |
| §3 Børn og ung | 3.317 | 4.870 | 8.187 |
| §4 Undirvísing | 233 | 2.443 | 2.676 |
| §5 Mentan og frítíð | 766 | -133 | 633 |
| §6 Teknisk mál | 2.059 | 1.136 | 3.195 |
| §7 Kommunal virkir | 783 | 2.363 | 3.146 |
| | **15.204** | **28.560** | **43.764** |

Hædd er tikið fyri lógarbroytingum, býráðssamtyktum og virksemisbroytingum, ið fylgja av nýggjum íløgum, sáttmálabroytingum og líknandi.

Fólkavøksturin hevur týðandi ávirkan á rakstrararútreiðslurnar, og gongdin í fólkatalinum ávirkar bæði inntøkur og útreiðslur.

Miðskeiðís í 2020 vóru 22.216 fólk skrásett í kommununi, sum er ein vøkstur upp á 472 fólk ella 2,2% í mun til árið fyri.

**Høvuðsútreiðslutøl á greinunum**
Á **§ 1** Kommunual fyrisiting økjast nettoúreiðslurnar 3,1% ella 2,9 mió.kr, sum fer til sáttmálabundnar lønarhækkingar, býráðið og tænastumannaeftirlønir.

Nettoútreiðslurnar á **§ 2** Almanna- og heilsumál økjast íalt við 10,2% ella 26,2 mió.kr, herav 23,2 mió.kr er hækking í lønum.

Barnavernd hevur ein samlaðan vøkstur upp á 6%, ið er 2,2 mió.kr. Børn í fosturfamiljum hækkar 9,7% ella 1,5 mió.kr, og brúkaragjøld til børn á serstovni økjast við 0,9 mió.kr.

Á eldraøkinum er serliga talan um hækking í konto 2721 Røktartænastur 11,1 mió.kr (8,0%). Harav eru 3 mió.kr uppraðfesting av røktarøkinum umframt fígging til 9 nýggj búpláss.

Konta 2722 Tilboð hækkar við 8,7 mió.kr (30,3%) ísv umlættingar- og rehabiliterings-depilin og demensdepilin á Tjarnargarð, sum báðir standa klárir um ársskiftið.

Kontan fyri lógarbundna ansingarsamsýning økist 632 tkr, tí fleiri ansarar eru í skipanini.

Játtanin til Heilsuhúsið økist 3,8 mió.kr til rakstur av nýggju deplunum og av reingerðar-tænastuni, sum nú er fast tilboð.

Nettoútreiðslurnar á **§ 3** Børn og ung fylgja í høvuðsheitum barnatalinum, og økjast útreiðslurnar 3,7% ella 7,1 mió.kr.

Sum liður í at umskipa og styrkja tilboð og tænastur til børn við serligum tørvi á dagstovnunum og dagstovnum við serstovu, verður skipað serlig normering og fígging á 4 mió.kr. Talan er her um eina meirnormering upp á 4,0 mió.kr á § 3.

Eisini er nú meirnormeringin frá í fjør upp á 4,5 mió.kr skrásett og fíggjað varandi á hesum rakstrarstað. Útreiðslur til systkinaavsláttur vaksa 900 tkr.

Nettoútreiðslurnar á **§ 4** Undirvísing hækka 1,7%, ið er 0,8 mió.kr. Játtanin fylgir metta næmingatalinum. Størsti vøksturin er í samband við nýggja Skúlan á Fløtum.

Nettoútreiðslurnar á **§ 5** Mentan og frítíð hækka 5,3% svarandi til 3,1 mió.kr samsvarandi øktum virksemi. Av hesum eru 600 tkr øking í lønum.

Stuðul til ítrótt økist 550 tkr, nú ítróttarhøll í Skúlanum á Fløtum legst aftrat, og kontan Ítróttaranlegg økist 588 tkr í høvuðsheitum av somu orsøk.

Nettoútreiðslurnar á **§ 6** Teknisk mál økjast við 2,1% ella 3,0 mió.kr. Av hesum eru 1,1 mió.kr. lønir ísv økt virksemi.

Fleiri bygnings-fermetrar eru at viðlíkahalda, m.a Umlættingardepilin, Býlingshúsið vesturi á Flat, Finsen-hallirnar og Skúlin á Fløtum,

Nettoútreiðslurnar á **§ 7** Kommunal virkir økjast við 12,2%, sum er 5 mió.kr. Umframt játtnina til Tórshavnar havn er tað serliga vøkstur í játtan til renovatión á knappar 2,4 mió.kr og 1 mió.kr fyri Bussleiðina.

-----

Í fyriliggjandi uppskoti til fíggjarætlan við nevndu fortreytum og virksemisbroytingum verður úrslit áðrenn rentur 191,2 mió.kr.

Úrslit áðrenn avdráttir og íløgur verður 184,9 mió.kr. Avlop til skattafíggjaðar íløgur verður 156,3 mió.kr.

Er avlopið til skattafíggjaðar íløgur lægri enn samlaðar íløgur, má munurin fíggjast við antin meiri inntøku, tøkum peningi ella lántøku.

Býráðið ásetir skattaprosent og barnafrádrátt og kann umvegis hesi bæði broyta fortreytirnar fyri fíggjarætlanina.

**Tilmæli:**
Sambært kommunustýrislógini skal fíggjarnevndin leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið innan 1. oktober.

**Fíggjarnevndin 23. september 2020:** Framlagt og beint í býráðið.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Framlagt.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 05. oktober 2020:** Framlagt.

**Vinnunevndin 05. oktober 2020:** Framlagt.

**Mentamálanevndin 05. oktober 2020:** Framlagt.

**Tekniska nevnd 06. oktober 2020:** Framlagt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. oktober 2020:** Framlagt.
Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at heita á fíggjarnevndina um at útvega játtan til at seta fleiri fólk í starv á byggideildini, vísandi til skjal nr. 20/03416-9.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Helena Dam á Neystabø, atkvøða blankt.

**Trivnaðarnevndin 08. oktober 2020:** Framlagt.

**Eldranevndin 08. oktober 2020:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Nýggj inntøkumeting av eftirlønarskatti og flyting vegna DIS, FAS og frádráttir eru komin frá Fíggjarmálaráðnum.

Í uppskotinum til fíggjarætlan 24.09.20 var metingin 184,4 mió. Nýggja metingin er kr. 188,6 mió, tvs 4,2 mió hægri.

**Fíggjarnevndin 28. oktober 2020: Ein meiriluti, Annika Olsen, Bergun Kass og Gunvør Balle, taka undir við fyriliggjandi fíggjarætlanaruppskoti við hesum broytingum:**

| | | |
|---|---|---|
| **Inntøkumeting** | **Mettar meirinntøkur í eftirlønargjaldi og DIS, FAS og frádráttum** | **4.200** |
| | | |
| **Broyting til 1. viðgerð** | **Nevndarviðgerð** | |
| §6 - 6175 | Yvirtøka av Gundadalshøllini | 1.000 |
| §6 - 6275 | Gamla brúgv um Sandá | 2.500 |
| §6 - 6275 | Vetrarfriðing | 700 |
| | | |
| | | **4.200** |

Málið beint í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, atkvøða blankt.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við fyrstu viðgerð við 7 atkvøðum fyri, ongari ímóti og 6 blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

## 244/20 Eykajáttan oktober 2020

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 28.10.2020 | 292/20 | 20/03794-1 |
| 2 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 244/20 | 20/03794-1 |
| 3 Býráðsfundur | | | 20/03794-1 |

**Upprunin til málið:**
Inntøkurnar í árinum hava verið hægri enn mett, og gevur hetta møguleika fyri at hækka inntøkur og útreiðslur í inniverandi fíggjarætlanin. Inntøkur frá felagsskattinum í 2020 hava verið 19,7 mió.kr hægri enn upprunaliga mett. Inntøkur higartil í ár annars eru áleið 3% hægri enn mett í fíggjarætlanini.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Krav til eykajáttan**
Eykajáttan krevst, tá ið ein samtykt fíggjarætlan verður broytt, verið seg hækking ella lækking av inntøkum og/ella útreiðslum. Uppskot til fígging skal altíð fylgja við eini eykajáttan. Eykajáttanir skulu vera samtyktar í býráðnum við aðru viðgerð innan 31. desember í fíggjarárinum.

Í árinum er játta av tøkum peningi til niðanfyri standandi:

**Skúlin á Fløtum, innbúgv og kt-útgerð**
Víst verður til mál 14/03408 Nýggjur skúli í vesturbýnum, har ið Býráðið 28. mai 2020 og 11. juni 2020 við eykajáttan samtykti at játta 6,82 mió.kr til innbúgv og útgerð.

***Umlættingar- og endurvenjingardepiln, endurgjald til eigarafelag***
Víst verður til mál 20/01297 30. apríl 2020, har ið Býráðið samtykti at játta 2.246.086 kr til eigarafelagið fyri luttøku kommununna í útstykkingini.

***Aðrar inntøkur***
Eftir at m.a útreiðslur í samband við corona eru rindaðar av hesi kontu, er neyðugt at 1,3 mió.kr verða játtaðar, um kontan ikki skal hava hall.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |

| | Býráðsfundur<br>29. oktober 2020 | Blað nr.: 1037 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, miðfyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin mæla fíggjarnevndini til at umrøða málið.

**Fíggjarnevndin 28. oktober 2020:** Samtykt at játta av tøkum peningi soleiðis:

| **Eykajáttan oktober** | |
|---|---|
| Afturkeyp av grundøki Karlamagnussarbreyt | 4.600 |
| Ferðslutrygd, gøtur, spælipláss Karlamagnusarbreyt | 3.000 |
| Spælipláss í kommununi | 2.000 |
| Býlingshúsið Vesturi á Flat, útiøki | 1.000 |
| Endurvenjing | 1.000 |
| Útkalliskipan til sløkkiliðið | 980 |
| Heilsutænastur í Nólsoy | 800 |
| Leigusáttmáli Drotning Ingridar | 640 |
| Felagshús til ítrótt á Tórsbreyt | 500 |
| Fablab | 350 |
| Vælferðartøkni | 200 |
| Listasavnið | 150 |
| Byggimálsavgreiðsla | 900 |
| Fyrisitingartímar til leiðarar á dagstovnaøkinum | 2.300 |
| | **18.420** |

Málið beint í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

| | Býráðsfundur<br>29. oktober 2020 | Blað nr.: 1038 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

## 245/20 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2020

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 27.02.2020 | 64/20 | 20/00203-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 48/20 | 20/00203-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 01.04.2020 | 83/20 | 20/00203-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 22.04.2020 | 106/20 | 20/00203-1 |
| 5 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 86/20 | 20/00203-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 20.05.2020 | 138/20 | 20/00203-1 |
| 7 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 110/20 | 20/00203-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 17.06.2020 | 181/20 | 20/00203-1 |
| 9 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 160/20 | 20/00203-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 16.09.2020 | 235/20 | 20/00203-1 |
| 11 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 207/20 | 20/00203-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 21.10.2020 | 268/20 | 20/00203-1 |
| 13 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 245/20 | 20/00203-1 |

**Upprunin til málið:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>29. oktober 2020 | Blað nr.: 1039<br><br>Formansins merki: |

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 27. februar 2020:** Framlagt.

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 01. apríl 2020:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2020:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar og mars at góðkenna.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2020:** Framlagt.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mai verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2020:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri juni, juli og august verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 16. september 2020:** Framlagt.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri september verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2020:** Framlagt.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Einmælt samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>29. oktober 2020 | Blað nr.: 1041 |
| | Formansins merki: |

# 246/20 Frítíðartilboð til 3. flokk í Badmintonhøllini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 246/20 | 20/04036-1 |

**Upprunin til málið:**
Tróndur Sigurðsson biður um at fáa málið á skrá til komandi býráðsfund.

Hann biður somuleiðis vegna Javnaðarflokkin um at fáa sett hetta uppskot fram til atkvøðugreiðslu.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Uppskot at seta Frítíðartilboð til 3. flokk á stovn í Badmintonhøllina.

Frítíðarskúlin í Badmintonhøllini hevur verið ein sólskinssøga. Skúlabørnini úr Sankta Frans skúla í 1. og 2. flokki stórtrívast í Badmintonhøllini, hóast hølisumstøðurnar eru sera trongar.

Nú er avgerð tikin um at seta fyribils bingjur omanfyri Badmintonhøllina, so at frítíðarskúlin kann hýsa øllum børnunum í 1. og 2. flokki, og tað er ivaleyst gott.

Tað loysir tó ikki avbjóðingina hjá Badmintonhølini at bjóða næmingum í 3. flokki eitt frítíðartilboð, sum bæði foreldur og næmingar hava eftirlýst.

Havnin og serliga miðbýurin í Havn er í støðugum vøkstri, og tað er ein sannroynd, at miðbýarbørn í 3. flokki hava tørv á einum skipaðum frítíðartilboðið aftaná vanliga skúlatíð. Onga staðni í Norðurlondum arbeiða foreldur so nógv og so leingi sum í Føroyum. Tað merkir, at nógv børn eru ov einsamøll aftaná skúlatíð.
Frítíðarskúlin í Badmintonhøllini hevur prógvað, at hann megnar at geva eisini børnum í 3. flokki eitt mennandi og mentandi tilboð – eins og kropsligar og heilsugóðar avbjóðingar. Men tey hava ikki pláss og játtan til endamálið í Badmintonhøllini.

Hvørt einasta ættarlið av børnum hevur ómetaliga stóran týdning, og vit hava skyldu til at skipa trygg viðurskifti fyri øll børn, sum ikki eiga at noyðast at vera einsamøll fleiri tímar hvønn dag.

Tí fara vit í Javnaðarflokkinum at skjóta upp, at fyrispurningurin frá foreldrunum, sum hava børn síni har, um at seta frítíðartilboð til 3. flokk á stovn í Badmintonhøllini verður svaraður játtandi beinanvegin.

Játtan skal útvegast til uml. 2 ársverk, eins og høli skulu útvegast at seta upp bráðfeingis í sambandi við badmintonhøllina í Gundadali. Viðvíkjandi starvsfólkakostnaði er broytingin í mestan mun útreiðsluneutral.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

| | **Býráðsfundur**<br>29. oktober 2020 | Blað nr.: 1042<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Javnaðarflokkurin mælir býráðnum til at samtykkja, at frítíðarskúlin í Badmintonhøllini eisini hevur frítíðartilboð til 3. flokk í Sankta Frans skúla, fíggjað av kontu 3216 Verkætlanir á ungdómsøkinum, 3. flokkur, og at útvegað verða bráðfeingis fyribilshøli.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Atkvøtt varð um uppskot frá Gunvør Balle um at beina málið aftur í nevnd, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, 6 atkvøðum ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Málið beint í Mentamálanevndina.

# 247/20 Ábøtur á venjingarrúm í Høllini á Hálsi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 247/20 | 20/04037-1 |

**Upprunin til málið:**
Tróndur Sigurðsson biður um at fáa málið á skrá til komandi býráðsfund.

Hann biður somuleiðis vegna Javnaðarflokkin um at fáa sett hetta uppskot fram til atkvøðugreiðslu

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Uppskotið snýr seg í stuttum um, at venjingarrúmið treingir til ábøtur, og at feløgini hava lagt nógv sjálvboðið arbeiði, í tað sum er gjørt.

Eins og onnur feløg í kommununi hava fingið stuðul til hesa skilagóðu íløgu, skal høllin á Hálsi eisini raðfestast á sama hátt sum onnur feløg í kommununi.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Javnaðarflokkurin mælir býráðnum til at játta kr. 500.000 til endamálið av kontu 5717 Ítróttaranlegg av meirinntøkum.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Atkvøtt varð um soljóðandi broytingaruppskot frá einum samdum býráði: Mælt verður til at játta kr. 500.000 til ítróttaranlegg til vektrúm í Høllini á Hálsi at fíggja av meirinntøkum.

Broytingaruppskotið varð einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

## 248/20 Kunning/fráboðanir í 2020 til býráðið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 248/20 | 20/00201-1 |

Kunning/fráboðanir til býráðið 24.06.2020:

- Bátahylur í Álakeri

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Eingi mál undir kunning.

## 249/20 Møguligt keyp av trøð í Hoydølum. Matr.nr. 16b, Hoyvík.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.08.2018 | 220/18 | 18/02670-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.11.2018 | 307/18 | 18/02670-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.03.2019 | 68/19 | 18/02670-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.10.2020 | 184/20 | 18/02670-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 28.10.2020 | 276/20 | 18/02670-1 |
| 6 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 249/20 | 18/02670-1 |
| 7 Býráðsfundur | | | 18/02670-1 |

**Upprunin til málið:** Trøðin stendur á sølulista hjá meklara.

**Lýsing av málinum – samandráttur.** Trøðin matr.nr. 16b, Hoyvík, er til víddar 10.616m2, harav vegur 983m2, og liggur í D1 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar Kommunu, sum er lagt til almenning, náttúrufriðingar – mentanarlig endamál og tílíkt.
Serstøk byggisamtykt er galdandi fyri økið. Um nýtslu økisins framgongur, at økið verður í síni heild lagt til alment fríøki, traðarbrúk og til nátturufriðingar- og gróðursetingar endamál og verður sundurbýtt á eindirnar A,B og C. Trøðin hoyrir til økið A. ( Økið úr Boðanesgjógv og niðan til Hvítanesvegin ) er partur av frílendis ætlanini fyri Boðanes Hoydalar.

Á heimasíðuni hjá Umhvørvisstovuni, verður skrivað um Sanatoriutrøðna.
Gamla Sanatoriutrøðin er ogn hjá Innlendismálaráðnum, og løgd til Umhvørvisstovuna at umsita. Hesar jarðir eru í alt uml. 21,6 hektarar í vídd ( 1 ha = 10 tús. M2 ) Øll frílendisætlanin fevnir tó í alt um uml. 28,2 ha. Lendið er partur av tí býarskipanarliga grøna geiranum, ið gongur úr fjøruni við Boðanes og Hoyvíkina, niðan gjøgnum Hoydalarnar og Ternurygg, og út í hagan uppi undir Húsareyninum og Villingafossi.

Tað kann eisini viðmerkjast, at gjøgnum matriklin gongur almenn gøta, sum verður nógv brúkt av havnarborgarum.

Vísast kann á, at fíggjarnevndin sambært máli nr. 2007-1225, hin 16. mai 2007, samtykti, at mæla býráðnum til, at kommunan ognar sær økið fyri jarðarprísin frá Búnaðarstovuni. Hin 24. mai 2007, handar seljarin kommununi bræv, har seljarin krevur kr. 400 kr.m2. og samtykkir býráðið fyri læstum hurðum hin 24. mai 2007, ikki at keypa.

Grundstykkið liggur nú á sølulista við prísuppskoti kr. 2.000.000,- svarandi til 188,40 kr.m2.

Sambært heimasíðuni hjá Búnaðarstovuni er prísurin fyri landsjørð – øki1. Tórshavn.
C. Velt lendi og væl dyrkingarbart lendi, sum liggur væl fyri 137 kr.m2. Keypsprísurin vildi tá veri 1.454.392,-

Vit hava tosað við meklara sum greiðir frá, at tað ikki nyttar at lata boð inn, sum er lægri enn samsvarandi jarðarprísi sambært Búnaðarstovuni sum er 137 kr.m2.

Meklarin greiðir eisini frá, at privatir keyparar eisini hava víst ognini áhuga.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini.**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið.**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum.** Ongir.

**Umhvørvisárin.** Ongi.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.** Kortsjal.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin í stjórnarskrivstovuni, mæla fíggjarnevndini til at heimila umsitingini at bjóða uppá trøðna upp til kr. 1.475.000,00 + meklaraútreiðslur.
Keypið verður fíggjað av konto 6175 keyp/søla.

**Fíggjarnevndin 22. august 2018:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Bergun Kass og Jákup Dam, taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson tekur ikki undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Heðin Mortensen, atkvøður blankt.

**Ískoyti:**
Kommunan hevur lagt boð inn áljóðandi kr. 1.475.000,00
Boðið, var treytað av býráðssamtykt, og var galdandi til 17.05.2018 kl. 15:00

Meklarin hevur boðað frá, at seljarin ikki tekur av boðnum.

**Fíggjarnevndin 14. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Ískoyti.**
Meklarin upplýsir at trøðin framvegis ikki er seld, og at seljarin hevur tikið trøðna av sølulista.

Hóast boðið ikki er nøktandi, vil seljarin nú møguliga selja fyri 1,475 mill. kr.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla fíggjarnevndini til at umrøða málið, hvørt kommunan skal fara víðari við málinum ella ikki.

Viðmælir fíggjarnevndin at keypa trøðna, má játtan útvegast til keypið.

**Fíggjarnevndin 14. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Ískoyti.**
Meklarin upplýsir at trøðin framvegis ikki er seld, og at seljarin hevur tikið trøðna av sølulista.

Hóast boðið ikki er nøktandi, vil seljarin nú møguliga selja fyri 1,475 mill. kr.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla fíggjarnevndini til at umrøða málið, hvørt kommunan skal fara víðari við málinum ella ikki.

Viðmælir fíggjarnevndin at keypa trøðna, má játtan útvegast til keypið.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2019:** Útsett.

**Ískoyti:**
Forkvinnan í byggi- og býarskipanarnevndini ynskir málið á skrá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. oktober 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn, Bogi Andreasen og Helena Dam á Neystabø, samtykti at mæla fíggjarnevndini til at heimila umsitingini at bjóða uppá trøðna upp til kr. 900.000 av kt. L6275 og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, mælir frá at keypa ognina.

**Ískoyti:**
Byggi- og býarskipanarnevndin samtykti 07. okt 2020 at mæla fíggjarnevndini til at heimila umsitingini at bjóða uppá trøðna, matr. nr. 16b, Hoyvík, upp til kr. 900.000.

Hugsanin er, at boðið skal fíggjast soleiðis:
300.000 kr av L62033, Havnadalur - fríøkið
300.000 kr av L62032, Gøta kring Havnina og fiskastykkið
300.000 kr av L62023, Frílendið við Hoydalsá.

**Fíggjarnevndin 28. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og at fíggja eitt møguligt keyp soleiðis:
300.000 kr av L62033, Havnadalur - fríøkið
300.000 kr av L62032, Gøta kring Havnina og fiskastykkið
300.000 kr av L62023, Frílendið við Hoydalsá.

At beina í býráðið at viðgera sum eykajáttan, ið krevur tvær viðgerðir, um tikið verður av boðnum.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**<u>FUNDURIN LOKIN KL. 21:00</u>**

**<u>GERÐABÓKIN GÓÐKEND:</u>**

| | | |
|---|---|---|
| Annika Jacobina Olsen | Helena á Dam Neystabø | Tróndur Sigurðsson |
| Halla Samuelsen | Bogi Andreasen | Annfinn Brekkstein |
| Jákup Dam | Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal | Bjørghild Djurhuus |
| Gunvør Balle | Turið Horn | Bergun Kass |
| | Heðin Mortensen | |